LM-118/2014

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Dagfesting:** 5. mars 2015
Tygara ref.:
Máltal.: **12/00072-86**

**Løgtingsmál nr. 118/2014: Uppskot til løgtingslóg um upphavsrætt (Upphavsrættarlógin)**

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um upphavsrætt (Upphavsrættarlógin)

## Kapittul 1
## Allýsing og málsevni

*Verk og upphavsmaður*

**§ 1.** Sum verk verða roknað bókmentaverk og listaverk í røðu og riti, leikrit, leiklist, tónlist, myndlist, byggilist, filmar, fotolist, brúklist og aðrar samsvarandi listagreinir uttan mun til, hvussu ella í hvørjum sniði verkið verður skapað.
*Stk. 2.* Kort, strikumyndir, tekningar, snið, modellir og annað líknandi tilfar, sum upplýsa um eitt evni, ella sum geva nærri frágreiðing um eitt evni, verða í hesum viðfangi mett á sama hátt sum bókmentaverk. Hetta er eisini galdandi fyri telduforrit.
*Stk. 3.* Tann, ið skapar eitt verk, er upphavsmaður og hevur upphavsrætt til verkið samsvarandi ásetingunum í hesi lóg.
*Stk. 4.* Upphavsmaður hevur ræðisrætt og einkarætt til at gera eintøk av sínum verki og geva tað út í upprunaligum ella broyttum líki, í týðing ella aðrari tillaging.

*Framleiðsla og útgáva*

**§ 2.** Framleitt eintak er eitthvørt beinleiðis ella óbeinleiðis, fyribils ella varandi eintak, í fullum ella lutvísum líki, uttan mun til framleiðsluhátt ella framleiðslusnið. Framleiðsla er eisini at goyma verk á tóli, ið kann endurgeva tað.
*Stk. 2.* Verk er tøkt fyri almenninginum, tá ið tað verður:
1) boðið alment til sølu, til láns, til leigu ella givið sum gáva,
2) sýnt fram alment,
3) framført alment.
*Stk. 3.* Almenn framførsla sambært stk. 2, nr. 3 er eisini, tá ið:
1) verk verða flutt almenninginum kaðalborið ella tráðleyst, eitt nú gjøgnum kringvarp ella annað tól, tá ið almenningurin hevur atgongd til verkini á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð,
2) verk verða framførd á einum virki fyri einum størri skara, sum annars hevði verið mettur sum ikki-almennur.

*Upplýsing um upphavsmannin*

**§ 3.** Álagt er, at navnið á upphavsmanninum verður upplýst, har tað hóskar, bæði á eintøkum, og tá ið verkið verður almannakunngjørt.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki at broyta í einum verki ella at kunngera tað á slíkan hátt ella í slíkum samanhangi, sum ger, at heiður ella serkenni upphavsmansins verða skerd.
*Stk. 3.* Upphavsmaður kann ikki siga rættin sambært hesi grein frá sær, uttan tá ið talan er um brúk, sum er avmarkað bæði í mun til slag og tilfar.

*Almannakunngerðing og útgáva*

**§ 4.** Eitt verk er almannakunngjørt, tá tað á lógligan hátt er atkomandi hjá almenninginum.
*Stk. 2.* Eitt verk er útgivið, tá ið upphavsmaður hevur givið samtykki til, at eintøk av verkinum verða boðin til sølu ella á annan hátt spjadd alment.

*Týðing og tillaging*

**§ 5.** Tann, sum týðir eitt verk, umskrivar tað til annað brúk, broytir tað úr einari bókmentagrein ella listagrein í aðra, ella sum ger aðra tillaging av verkinum, hevur upphavsrættin til broytta verkið. Hesin upphavsrættur gevur tó ikki ræðisrætt til verkið á ein hátt, sum er ósambæriligur við upphavsrættin til frumverkið.
*Stk. 2.* Verður eitt verk brúkt sum fyrimynd ella á annan hátt er grundarlag undir øðrum nýggjum og sjálvstøðugum verki, er nýggja verkið ikki knýtt at upphavsrættinum til frumverkið.

*Savnverk*

**§ 6.** Tá ið verk ella partar av verkum hjá einum ella fleiri upphavsmonnum verða savnað saman í savnverk, hevur tann, sum hevur sett verkini saman, upphavsrættin til hetta. Hesin upphavsrættur skerjir ikki upphavsrættin til einstøku verkini .

*Felagsverk*

**§ 7.** Tá ið tveir persónar ella fleiri eru upphavsmenn at sama verki, og ikki er tilskilað, hvørji avrik hvør teirra eigur, eiga teir saman upphavsrættin til verkið. Teir kunnu tó hvør sær átala brot á upphavsrættin.

*Meting um upphavsmannin*

**§ 8.** Upphavsmaður at einum verki er, til annað verður ásannað, tann, sum á vanligan hátt er skrivaður ella lýstur sum upphavsmaður, tá ið verkið verður almannakunngjørt. Hetta er eisini galdandi fyri upphavsmenn, sum skriva undir dulnevni ella nýta annað frámerki, tá ið almenningurin veit, hvør dulnevndi er.
*Stk. 2.* Tá ið verk verður givið út, uttan at upphavsmaðurin verður nevndur samsvarandi stk. 1, verður útgevarin settur í hansara stað, til navn hansara er kunngjørt í nýggjari útgávu.

*Almenn skjøl*

**§ 9.** Lógir, kunngerðir, rundskriv frá myndugleikum, reglugerðir, dómar og onnur líknandi skjøl, sum tað almenna letur gera, eru ikki vard av upphavsrætti.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri verk, sum eru sjálvstøðug íkast til tey í stk. 1 nevndu skjøl. Hesi verk kunnu tó verða endurgivin saman við almennu skjølunum. Onnur nýtsla av verkunum er fevnd av upphavsrætti.

*Verja sambært aðrari lóggávu*

**§ 10.** Verja sambært lóg um design útilokar ikki upphavsrætt.

## Kapittul 2
## Avmarkingar av upphavsrætti

**§ 11.** Avmarking av upphavsrættinum sambært hesum kapitli skerjir ikki rættin hjá upphavsmanni sambært § 3, sbr. tó § 30.
*Stk. 2.* Tá verk verður brúkt sambært hesum kapitli, má verkið ikki broytast í størri mun, enn loyvda brúkið krevur. Verður verk

endurgivið alment, skal keldan verða tilskilað soleiðis, sum góður siður er.
*Stk. 3.* Tá verk verður brúkt sambært hesum kapitli, er tað ikki loyvt at framleiða eintøk við støði í endurgeving av verkinum í ósamsvari við § 2 ella við at fara uttanum tøkniligar skipanir, sbr. § 54. Ásetingin í 1. pkt. fevnir ikki um framleiðslu av eintøkum sambært ásetingum um avhending av skyldueintøkum í løgtingslóg um bókasøvn.
*Stk. 4.* Tað er loyvt at framleiða fyribils eintøk, ið
1) eru tilvildarlig ella eru til í eitt stutt bil,
2) eru óloysandi og munandi partur av einari tøkniligari tilgongd,
3) einans hava til endamáls at gera eitt millumlið ført fyri at senda verk til onnur í einum netverki ella at gera tað møguligt at nýta verkið á lógligan hátt og
4) ikki hava sjálvstøðugt fíggjarligt virði.
*Stk. 5.* Ásetingarnar í stk. 4 eru ikki galdandi fyri telduforrit og dátugrunnar.

*Eintøk til egið brúk*

**§ 12.** Av almannakunngjørdum verkum kann einhvør framleiða ella lata framleiða einstøk eintøk til egið brúk, um so er, at hetta ikki verður gjørt við vinningi fyri eyga. Slík eintøk mugu ikki nýtast á annan hátt.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 geva ikki rættindi til
1) at byggja eitt bygningsverk,
2) at framleiða eitt eintak av listaverki við stoyping, prenti av upprunaplátu ella á nakran annan hátt, sum kann geva ta fatan, at eintakið kann metast sum frumverk,
3) at framleiða eintøk av talgildum telduforritum,
4) at framleiða eintøk av talgildum dátugrunni, tá ið eintøk verða framleidd við støði í einari endurgeving av talgilda dátugrunninum, ella
5) at framleiða einstøk talgild eintøk av øðrum verkum enn telduforritum og dátugrunnum, uttan so at henda framleiðsla einans verður gjørd til egið brúk hjá framleiðaranum ella húski hansara.
*Stk. 3.* Uttan mun til ásetingina í stk. 2, nr. 5 er ikki loyvt uttan samtykki frá upphavsmanninum at framleiða talgilt eintak av einum eintaki, sum er lænt ella leigað.
*Stk. 4.* Ásetingin í stk. 1 gevur ikki rætt til at nýta fremmant hjálparfólk, tá talan er um framleiðslu av eintaki av
1) tónlist,
2) filmslist,
3) bókmentaligum verki, um fremmant hjálparfólk virkar við vinnuligum endamáli,
4) brúklist, ella
5) listaverki, um eintakið hevur skap av eini listaligari endurgeving.
*Stk. 5.* Í mun til framleiðslu av eintaki av tónlist og filmslist gevur ásetingin í stk. 1 ikki brúkara rætt til at nýta tøkniskipan, sum er tøk fyri borgarunum á bókasøvnum, í handilshølum ella á øðrum almennum støðum. Sama er galdandi fyri bókmentalig verk, um tøkniskipanin er gjørd tøk við vinningi fyri eyga.

*Eintøk innan undirvísingarvirksemi*

**§ 13.** Til brúk innan undirvísingarvirksemi er loyvt at framleiða eintøk av útgivnum verkum og umvegis upptøku at gera eintøk av verkum, ið verða send í útvarpi ella sjónvarpi, um treytirnar fyri avtaluloyvi sambært § 42 eru loknar. Nevndu eintøk kunnu bert brúkast innan undirvísingarvirksemi, og nevnda brúk skal harumframt lúka treytirnar í avtaluni, sbr. § 42.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 um upptøku er ikki galdandi fyri filmslist, sum er at meta sum partur av vanligari filmsskrá av spælifilmum hjá biografum, uttan so at minni brot av verkinum er víst í sjónvarpi.
*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 1 um framleiðslu av útgivnum verkum er ikki galdandi fyri talgild telduforrit.
*Stk. 4.* Lærarar og næmingar kunnu sum liður í undirvísingarvirksemi gera upptøkur

av teirra egnu framførslum av verkum, um so er, at hetta ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli. Upptøkurnar mugu ikki nýtast á annan hátt.
*Stk. 5.* Um partur metir, at góðkendur felagsskapur sambært § 40 setir órímiligar treytir í avtaluna, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44. Semingsmaðurin kann áseta treytirnar, har ímillum avgera støddina á viðurlagnum.

*Eintøk innan almennar og privatar stovnar, felagsskapir og vinnuvirki*

**§ 14.** Við avtalu sambært § 42 kunnu almennir og privatir stovnar, felagsskapir og vinnuvirki til innanhýsis nýtslu í teirra virksemi umvegis ljósprent ella líknandi framleiða eintøk av yrkisligum greinum í bløðum, tíðarritum og ritsøvnum og av stuttum brotum av útgivnum yrkisligum verkum, tónleikaverkum og myndlýsingum, sum eru endurgivin í tilknýti til tekstin, um treytirnar fyri avtaluloyvi sambært § 42 eru loknar.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 gevur nevndu stovnum og virkjum rætt til at nýta uttanhýsis hjálparfólk at framleiða innan karmarnar av stk. 1.
*Stk. 3.* Um partur metir, at góðkendur felagsskapur sambært § 40 setir órímiligar treytir í avtaluna, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44. Semingsmaðurin kann áseta treytirnar, har ímillum avgera støddina á viðurlagnum.

*Á sjúkrahúsi, røktarheimi, í fongsli o.a.*

**§ 15.** Sjúkrahús, røktarheim, fongsul og dagstovnar á almannaøkinum og sjúkrarøktarøkinum kunnu til stutt varandi brúk taka upp verk, sum verða send í útvarpi og sjónvarpi, til at vísa forskotið fyri búfólkunum.
*Stk. 2.* Nýtsla sambært stk. 1 má tó ikki gerast við vinnuligum endamáli, og møguligur kostnaður fyri brúkararnar kann ikki vera størri enn kostnaðurin fyri at gera upptøkurnar.
*Stk. 3.* Upptøkurnar kunnu bert nýtast innanhýsis á stovninum.

*Útflýggjan av vardum tilfari frá musealum søvnum*

**§ 16.** Við avtalu sambært § 42 kunnu almenn søvn eftir bílegging frá brúkara endurgeva talgildar greinar í bløðum, tíðarritum og ritsøvnum og av stuttum brotum úr bókum og øðrum útgivnum bókmentaverkum eins og myndatilfari og nótum í tilknýti til tekstin til viðkomandi brúkara; tó undantikið útvarpssendingar og sjónvarpssendingar ella av øðrum verkum á slíkan hátt, at almenningurin fær atgongd til tey á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1.
*Stk. 2.* Fæst ikki semja um viðurlagið, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44.
*Stk. 3.* Søvnini kunnu framleiða eintøk av vardum verkum, ljóð- og myndaupptøkum, fotomyndum og skráum uttan samtykki frá rættindahavarum. Rætturin til at framleiða eintøk er treytaður av, at framleiðslan er neyðug í virksemi savnsins.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um rættin hjá søvnum sambært stk. 3.

*Til fólk við lesitarni og hoyritarni*

**§ 17.** Til blind, sjónveik, fólk, ið bera talubrek, deyv og til persónar annars, sum vegna brek ikki eru førir fyri at lesa prentaðan tekst, er loyvt at endurgeva og at spjaða eintøk av útgivnum verkum, tá ið hetta er serliga ætlað til nýtslu hjá nevndu persónum. Ásetingin í 1. pkt. er ikki galdandi fyri endurgeving ella spjaðing av eintøkum við vinningi fyri eyga.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri ljóðupptøkur av bókmentaverkum ella endurgeving av ljóðupptøku, ið einans er ljóðupptøka av tónlistaverkum.
*Stk. 3.* Ljóðupptøkur av útgivnum bókmentaligum verkum kunnu endurgevast og spjaðast til nýtslu hjá fólki við lesitarni, tá ið hetta ikki verður gjørt við vinningi fyri

eyga. Upphavsmaður hevur krav upp á viðurlag. Er ikki semja millum partarnar um støddina á viðurlagnum, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann, sambært § 44.
*Stk. 4.* Landsstovnar og kommunalir stovnar og aðrir sosialir ella almannagagnligir stovnar kunnu til brúk fyri fólki við lesitarni og hoyritarni framleiða eintøk av verkum, sum verða send í útvarpi og sjónvarpi, um treytirnar fyri avtaluloyvi sambært § 42 eru loknar. Slík upptøka má bert brúkast innan fyri karmarnar av avtaluni.

*Framleiðsla av savnverki til brúk í undirvísingarvirksemi o.tíl.*

**§ 18.** Minni partar av bókmentaligum verkum og tónlist ella eitt minni vav av einum tílíkum verki kann til brúk í undirvísingarvirksemi endurgevast í savnverki, samansett av íkastum frá einum størri skara av upphavsmonnum, tá ið fimm ár eru liðin frá árinum, tá ið verkið varð útgivið. Í tilknýti til tekstin er eisini loyvt at endurgeva listaverk og verk av frágreiðandi slagi, sbr. § 1, stk. 2, tá ið fimm ár eru liðin frá tí ári, at verkið varð tøkt fyri almenninginum. Upphavsmaður hevur krav upp á viðurlag. Fæst ikki semja um viðurlagið, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 fevnir ikki um verk, sum eru gjørd til brúk í undirvísingarvirksemi, ella um endurgevingin er gjørd við vinningi fyri eyga.
*Stk. 3.* Einstakir útgivnir sangtekstir kunnu endurgevast í sanghefturn til brúk hjá luttakarum á fundi, tó mugu ikki gerast fleiri enn 1.200 eintøk av hvørjum sanghefti.

*Spjaðing av eintøkum*

**§ 19.** Tá ið eintak av verki við loyvi frá upphavsmanninum er selt ella á annan hátt avhendað til onnur, kann eintakið spjaðast víðari.
*Stk. 2.* Tað er tó ikki loyvt at leiga eintøk av einum verki út til almenningin uttan loyvi frá upphavsmanni. Hetta er tó ikki galdandi fyri bygningar og brúklist.
*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 1 loyvir ikki útláni av eintaki av filmslist og talgildum telduforriti uttan loyvi frá upphavsmanni. Undantikið er tó talgilt telduforrit, sum er partur av einum bókmentaligum verki, og sum verður lænt út saman við tí.
*Stk. 4.* Stk. 1 skerjir ikki rættin til at fáa tillutað bókasavnsgjald sambært løgtingslóg um bókasøvn.

*At vísa eintøk*

**§ 20.** Tá ið eitt verk er útgivið, ella tá ið upphavsmaður hevur avhendað eitt eintak av listaverki, kunnu útgivnu ella avhendaðu eintøkini vísast alment.

*Almenn framførsla*

**§ 21.** Eitt útgivið verk, sum ikki er leiklist ella filmslist, kann framførast alment

1) við høvi, har áhoyrarar ella áskoðarar hava ókeypis atgongd, um framførslan ikki er týðandi fyri høvið, og framførslan ikki fer fram við vinningi fyri eyga, og
2) tá ið framførslan fer fram í sambandi við gudstænastu ella undirvísing.

*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1, nr. 2 fevnir ikki um framførslu í útvarpi ella sjónvarpi og í undirvísingarvirksemi, sum fer fram við vinningi fyri eyga.

*Sitat*

**§ 22.** Tað er loyvt at sitera eitt almannakunngjørt verk samsvarandi góðum siði og í tí vavi, sum er treytað av endamálinum.

*Endurgeving av listaverkum o.a.*

**§ 23.** Almannakunngjørd listaverk og verk av frágreiðandi slagi sambært § 1, stk. 2 kunnu endurgevast í sambandi við ummæli ella í sambandi við vísindaliga lýsing ella tulking. Endurgeving sambært hesi áseting skal gerast saman við tekstinum soleiðis,

sum góður siður er og í tí vavi, sum er treytað av endamálinum. Hetta má ikki gerast við vinningi fyri eyga.
*Stk. 2.* Almannakunngjørd listaverk kunnu endurgevast í sambandi við umrøðu av gerandishendingum í bløðum og tíðarritum soleiðis, sum góður siður krevur og í tí vavi, sum treytast av endamálinum. Ásetingin í 1. pkt. er ikki galdandi fyri verk, ið eru framleidd við atliti at endurgeving í bløðum og tíðarritum.
*Stk. 3.* Útgivin listaverk ella eintøk av listaverki, ið upphavsmaðurin hevur avhendað til onnur, kunnu endurgevast í bløðum, tíðarritum, filmi og sjónvarpi, tá henda endurgeving ikki er tað berandi í tí høpi.

*Endurgeving í kunnandi tilfari um sølu og líknandi*

**§ 24.** Listaverk, ið er partur av einum savni, ella sum á annan hátt verður boðið til sølu, kann endurgevast í skráum yvir savnið. Tílík listaverk kunnu harumframt endurgevast í fráboðan um framsýning ella sølu, har ímillum verða flutt almenninginum sambært § 2, stk. 3, nr. 1.
*Stk. 2.* Tá listaverk varandi er sett upp við veg ella á plássi, har atkomuligt er hjá almenninginum, kann listaverkið verða avmyndað. Ásetingin í 1. pkt. er tó ikki galdandi, um listaverkið er høvuðsevnið í myndini, og myndin verður tikin við vinningi fyri eyga.
*Stk. 3.* Bygningar kunnu frítt avmyndast.

**§ 25.** Almannakunngjørd listaverk kunnu endurgevast, um treytirnar fyri avtaluloyvi sambært § 42 eru loknar. Hetta er tó ikki galdandi, um upphavsmaður hevur sett bann móti nøkrum av avtalupørtunum viðvíkjandi endurgeving av verkinum.
*Stk. 2.* Um partur metir, at góðkendur felagsskapur sambært § 40 setir órímiligar treytir í avtaluna, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44. Semingsmaðurin kann áseta treytirnar, har ímillum avgera støddina á viðurlagnum

*Tíðindafrásøgn frá hending ella hátíðarhaldi*

**§ 26.** Tá ið framførsla ella framsýning av einum verki er partur av einari gerandishending, og gerandishendingin verður endurgivin á filmi, í útvarpi ella sjónvarpi, kann verkið verða tikið við í tann mun, at endurgevingin av verkinum er ein natúrligur partur av gerandishendingini ella hátíðarhaldinum.

*Alment kjak*

**§ 27.** Loyvt er at endurgeva almennar samráðingar á Løgtingi, í býráðum og bygdaráðum og hjá øðrum alment valdum myndugleikum, á rættarfundum og almennum umboðsfundum, har almennir spurningar verða umrøddir.
*Stk. 2.* Upphavsmaðurin hevur einkarætt til at geva út savn av sínum egna íkasti til kjakið, sambært stk. 1

*Innlit*

**§ 28.** Upphavsrætturin er ikki til hindurs fyri, at tað verður givið innlit í vard verk, sum eru latin einum fyrisitingarligum myndugleika ella latin einum dómstóli í sambandi við virksemi hjá myndugleikanum, har ímillum at onnur krevja innlit í eintøk av skjølum samsvarandi galdandi innlitsrætti. Tað sama ger seg galdandi fyri verk, sum myndugleikin ella dómstólurin hevur framleitt.
*Stk. 2.* Upphavsrætturin er ikki til hindurs fyri, at tað verður givið atgeingi til skjøl, sum eru avhend til eitt alment skjalasavn, tó er hetta treytað av, at ásetingarnar um atgeingi í løgtingslóg um Føroya landsskjalasavn verða hildnar. Tó mugu avrit av privatum savnsskjølum ikki verða útflýggjað.
*Stk. 3.* Innlit í tilfar sambært stk. 1 og 2, er treytað av, at verkið ikki verður

almannakunngjørt, ella at eintøk verða gjørd, spjadd ella nýtt á annan hátt uttan so, at upphavsmaðurin loyvir hesum.

*Nýtsla av vardum verkum í umsitingini*

**§ 29.** Í tí vavi, sum er treytað av endamálinum, er loyvt at endurgeva verk í sambandi við

1) rættarmál og mál, sum verða viðgjørd í fyrisitingarligum nevndum o.l.
2) málsviðgerð innan almennu fyrisitingina og stovnar undir Løgtinginum.

*Stk. 2.* Nýtsla á annan hátt, enn nevnt í stk. 1, er treytað av galdandi lógarásetingum.

*Broyting av bygningi og brúkslutum*

**§ 30.** Bygningar kunnu broytast av ánaranum uttan loyvi frá upphavsmanninum, um broytingin er av tøkniávum ella praktiskum atlitum at nýtsluni av bygninginum.
*Stk. 2.* Brúkslutir kunnu broytast av ánaranum uttan loyvi frá upphavsmanninum.

*Kringvarp*

**§ 31.** Kringvarp Føroya og kringvarpsstøð við sendiloyvi sambært løgtingslóg um kringvarp kunnu senda tilfar, sum er útgivið, tá ið avtala um viðurlag fyriliggur við upphavsrættarfelag sambært § 42. Hetta er tó ikki galdandi fyri pall- og filmsverk.
*Stk. 2.* Almannakunngjørd verk, sum Kringvarp Føroya hevur framleitt, og sum eru í miðlasavni Kringvarpsins, kunnu verða endursend, og almenningurin kann fáa atgongd til tey á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, tá ið avtala um viðurlag fyriliggur við upphavsrættarfelag sambært § 42. Ásetingin er eisini galdandi fyri sendingar, sum eru gjørdar, tá henda lóg kom í gildi.
*Stk. 3.* Kringvarpsstøð ella framleiðari av kringvarpssending skal samtykkja, at annar miðil kringvarpar sendingina. Kringvarpssendingin kann ikki uttan samtykki avmyndast ella takast upp á band, film ella annan útbúnað, sum kann endurgeva sendingina.
*Stk. 4.* Upphavsmaður kann banna kringvarpsstøð nýtslu sambært stk. 1.
*Stk. 5.* Stendst ósemja millum kringvarpsstøð og upphavsrættarfelagsskap, kann hvør av pørtunum leggja málið fyri semingsmann, sbr. § 44.
*Stk. 6.* Ásetingarnar í § 1, stk. 2-4, § 7, § 11, stk. 2-5, § 12, stk. 1, stk. 2, nr. 5, stk. 3, stk. 4, nr. 2 og stk. 5, 1. pkt., §§ 13, 15 og 16, § 17, stk. 1, 2 og 4, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 21, 22, 26, 28 og 29, § 31, stk. 2, §§ 32, 34, 35, 39, 46 og 47 og § 49, stk. 2 og 3, §§ 50 og 56 eru eisini galdandi fyri útvarpssendingar og kringvarpssendingar.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um endursending, um útflýggjan av upptøkum, um endurvarping av vardum tilfari, og hvussu upphavsmaður kann banna nýtslu av sínum verki í kringvarpi, um viðurskifti, tá ið upphavsrætturin er latin øðrum at umsita, um tá sent verður umvegis fylgisvein og um ósemju í sambandi við nýtslu av vardum tilfari. Harumframt verða ásettar reglur um goymslu av fyribils og tilvildarligum upptøkum í kringvarpi, sum skulu nýtast í seinni sendingum.

**§ 32.** Almannakunngjørd verk, sum eru partar av framleiðsluni hjá Kringvarpi Føroya, kunnu, tá ið avtala er gjørd við góðkendan upphavsrættarfelagsskap sambært hesi lóg, endursendast, framførast av Kringvarpi Føroya og gerast tøk fyri almenninginum á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr.1, annað lið.
*Stk. 2.* Upphavsmaður kann banna kringvarpsstøð nýtslu sambært stk. 1.

**§ 32 a.** Til at nýta í teirra sendingum kunnu kringvarpsstøðir taka upp verk á band, film ella annan miðil, ið kann endurgeva verkið, treytað av, at kringvarpsstøðin hevur rætt til at senda verkið.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um goymslu og nýtslu av hesum fyribils og tilvildarligu upptøkunum.

**§ 33.** Kjaksendingar í útvarpi og sjónvarpi, har mál av almennum áhuga verða umrødd, kunnu frítt endurgevast. Upphavsmaðurin hevur tó einkarætt at útgeva savn við egnum ískoytum.

**§ 34.** Fjølmiðlar og kringvarpsstøðir kunnu eftir áheitan útflýggja upptøkur av egnum útvarpssendingum og egnum sjónvarpssendingum til teirra, ið hava verið við í viðkomandi sending, ella sum kenna seg eyðmýkt av viðferð ella umrøðu í sendingini. Upptøkur sambært hesi áseting eru bert til privata nýtslu.

**§ 35.** Verk, ið verða send tráðleyst í útvarpi ella sjónvarpi, kunnu víðarisendast samstundis og óbroytt umvegis kaðalkervi og til almenningin umvegis útvarpskervi, tá avtala við felagsskap sambært § 42 er gjørd. Henda áseting er ikki galdandi fyri tey rættindi, sum útvarps- og sjónvarpsfeløg eiga.
*Stk. 2.* Uttan mun til stk. 1 kunnu verk, ið eru partar av tráðleysari útvarps- ella sjónvarpssending, ið verða móttikin við egnari antennu, sendast umvegis kaðalkervi, ið ikki fevnir um fleiri enn tvær samanbindingar.
*Stk. 3.* Eigarin av kaðalkervinum ber ábyrgdina av, at avtala verður gjørd við avvarðandi upphavsrættarfelag. Er avtalan við upphavsrættarfelagið orðað soleiðis, at kravt verður inn fyri hvørja samanbinding, er tað brúkarin av tí einstøku samanbindingini, ið ber ábyrgdina av at rinda sín part. Sama er galdandi, um semingsmaður í upphavsrættarmálum í einum máli ásetir ávíst gjald fyri hvørja samanbinding.
*Stk. 4.* Verk, ið verða send í útvarpi ella sjónvarpi, kunnu á annan hátt enn nevnt í stk. 1 verða endurgivin av øðrum, um treytirnar fyri avtaluloyvi eru loknar. Framleiðsla av eintøkum og at gera verk tøk fyri almenninginum á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1, skal verða sent í tíðarsamanhangandi tilknýti til sendingina.
*Stk. 5.* Verk, sum útvarp ella sjónvarp gera tøk fyri almenninginum á sjálvvaldum stað til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1, kunnu gerast tøk av øðrum á ein hátt, at almenningurin fær atgeingi til verkini á einum sjálvvaldum stað og til sjálvvalda tíð, um verkini verða gjørd tøk fyri almenninginum á nevnda hátt og til somu tíð, sum útvarp ella sjónvarp gera verkini tøk fyri almenninginum, og treytirnar fyri avtaluloyvi eru loknar. Tað er loyvt at framleiða eintøk, sum eru neyðug fyri, at verkini kunnu verða gjørd tøk fyri almenninginum sambært hesi áseting.
*Stk. 6.* Ásetingarnar í stk. 4 og 5 eru ikki galdandi, um upphavsmaður yvirfyri brúkara ella felagsskapi bannar nýtsluna av sínum verki. Ásetingarnar eru ikki galdandi fyri rættindi, sum útvarp ella sjónvarp sjálvt er eigari av.
*Stk. 7.* Um partur metir, at góðkendur felagsskapur sambært § 40 setir órímiligar treytir í avtaluna, kunnu partarnir hvør sær leggja málið fyri semingsmann sambært § 44. Semingsmaðurin kann áseta treytirnar, har ímillum avgera støddina á viðurlagnum.

*Dátugrunnar, telduforrit o.l.*

**§ 36.** Tann, ið hevur rætt at nýta eitt telduforrit, hevur loyvi til at:
1) framleiða eintøk av telduforritinum og gera tillagingar í tí, sum eru neyðugar fyri at brúka forritið til ætlaða endamálið, herundir at rætta villur í forritinum,
2) framleiða trygdareintak av forritinum, um tað er neyðugt fyri at brúka tað, og
3) hyggja at, kanna ella royndarkoyra telduforrit fyri at staðfesta, hvørji hugskot og mannagongdir eru nýtt í einstøku lutunum í telduforritinum, um hetta verður gjørt í sambandi við, at forrit

verður lisið, víst á skíggja, koyrt, flutt, goymt ella líknandi, sum viðkomandi hevur rætt at útinna.

*Stk. 2.* Rætturin at nýta ein dátugrunn fevnir eisini um átøk, ið eru neyðug til tess at fáa atgongd til innihaldið í dátugrunninum og útinna vanliga nýtslu av hesum innihaldi.

*Stk. 3.* Víkjast kann ikki frá ásetingunum í stk. 1, nr. 2 og 3 og stk. 2 við avtalu.

*Týðing av kotum og samkoyring*

**§ 37.** Tað er loyvt at framleiða eintøk av kotum til telduforrit og at týða kotuna, tá ið hetta er ein treyt fyri at útvega tær upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at fáa til vega samkoyring millum eitt sjálvstøðugt framleitt forrit og onnur forrit, um so er, at:

1) gerðirnar verða framdar av loyvishava, ella av øðrum persóni, ið hevur rætt til at brúka eitt eintak av einum forriti, ella vegna persón, ið hevur loyvi til hetta,
2) tær upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at fáa til vega samkoyring, ikki áður hava verið lætt og skjótt atgeingiligar hjá teimum í nr. 1 nevndu persónum, og
3) gerðirnar eru avmarkaðar til teir partar av tí upprunaliga forritinum, sum eru neyðugir til tess at fáa til vega samkoyring.

*Stk. 2.* Tær upplýsingar, sum eru útvegaðar í sambandi við stk. 1, kunnu ikki:

1) brúkast til annað endamál enn at gera tað sjálvstøðugt framleidda forritið samkoyriligt,
2) latast triðja persóni, uttan tá ið hetta er neyðugt til tess at gera hetta sjálvstøðugt framleidda forritið samkoyriligt, ella
3) brúkast til menning, framleiðslu ella marknaðarføring av einum forriti, sum í sínum stíli í víðastu merking samsvarar við tað upprunaliga, ella til nakað annað, sum er brot á upphavsrættin.

*Stk. 3.* Víkjast kann ikki frá ásetingunum í stk. 1 og 2 við avtalu.

*Fylgirættarviðurlag*

**§ 38.** Upphavsmaður hevur rætt til fylgirættargjald, tá ið eintak av listaverki verður endurselt. Henda áseting fevnir um eintøk av listaverkum, sum upphavsmaðurin hevur gjørt í avmarkaðum tali, ella sum eru gjørd í avmarkaðum tali við loyvi frá upphavsmanninum. Ásetingin í 1. pkt. fevnir ikki um bygningsverk.

*Stk. 2.* Fylgirættargjald verður rindað við endursølu, um so er, at seljarin, keyparin ella millummaðurin arbeiðir á listaverkamarknaðinum, eitt nú á einum uppboðsstovni, í einum listaverkahandli ella í eini listaverkasølu. Seljarin ella millummaðurin tekur sær av gjaldinum. Arbeiðir einans keyparin á listaverkamarknaðinum, skal hann einsamallur fáa gjaldið til vega.

*Stk. 3.* Fyri at sølan skal vera fevnd av hesi áseting, skal søluupphæddin vera í minsta lagi 300 evrur (uttan mvg) fyri eintakið. Samlaða fylgirættargjaldið verður ikki hægri enn 12.500 evrur (uttan mvg) fyri eintakið.

*Stk. 4.* Gjaldið verður roknað soleiðis:

1) 10% av tí parti av søluvirðinum, ið svarar til í mesta lagi 3.000 evrur (uttan mvg).
2) 5% av tí parti av søluvirðinum, ið liggur ímillum 3.000,01 og 50.000 evrur (uttan mvg).
3) 3% av tí parti av søluvirðinum, ið liggur ímillum 50.000,01 og 200.000 evrur (uttan mvg).
4) 1% av tí parti av søluvirðinum, ið liggur ímillum 200.000,01 og 350.000 evrur (uttan mvg).
5) 0,5% av tí parti av søluvirðinum, ið liggur ímillum 350.000,01 og 500.000 evrur (uttan mvg).
6) 0,25% av tí parti av søluvirðinum, ið liggur omanfyri 500.000,01 evrur (uttan mvg).

*Stk. 5.* Bert felagsskapir, ið virka við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. § 40, kunnu krevja inn fylgirættargjøld. Bert ein felagsskapur innan ávísa listagrein fær loyvi

at krevja inn fylgirættargjald í senn. Felagsskapurin stendur sjálvur fyri innkrevjing og afturbering av gjøldum og skal um gjørligt umboða øll listafólk innan ávísa listagrein. Eisini listafólk, ið ikki eru limir í felagsskapinum, kunnu gera krav upp á fylgirættargjald mótvegis felagsskapinum.
*Stk. 6.* Teir í stk. 2 nevndu seljarar og millummenn skulu:
árliga senda uppgerð, váttað av grannskoðara, yvir sølu, sum er fevnd av ásetingunum um fylgirættargjald, til tann í § 39, stk. 2 nevnda felagsskap, og
eftir áheitan frá felagsskapinum veita alla ta kunning, sum er neyðug fyri at tryggja, at røtt gjøld verða rindað fyri sølu, sum farin er fram síðstu 3 árini. Henda kunning skal verða send felagsskapinum, áðrenn 4 vikur eru farnar frá móttøku av áheitanini.

1) árliga senda uppgerð, váttað av grannskoðara, yvir sølu, sum er fevnd av ásetingunum um fylgirættargjald, til tann í § 39, stk. 2 nevnda felagsskap, og
2) eftir áheitan frá felagsskapinum veita alla ta kunning, sum er neyðug fyri at tryggja, at røtt gjøld verða rindað fyri sølu, sum farin er fram síðstu 3 árini. Henda kunning skal verða send felagsskapinum, áðrenn 4 vikur eru farnar frá móttøku av áheitanini.

*Stk. 7.* Hevur felagsskapurin ikki fingið ta í stk. 6, nr. 2 nevndu kunning, áðrenn 30 dagar eru farnir, kann felagsskapurin gera eina meting av, hvussu nógv skal verða rindað í fylgirættargjaldi í sambandi við endursøluna og innkrevja gjaldið.

## Kapittul 3
## Felags umsiting av upphavsrættargjøldum

*Felags umsiting av viðurlagi*

**§ 39.** Upphavsmaður, útinnandi listafólk og tann, sum hevur rættindi sambært hesi lóg, hevur rætt til viðurlag, tá verk verður nýtt samsvarandi hesi lóg.
*Stk. 2.* Viðurlagið kann verða kravt inn av felagsskapi, sum umboðar upphavsmenn, útinnandi listafólk og tey, sum hava rættindi sambært hesi lóg.

*Góðkenning av upphavsrættarfelagsskapi*

**§ 40.** Felagsskapur, sum umboðar upphavsmenn innan ávísa listagrein, skal hava loyvi frá landsstýrismanninum til tess at útinna sítt virksemi í Føroyum. Felagsskapur fær loyvi til ávíst virksemi eftir umsókn og skal umboða allar rættindahavarar innan ávísa listagrein uttan mun til limaskap. Landsstýrismaðurin kann seta treytir í loyvinum og kann gera av, at felagsskapur, sum fær loyvi, fatar um fleiri feløg, sum umboða tey, sum hava rættindi sambært hesi lóg.
*Stk. 2.* Loyvið er galdandi í fimm álmanakkaár í senn og er treytað av, at felagsskapurin alla tíðina lýkur loyvistreytirnar.
*Stk. 3.* Felagsskapurin skal í øllum loyvisskeiðnum

1) umboða ein munandi part av upphavsmonnum til tey verk ella tey sløg av verkum, sum verða brúkt í Føroyum,
2) eftir umbøn lata landsstýrismanninum allar upplýsingar um tey viðurskifti, sum eru neyðug fyri, at landsstýrismaðurin kann eftirkanna, um felagsskapurin alla tíðina lýkur loyvistreytirnar,
3) boða landsstýrismanninum frá øllum viðurskiftum, sum kunnu hava týdning fyri góðkenningina,
4) árliga senda landsstýrismanninum góðkendan roknskap og
5) virka innan fyri karmarnar av galdandi lóggávu og Føroya altjóða skyldum á upphavsrættarøkinum.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur og treytir um loyvi sbrt. stk. 1. Ásettar verða reglur um eitt nú krøv til felagsskapin, um karmarnar fyri virksemið, krøv til gjaldskráir, um treytir í loyvum og avtalum, sum felagsskapurin kann gera við brúkarar,

harundir upplýsingar, sum felagsskapurin kann krevja frá brúkaranum, um reglur um innkrevjing og afturbering av upphavsrættargjøldum.

*Avrokningartreytir*

**§ 41.** Viðurlag, sum felagsskapurin krevur inn, skal avroknast til viðkomandi upphavsmann.
*Stk. 2.* Felagsskapurin dregur frá tí í stk. 1 nevndu upphæddini eitt rímiligt gjald fyri umsiting.
*Stk. 3.* Felagsskapurin avroknar eisini við upphavsmenn, sum ikki eru limir í felagnum.
*Stk. 4.* Tá ið viðurlag verður býtt millum upphavsmenn, skal ikki gerast munur á limum og ikki-limum. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um stødd og útrokningargrundarlag av umsitingargjaldi sbrt. stk. 2.
*Stk. 5.* Upphavsmenn, ið ikki eru limir, kunnu krevja viðurlag frá felagsskapinum, um teirra verk eru brúkt, hóast tað ikki er tilskilað í avtaluni ella í viðurlagsreglum hjá felagsskapinum. Kravið kann bert rættast móti felagsskapinum.
*Stk. 6.* Fæst ikki semja um viðurlagið, kann hvør av pørtunum leggja málið fyri semingsmann, sbr. § 44.

*Avtala um viðurlag fyri brúk av vardum verki*

**§ 42.** Avtaluloyvi sambært hesi lóg hevur brúkari, ið hevur gjørt avtalu við felagsskap, sum innan ávísa listagrein umboðar upphavsmenn at einum týðandi parti av teimum verkum, ið verða brúkt í Føroyum. Hetta er tó ikki galdandi, um upphavsmaður hevur sett bann fyri, at nakar av avtalupørtunum kann brúka verk hansara.
*Stk. 2.* Ein avtala um brúk av vardum verkum skal vera ítøkilig og snúgva seg um ávísa nýtslu og vav av nýtsluni.
*Stk. 3.* Avtalan gevur brúkara rætt til at nýta verkið uttan loyvi frá upphavsmanninum, eisini hóast upphavsmaðurin ikki er limur í felagsskapinum, sum krevur inn upphavsrættargjøldini.

*Fyrning av viðurlagi*

**§ 43.** Viðurlag fyri nýtslu av vardum verki fyrnar 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið var nýtt.
*Stk. 2.* Tá góðkendur felagsskapur ger krav um viðurlag galdandi, hevur upphavsmaður ta freist, sum er ásett í stk. 1, at gera sítt krav galdandi mótvegis felagsskapinum.
*Stk. 3.* Skrivlig áheitan steðgar fyrning.

*Seming*

**§ 44.** Ósemja millum felagsskap, sbr. § 39, stk. 2, ella rættindahavarar, sum ikki eru limir í felagsskapi, og brúkara um nýtslu av vardum verkum, og ósemja um viðurlag sambært avtalu við felagsskapin verður loyst við einum óheftum semingsmanni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin setir semingsmann sambært stk. 1 og varamann hansara, og landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um førleikakrøv til semingsmann og heimildir hjá semingsmanni, herímillum at semingsmaður kann taka støðu til, um uppskotnar treytir fyri nýtslu av vardum verkum eru rímiligar, um støddin á viðurlagnum er rímilig, at semingsmaðurin kann geva fyribils avtaluloyvi, meðan málið verður viðgjørt, og at semingsmaðurin kann fáa álagt ávísar uppgávur, sum semingin skal fevna um.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir lønartreytir og setanartreytirnar hjá semingsmanni. Útreiðslurnar til semingsmann verða javnbýttar millum partarnar í málinum, sum bera útreiðslurnar við samábyrgd. Eru fleiri partar, bera allir partar útreiðslurnar við samábyrgd.
*Stk. 4.* Løgtingslóg um fyrisitingarlóg og løgtingslóg um innlit í fyrisitingina eru ikki galdandi fyri virksemið hjá semingsmanni.

**Kapittul 4**
**Onnur rættindi**

*Útinnandi listafólk*

**§ 45.** Uttan samtykki frá útinnandi listafólki kann framførsla hjá útinnandi listafólki av bókmentaverki ella listaverki ikki:
1) takast upp á band, film ella annan útbúnað, sum kann endurgeva framførsluna, ella
2) gerast tøk fyri almenninginum.

*Stk. 2.* Er annað ikki avtalað, merkir avtala millum útinnandi listafólk og filmsframleiðara um luttøku í upptøkuni eisini, at rætturin til at leiga filmin út er avhendur til filmsframleiðaran.

*Stk. 3.* Ásetingarnar í §§ 2, 3 og 6, § 11, § 12, stk. 1, stk. 2, nr. 5, stk. 3, stk. 4, nr. 1 og stk. 5, 1. pkt., §§ 13, 15 og 16, § 17, stk. 1, 2 og 4, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 21, 22, 26, 28 og 29, § 31, stk. 2, §§ 32, 32a, 34, 35, 39-43, 57-59, 61 og 62 eru eisini galdandi fyri framførslur hjá útinnandi listafólki og upptøkur av hesum framførslum.

*Framleiðari av ljóðupptøku*

**§ 46.** Uttan samtykki frá framleiðara kann ljóðupptøka ikki eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum.

*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 2, § 6, stk. 1, § 11, stk. 2-5, § 12, stk. 1, stk. 2, nr. 5, stk. 3, stk. 4, nr. 1 og stk. 5, 1. pkt., §§ 13, 15 og 16, § 17, stk. 1, 2 og 4, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 21, 22, 26, 28 og 29, § 31, stk. 2, §§ 32, 32a, 34 og 39-43 eru eisini galdandi fyri ljóðupptøkur.

**§ 46 a.** Uttan mun til ásetingarnar í § 46, stk. 1, §§ 66 og 67 kunnu útgivnar ljóðupptøkur kringvarpast í útvarpi og sjónvarpi og til aðra almenna framførslu. Ásetingin loyvir ikki, at útgivnar ljóðupptøkur verða gjørdar tøkar fyri almenninginum á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1, annað lið.

*Stk. 2.* Útinnandi listafólk og framleiðarar av ljóðupptøku skulu hava viðurlag fyri framførsluna. Viðurlagið kann bert verða kravt inn av felagsskapi, ið er góðkendur av landsstýrismanninum, og sum umboðar bæði útinnandi listafólk og framleiðarar av ljóðupptøkum. Fæst ikki semja um viðurlagið, kann hvør av pørtunum leggja málið fyri semingsmann, sbr. § 44.

*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri kringvarping og aðra almenna framførslu av filmverkum, tá ljóð og mynd verða kringvarpað ella framførd samstundis.

*Stk. 4.* Um brúkari av útgivnum ljóðupptøkum ikki rindar í samsvari við avtalu ella avgerð semingsmansins, kann við dómi staðfestast, at nýtslan er treytað av samtykki frá rættindahavara, til goldið er.

*Framleiðari av myndatøkum*

**§ 47.** Uttan samtykki frá framleiðara kann myndatøka ikki eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum.

*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 2, § 6, stk. 1, § 11, stk. 2-5, § 12, stk. 1, stk. 2, nr. 5, stk. 3, stk. 4, nr. 2 og stk. 5, 1. pkt., §§ 13, 15 og 16, § 17, stk. 1 og 4, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 22, 26, 28 og 29, § 31, stk. 2, §§ 32-34 og 39-43 eru eisini galdandi fyri myndatøkur.

*Framleiðari av fotomyndum*

**§ 48.** Tann, ið framleiðir fotomynd, hevur einkarætt til at framleiða eintøk av myndini og til at gera myndina tøka hjá almenninginum.

*Stk. 2.* Ásetingarnar í §§ 2, 3, 6, 9 og 11, § 12, stk. 1, nr. 5, og stk. 3, §§ 13-16, § 17, stk. 1 og 4, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 20, 21 og 23, § 24, stk. 1 og 2, § 26, §§ 28-32a, §§ 34-35, §§ 39-43, §§ 57-59 og §§ 62-64 eru eisini galdandi fyri fotomyndir.

*Framleiðari av vørulista, dátugrunni o.a.*

**§ 49.** Tann, ið framleiðir eitt katalog, eina skrá, ein dátugrunn ella líknandi, hevur einkarætt til avrikið. Einkarætturin fevnir um framleiðslu av eintaki og um at gera avrikið tøkt fyri almenninginum. Einkarætturin er treytaður av, at omanfyri nevnda avrikið setir eina størri mongd av

upplýsingum saman ella stendst av einari týðandi íløgu.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 fevnir eisini um smærri lutir av avrikinum, um hesir verða gjørdir tøkir hjá almenninginum, ella eintøk verða framleidd fleiri ferðir, regluliga ella á skipaðan hátt. Sama ger seg galdandi, um nevndu gerðir ikki kunnu metast at vera vanlig nýtsla av avrikinum ella á órímiligan hátt skaða lógfestu áhugamál framleiðarans.
*Stk. 3.* Verður avrik ella partur av avriki, sum nevnt í stk. 1, vart av upphavsrætti ella á annan hátt, kann henda verja eisini gerast galdandi.
*Stk. 4.* Ásetingarnar í §§ 2, 4, 7, 8 og 9, § 11, stk. 2 og 3, § 12, stk. 1, stk. 2, nr. 4, stk. 4, nr. 3 og stk. 5, 2. pkt., §§ 13-17, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 1 og 2, §§ 20-22 og 26, §§ 28, 29 og 31-35, § 36, stk. 2 og 3 og §§ 39-43 fevna eisini um tey í stk. 1 nevndu avrikini.
*Stk. 5.* Avtalutreytir, ið víðka framleiðarans rætt sambært stk. 1 til eitt almannakunngjørt avrik, eru ógildugar.

*Tíðindaskriv*

**§ 50.** Uttan samtykki er ikki loyvt at endurgeva tíðindaskriv, ið eftir avtalu verða útflýggjað frá útlendskari tíðindastovu ella frá útsendum tíðindafólki fyrr enn 12 tímar eftir, at tíðindini vórðu almannakunngjørd í Føroyum.

## Kapittul 5
## Ymiskar ásetingar

*Tittul, dulnevni og frámerki*

**§ 51.** Hevur ein upphavsmaður nýtt serligan tittul, dulnevni ella frámerki á einum verki, ið er givið út, kunnu onnur ikki almannakunngera eitt verk við sama frámerki ella einum frámerki, ið er so meinlíkt, at misskiljingar kunnu standast av hesum.
*Stk. 2.* Verður eitt verk almannakunngjørt, áðrenn 3 mánaðir eru farnir frá tí, at fyrra verkið var almannakunngjørt, er ásetingin í stk. 1 ikki galdandi, uttan so at samanblanding trúliga er tilætlað.

*At seta undirskrift á listaverk*

**§ 52.** Eingin kann seta navnið á upphavsmanninum ella eyðkenni hansara á eitt listaverk uttan so, at upphavsmaðurin hevur givið loyvi til hetta.
*Stk. 2.* Undir ongum umstøðum kann navn ella frámerki verða sett á eitt eintak, ið gjørt verður eftir einum listaverki, um vandi er fyri, at eftirgerðin og frumgerðin verða blandað saman.

## Kapittul 6
## Tøkniligur útbúnaður

*Amboð til uttanumvik av tøkniligum útbúnaði*

**§ 53.** Loyvt er ikki at selja ella í handilsligum høpi at hava um hendur amboð, sum hevur sum einasta endamál at lætta um ólógliga burturtøku ella uttanumvik av tøkniligum útbúnaði, sum er í brúki til tess at verja telduforrit.

*Munadyggur tøkniligur útbúnaður*

**§ 54.** Loyvt er ikki uttan loyvi frá upphavsmanninum at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað.
*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt at framleiða, flyta inn, spjaða, selja, leiga út, lýsa við sølu ella útleigan ella við handilsligum endamáli at hava í ogn skipanir, framleiðingar ella tilfarsliðir, sum:
1) eru fyri sølufremjan, sølulýsing ella marknaðarføring til tess at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað,
2) bert í avmarkaðan mun hava annað handilsligt endamál ella aðra handilsliga nýtslu enn tað at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað, ella
3) eru ment, framleitt, tillagað ella framt við tí endamáli at gera tað møguligt ella gagna tí at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað.

*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 2 verður somuleiðis nýtt til tænastuveitingar.
*Stk. 4.* Við munadyggan tøkniligan útbúnað í stk. 1 og 2 er at skilja øll sløg av munadyggum tøkniligum útbúnaði, sum í síni vanligu nýtslu hava til endamáls at verja verk, aðra framleiðslu o.a. sambært hesi lóg.
*Stk. 5.* Ásetingarnar í stk. 1-4 galda ikki fyri vernd av telduforritum.
*Stk. 6.* Ásetingarnar í stk. 1-4 eru ikki til hindurs fyri gransking í bronglan.

*Loyvt uttanumvik av munadyggum tøkniligum útbúnaði*

**§ 55.** Landsstýrismaðurin kann áleggja rættindahavara, sum hevur nýtt tøkniligan útbúnað, at lata brúkara fáa tað, sum honum tørvar, til tess at hann kann nýta sín rætt sambært lógini. Gongur rættindahavari ikki kravinum á møti, áðrenn 4 vikur eru farnar frá tí, at avgerð er tikin, kann brúkarin, uttan mun til § 54, fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað. Ásetingin í 1. og 2. pkt. er bert galdandi fyri brúkara, sum hevur lógliga atgongd til verkið ella framleiðsluna o.a.
*Stk. 2.* Stk. 1 er bert galdandi, tá ið rættindahavarin ikki hevur tryggjað, at brúkari, uttan mun til nýtta munadygga tøkniliga útbúnaðin, kann brúka sín rætt sambært stk. 1 við sjálvbodnum útbúnaði, harundir avtalu við aðrar partar.
*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri verk, framleiðslu o.a., sum við avtalu er skipað soleiðis, at almenningurin fær atgongd til tað á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann leggja heimildirnar sambært hesi grein til semingsmannin ella annan almennan myndugleika at umsita.

*Elektrónisk rættindaumsiting*

**§ 56.** Loyvt er ikki uttan játtan frá rættindahavaranum at:
1) taka burtur ella broyta elektróniskar upplýsingar um rættindaumsiting ella
2) spjaða eintøk, innflyta við tí endamáli at spjaða eintøk ella flyta almenninginum verk og aðra framleiðslu o.a., har tær elektrónisku upplýsingarnar um rættindaumsiting eru tiknar burtur ella broyttar uttan játtan.

*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 verður bert nýtt, um henda gerð verður framd av einum persóni, sum veit ella átti at vitað, at gerðin hevur við sær, ger møguliga, lættir um ella fjalir eitt brot á rættin til eitt verk ella eina aðra framleiðslu o.a., sum er vart sambært hesi lóg.

## Kapittul 7
## Sundurbýti av upphavsrætti

*Avhending*

**§ 57.** Upphavsmaður kann partvís ella til fulnar avhenda síni rættindi sambært hesi lóg. Tó kann rætturin til upphavsrættargjøld og tey rættindi, sum eru ásett í §§ 3 og 38, ikki verða avhend.
*Stk. 2.* Verður eintak av verki latið øðrum til ognar, er ikki talan um, at upphavsrættur til verkið verður avhendur.
*Stk. 3.* Hevur upphavsmaður avhendað ein rætt til at gera brúk av verkinum á ein ávísan hátt ella við ávísum miðlum, gevur avhendingin ikki eigaranum rætt til at gera brúk av verkinum á ein annan hátt ella við øðrum miðlum.
*Stk. 4.* Við avtalu kann víkjast frá ásetingunum í §§ 58-64, har annað ikki er ásett.

*Nýtsluskylda hjá tí, ið rættindi eru avhend til*

**§ 58.** Tann, sum upphavsrættindi eru avhend til, hevur skyldu at brúka rættindini. Upphavsmaður kann siga avtaluna um avhendingina upp við 6 mánaða varningi, um so er, at ætlaða brúkið ikki er byrjað við ársenda innan 3 ár eftir, at upphavsmaðurin hevur eftirlíkað sín part av avtaluni. Hetta er ikki galdandi, um brúkið byrjar í uppsagnartíðarskeiðnum.

*Stk. 2.* Tað kann ikki verða vikið frá stk. 1, uttan tá talan er um broyting í tíðarfreistunum.

*Avmarking í nýtslurætti í sambandi við avhending*

**§ 59.** Avhending av upphavsrætti gevur ikki tí, sum fær rættin, rætt til at broyta verkið, uttan so, at broytingin er vanlig ella ein sjálvsøgd forteyt fyri nýtsluni.
*Stk. 2.* Tann, sum fær upphavsrætt til ognar, hevur ikki rætt til at avhenda øðrum rættin, uttan tá víðari avhending er vanlig ella ein sjálvsøgd fortreyt. Hóast slíka avhending hevur tann, sum avhendir, framhaldandi ábyrgdina av, at avtalan við upphavsmannin verður lokin.

**§ 60.** Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um rættindi og skyldur hjá tí, sum avhendir upphavsrætt ella onnur rættindi, harundir um gjald og eftirlit, og um avmarkingar og freistir, sum tann, sum fær ognarrættin, hevur skyldu at halda seg til.

*Serlig áseting um telduforrit*

**§ 61.** Upphavsrætturin til eitt telduforrit, sum starvssettur hevur framleitt í arbeiðstíðini ella eftir ávísing frá arbeiðsgevarara, verður arbeiðsgevarans.

*Andlitsmynd*

**§ 62.** Upphavsmaður kann ikki útinna síni rættindi til eina umbidna andlitsmynd uttan við samtykki frá tí, ið bílegði myndina.

*Arvur*

**§ 63.** Vanligu reglurnar í arvalóggávuni eru galdandi, tá ið upphavsmaður doyr.
*Stk. 2.* Upphavsmaður kann í testamenti við bindandi virknaði eisini fyri hjúnafelaga og lívsarvingar vísa á, hvussu upphavsrætturin skal útinnast ella lata øðrum henda rætt at gera ávísing.

*Innheinting frá kravánara*

**§ 64.** Rætturin hjá upphavsmanni at ráða yvir sínum verki kann ikki koma undir innheinting hjá kravánara, hvørki rætturin hjá upphavsmanninum ella hjá teimum, sum hava fingið henda rætt við hjúnalagi ella sum arv.
*Stk. 2.* Kravánari kann heldur ikki innheinta sítt krav í eintaki av verki hjá upphavsmanninum ella hjá tí, sum hevur fingið henda rætt við hjúnalagi ella sum arv, um ætlanin er at gera krav í:
1) handriti,
2) plátum, formum ella líknandi, sum nýtt verða at gera listaverk, ella
3) eintøkum av listaverkum, sum ikki hava verið sýnd fram, boðin til sølu ella á annan hátt eru góðkend at verða almannakunngjørd.

## Kapittul 8
## Gildistíð

*Upphavsrættur*

**§ 65.** Upphavsrætturin stendur við í 70 ár frá árskiftinum eftir, at upphavsmaðurin doyði. Er talan um verk sambært § 7, verða hesi 70 árini roknað frá fyrsta árskifti eftir, at tann upphavsmaðurin, ið livdi longst, doyði. Upphavsrættur til filmar stendur tó við í 70 ár frá árskiftinum eftir, at tann, ið livdi longst av niðanfyri nevndu upphavsmonnum, doyði:
1) Høvuðsleikstjóri.
2) Handritahøvundur, harímillum eisini upphavsmenninir til samrøðutekstin.
3) Tónaskald, um so er, at tónleikurin er skrivaður serliga til filmin.
*Stk. 2.* Upphavsrætturin til tónlist við teksti, har tekstur og tónleikur eru gjørd serliga til viðkomandi verk, stendur upphavsrætturin við í 70 ár frá árskiftinum eftir, at tann, ið livdi longst av niðanfyri nevndu upphavsmonnum, doyði:
1) Rithøvundurin.
2) Tónaskaldið.
*Stk. 3.* Verður eitt verk almannakunngjørt, uttan at navn, dulnevni ella annað frámerki

er tilskilað, stendur upphavsrætturin við í 70 ár frá ársskiftinum eftir, at verkið var almannakunngjørt. Verður eitt verk almannakunngjørt í pettum, eitt nú í serligum heftum, bindum ella á annan átøkan hátt, verður omanfyri nevnda áramál roknað út fyri hvønn part fyri seg.
*Stk. 4.* Verður sagt frá, hvør upphavsmaður er samsvarandi § 8, áðrenn áðurnevnda 70-ára tíðarskeið er farið aftur um bak, ella ber til at ásanna, at upphavsmaðurin var deyður, áðrenn verkið var almannakunngjørt, verður gildistíðin fyri upphavsrættin roknað út sambært stk. 1.
*Stk. 5.* Er talan um verk, ið ikki er almannakunngjørt frammanundan, og er upphavsmaðurin ókendur, stendur upphavsrætturin við í 70 ár frá fyrsta ársskifti eftir, at verkið varð tilevnað.

*Framførsla*

**§ 66.** Framførsla sambært § 45, sum er upptikin á tann í § 45, stk. 1, nr. 1 nevnda hátt, kann ikki uttan samtykki frá útinnandi listafólkinum eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum, fyrr enn 50 ár eru liðin frá framførsluárinum.
*Stk. 2.* Verður upptøka av framførslu, sambært § 45, stk. 1, nr. 1, sum ikki er ljóðupptøka, útgivin ella almannakunngjørd innan fyri stk. 1 nevnda tíðarskeið, verður gildistíðin fyri verju 50 ár frá tí ári, tá ið verkið fyrstu ferð var útgivið ella almannakunngjørt. Gildistíðin verður roknað frá tí ári, tá ið framførslan fyrstu ferð varð antin útgivin ella almannakunngjørd.
*Stk. 3.* Verður ljóðupptøka av framførslu, sambært § 45, stk. 1, nr. 1, útgivin ella almannakunngjørd innan fyri stk. 1 nevnda tíðarskeið, verður gildistíðin fyri verju 70 ár frá tí ári, tá ið verkið fyrstu ferð var útgivið ella almannakunngjørt. Gildistíðin verður roknað frá tí ári, tá ið framførslan fyrstu ferð varð antin útgivin ella almannakunngjørd.

*Ljóðupptøka*

**§ 67.** Ljóðupptøka sambært § 46 kann ikki uttan samtykki frá framleiðaranum eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum, fyrr enn 50 ár eru liðin frá upptøkuárinum.
*Stk. 2.* Verður ljóðupptøka útgivin innan fyri stk. 1 nevnda tíðarskeið, verður gildistíðin fyri verju 70 ár frá tí ári, tá ið verkið fyrstu ferð varð útgivið.
*Stk. 3.* Verður ljóðupptøka ikki útgivin, men einans almannakunngjørd innan fyri stk. 1 nevnda tíðarskeið, verður gildistíðin fyri verju 70 ár frá tí ári, tá ið ljóðupptøkan fyrstu ferð varð almannakunngjørd.

*Myndatøka*

**§ 68.** Myndatøka sambært § 47 kann ikki uttan samtykki frá framleiðaranum eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum, fyrr enn 50 ár eru liðin frá upptøkuárinum.
*Stk. 2.* Verður myndatøka útgivin ella almannakunngjørd innan fyri stk. 1 nevnda tíðarskeið, verður gildistíðin fyri verju 50 ár frá tí ári, tá ið verkið fyrstu ferð varð antin útgivið ella almannakunngjørt.

*Kringvarpssendingar*

**§ 69.** Er kringvarpssending avmyndað ella tikin upp, sum ásett í § 31, stk. 3, kann hon ikki uttan samtykki frá kringvarpsstøð ella framleiðara eftirgerast ella gerast tøk fyri almenninginum, fyrr enn 50 ár eru liðin frá árinum, tá ið sendingin varð send.

*Fotomyndir*

**§ 70.** Rætturin til eina fotomynd stendur við í 50 ár frá ársskiftinum eftir, at myndin varð framleidd.

*Vørulisti, dátugrunnur o.a.*

**§ 71.** Verja av framleiðslu av vørulista, dátugrunni v.m. stendur við í 15 ár frá ársskiftinum eftir, at framleiðslan fór fram. Verður framleiðslan gjørd tøk fyri

almenninginum í ásetta tíðarskeiðnum, stendur verjan tó við í 15 ár frá árskiftinum, tá ið framleiðslan fyrstu ferð varð gjørd tøk fyri almenninginum.

*Rættindi, tá gildistíðin er liðin*

**§ 72.** Hóast gildistíðin fyri upphavsrættin er endað, kann eitt bókmentaligt ella listaligt verk ikki verða broytt ella almannakunngjørt í ósamsvari við § 3, stk. 1 og 2, um tað hevur við sær brot á mentanarlig áhugamál.

**§ 73.** Tá ið eitt verk ikki hevur verið givið út áður, og upphavsrættarverjan er endað, hevur tann, ið fyri fyrstu ferð á lógligan hátt almannakunnger ella gevur verkið út, somu peningaligu rættindi til verkið, sum var tann upphavsmaður. Verjan varir í 25 ár, roknað frá árinum eftir, at verkið varð almannakunngjørt ella givið út.

## Kapittul 9
## Rættarverja

*Revsiásetingar*

**§ 74.** Við sekt verður tann revsaður, sum tilætlað ella av grovum ósketni fremur brot á § 1, stk. 3 og 4, § 3, §§ 45-49, § 62 ella §§ 50-52 og § 72.
*Stk. 2.* Er brot á tær greinir, sum nevndar eru í stk. 1, gjørt við vilja og fyriliggja herðandi umstøður orsakað av, at verk ella eintøk av verkum hava verið endurgivin ella spjadd alment, kann revsingin hækka til fongsul í 1 ár og 6 mánaðir uttan so, at talan er um brot á áseting í revsilógini, sum gevur hægri revsing. Herðandi umstøður eru, um brotið verður framt í vinnuligum høpi, um týðandi nøgd av eintøkum verður framleidd ella spjadd alment, ella um verk verða endurgivin á slíkan hátt, at almenningurin fær atgongd til tey á einum sjálvvaldum staði og til ásetta tíð, sbr. § 2, stk. 3, nr. 1.
*Stk. 3.* Í kunngerðum, gjørdar við heimild í § 40, stk. 4, § 41, stk. 4 og § 42, stk. 3, kann vera ásett revsing við sekt fyri brot á reglur í hesum kunngerðum.

**§ 75.** Við sekt verður tann revsaður, sum tilætlað ella av grovum ósketni letur vera við at lata upplýsingar til felagsskap, sum virkar við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. § 40.

**§ 76.** Tá ið eintøk av verkum ella framleiðslu, sum eru vard sambært hesi lóg ella í kunngerð við heimild í lógini, verða framleidd uttanlands, og ein samsvarandi framleiðsla í Føroyum hevði verið brot á lóggávuna, verður tann revsaður við sekt, sum tilætlað ella av grovum ósketni innflytur slík eintøk til tess at gera tey tøk fyri almenninginum.
*Stk. 2.* Ásetingin í § 74, stk. 2 er samsvarandi galdandi fyri tilætlað brot á stk. 1.

**§ 77.** Við sekt verður tann revsaður, sum tilætlað ella av grovum ósketni fremur brot á §§ 53 ella 54. Við sekt verður tann revsaður, sum tilætlað fremur brot á § 56.

**§ 78.** Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

*Átala*

**§ 79.** Brot, sum eru fevnd av § 74, stk. 1 og §§ 75 og 76, stk. 1, verða átalað av tí, sum hevur verið fyri órætti.
*Stk. 2.* Er upphavsmaður ikki longur á lívi, kunnu brot á § 3 og ávísing, sum er givin samsvarandi § 63, stk. 2, átalast av eftirsitandi hjúnafelaga, skyldfólki í beinari stígandi ella fallandi ættlegg ella systkjum.
*Stk. 3.* Er upphavsmaður ikki longur á lívi, kunnu brot á §§ 3 og 51-52 eisini átalast av tí almenna. Tað almenna kann tó einans átala brot á § 3, tá ið talan er um brot, sum ger seg inn á mentanarlig áhugamál.
*Stk. 4.* Uttan mun til ásetingina í stk. 1 verða brot á § 72 átalað av tí almenna.
*Stk. 5.* Í kunngerðum, gjørdar við heimild í lógini, kann vera ásettur átalurættur fyri brot á reglur í hesum kunngerðum.

**§ 80.** Brot, sum er fevnt av §§ 74, stk. 2 og 76, stk. 2, verður átalað eftir áheitan frá tí, sum hevur verið fyri órætti, uttan so at almenn áhugamál krevja átalu.

*Endurgjald og samsýning*

**§ 81.** Tann, sum við vilja ella av ósketni fremur brot á áseting, sum er nevnd í §§ 74-76 ella í kunngerð, sum vísir til nevndu ásetingar, skal rinda:
1) eitt rímiligt viðurlag fyri nýtsluna til tann, sum hevur verið fyri órætti, og
2) eitt endurgjald til tann, sum hevur verið fyri órætti, fyri tann skaða, sum brotið hevur elvt til.

*Stk. 2.* Tá ið endurgjald verður ásett sambært stk. 1, nr. 2, verður atlit m.a. tikið at vantandi vinningi hjá tí, sum hevur verið fyri órætti, og órættliga vinningin hjá tí, sum hevur framt brotið.

*Stk. 3.* Í máli, sum kemur undir stk. 1, kann eisini verða ásett endurgjald til tann, sum hevur verið fyri órætti, fyri ikki-fíggjarligan skaða.

*Fyribeining o.a.*

**§ 82.** Við rættarúrskurði kann verða gjørt av, at eintøk, sum eru brot á rættin til verk ella framleiðslu, sum eru vard sambært hesi lóg ella vard í kunngerð, gjørd við heimild í lógini, skulu verða:
1) tikin aftur frá sølustøðum,
2) endaliga beind burtur frá sølustøðum,
3) fyribeind, ella
4) latin tí, sum hevur verið fyri órætti.

*Stk. 2.* Stk. 1 er eisini galdandi fyri tilfar, amboð ella líknandi, sum í fyrsta lagi hava verið nýtt til ólógliga framleiðslu ella nýtslu av eintøkum av verkinum.

*Stk. 3.* Tiltak sambært stk. 1 verður framt uttan samsýning til tann, sum hevur framt brotið, og hevur ikki ávirkan á eitt møguligt endurgjald til tann, sum hevur verið fyri órætti. Tann, sum hevur framt brotið, ber kostnaðin av tiltaki sambært stk. 1 uttan so, at serligar orsøkir tala ímóti.

*Stk. 4.* Í rættarúrskurði um tiltak sambært stk. 1 skal rætturin hava fyrilit fyri, at tað skal vera lutfall millum vavið av brotinum og boðini um rættartiltak, umframt áhugamálini hjá triðjamanni.

**§ 83.** Í dómi, har dømt verður sambært §§ 81 og 82, kann rætturin eftir áheitan gera av, at úrskurðurin skal almannakunngerast heilt ella partvís.

*Stk. 2.* Skyldan at almannakunngera áliggur tí, sum hevur framt brotið. Tann, sum hevur framt brotið, ber kostnaðin, og almannakunngerðin skal verða so eyðsýnd, sum til ber.

## Kapittul 10
## Gildisøki

**§ 84.** Lógin er galdandi á føroyskum land- og sjóøki.

*Stk. 2.* Ásetingarnar um upphavsrætt eru galdandi fyri persónar, sum:
1) eru búsitandi ella heimahoyrandi í Føroyum,
2) hava danskan ríkisborgararætt, ella
3) tá ið skyldan er ásett í millumtjóða sáttmála.

*Stk. 3.* Ásetingarnar um onnur rættindi eru galdandi fyri:
1) framførslu, sum hevur verið í Føroyum ella er vard sambært lógini,
2) ljóð- og myndatøku, vøruskrá, dátugrunn o.a., sum er framleitt í Føroyum av persóni ella av føroyskt skrásettum felagi,
3) sending, sum er send úr Føroyum ella er framleidd av persóni ella av føroyskt skrásettum felagi.

*Stk. 4.* Í kunngerð verður ásett, hvussu gildisøki lógarinnar verður víðkað í mun til onnur lond sambært altjóða sáttmálum, sum londini sínámillum hava avtalað.

## Kapittul 11
## Gildiskoma og skiftisreglur

*Gildiskoma*

**§ 85.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.

*Skiftisreglur*

**§ 86.** Loyvi, sum er givið felagsskapi sambært § 40 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013, missir ikki sítt gildi við gildiskomuni av hesi lóg uttan so, at annað er fyrisett í loyvinum.
*Stk. 2.* Avtala, sum brúkari av vardum verkum hevur gjørt við felagsskap, sbr. § 42, og sum er í gildi, tá ið henda lóg verður sett í gildi, missir ikki sítt gildi við gildiskomuni av hesi lóg.
*Stk. 3.* Rættindi, ið eru íkomin, áðrenn henda lóg kemur í gildi, eru framvegis galdandi.
*Stk. 4.* Mál viðvíkjandi rættindum sambært stk. 3 verða at døma eftir reglum, ið vóru galdandi, tá ið nevndu rættindini íkomu.

*Broyting í revsilógini*

**§ 87.** Í lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: Straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013, verður í § 299 b, nr. 1 "§ 62, stk. 2" og "§ 64, stk. 2" broytt til: "§ 74, stk. 2" og "§ 76, stk. 2."

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

### Um málsøkið

Hetta er onnur lóg um upphavsrætt, eftir at upphavsrætturin kom á føroyskar hendur tann 1. januar 2010. Tann fyrsta lógin um upphavsrætt legði í stóran mun upp til, at týðandi ásetingar um eitt nú lánireglarnar í kap. 2 vórðu skipaðar í kunngerð. Mentamálaráðið er eftirfylgjandi komið til ta niðurstøðu, at fleiri av ásetingunum í kunngerðaruppskotinum um vard verk vóru orðaðar sum lógartekstur, og ivi var harafturat um heimildargrundarlagið í lógini. Orsøkin til løgfrøðiliga ivan var, at talan var um avgerandi broytingar, ið eitt nú broyta rættarstøðuna á fleiri økjum. Í slíkum førum er tað meginreglan í galdandi rundskrivi frá Innlendismálaráðnum um uppsetan av broytingum í løgtingslógum á bls. 1, at slíkt verður gjørt við nýggjari lóg heldur enn í broytingarlóg. Tó varðveitir nýggja lógin í størstan mun ásetingarnar í lógini frá 2013. Nýggja lógin víðkar ta eldru lógina við fleiri lógargreinum, tí talan er um ásetingar um sokallaðu lánireglurnar í kunngerðaruppskotinum um vard verk, sum í stóran mun við hesi lóg eru innlimaðar í lógina. Hetta verður eisini mett at samsvara betur við Bern-sáttmálan. Í serligu viðmerkingunum til hesa lógina eru harumframt viðmerkingarnar til lógina frá 2013 endurgivnar, tí at hesar hava ein stóran týdning fyri tulkingina av lógini. Stórur partur av vanligu viðmerkingunum eru eisini tiknar við í hesa lógina.

Um upphavsrættin er eitt nú at siga, at upphavsrættur er gamal rættur, sum er partur av hugverksrættinum, ið snýr seg um rættarverju av bókmentum og list, vísindi og tøkni, ídnaðarformgávu, sniðskapan, vørumerkjum og øðrum líknandi viðurskiftum. Lógirnar á hesum økjum verða nevndar lógir um einkarætt, og er lógin um upphavsrætt ein teirra, har lógarásetta

verjan hjá teimum, sum skapa bókmentir og list, og teimum, sum eru útinnandi listafólk, er ásett. Upphavsrætturin hevur ikki nøkur formkrøv og byrjar, tá ið eitt verk verður skapað, uttan nakra skráseting av verkinum. Tí skilur upphavsrætturin seg frá øðrum hugverksrætti, har t.d. patent verður skrásett.

Málsøkið er í nógvum londum staðsett saman við mentamálum, tó at talan í stóran mun er um vinnurætt. Málsøkið er staðsett saman við mentamálum, tí at listafólkini meta tað best hóskandi at røkja síni áhugamál í Mentamálaráðnum. Eisini liggur eitt greitt signalvirði í, at málsøkið liggur í Mentamálaráðnum. Talan er í fyrsta lagi um at áseta karmarnar fyri mentanarvirkseminum, og í øðrum lagi at áseta fíggjarkarmarnar á mentanarøkinum.

Upphavsrættur skal tó ikki viðgerast ella metast um á sama hátt sum mentamál annars ella sum stuðul til mentan. Tá ið talan er um stuðul á mentanarøkinum, verður støðið tikið í at kveikja og geva møguleika at skapa ella fara í holt við eina verkætlan. Tað kann vera ein møguleiki at royna eitthvørt, sum ikki er roynt áður. Stuðulin ger kanska tað ómøguliga møguligt, men tá ið tað er vorðið møguligt og er avrikað, tá kemur upphavsrætturin inn í myndina. Tá kann tað skapaða verkið verða brúkt í breiðari merking, og upphavsmaðurin fær viðurlag fyri nýtsluna. Tey gjøld, sum verða umrødd í hesi lóg, eru sostatt at meta sum inntøka hjá upphavsmanninum og løn fyri avrikað arbeiði.

Spurt kundi verið, hvønn týdning og hvørja ávirkan lógin um upphavsrætt hevur á virðisøkingina í samfelagnum. Hetta er ikki serliga væl kannað, hvørki í Føroyum ella í okkara grannalondum, menmetingar vísa, at tað, sum upphavsrættarligar vinnur geva av sær í virðisøking, svarar til uml. 2,5% av BTÚ. Í Noregi verður hetta mett at liggja um 3%, og hetta er væl meiri enn høvuðsvinnuvegirnir (landbúnaður, skógrøkt og fiskivinna), ið tilsamans hava 2,2%, og nógv meiri enn matvøruídnaðurin, ið liggur á 1,6%. Hyggja vit eftir, hvat bókaídnaðurin einsamallur kastar av sær í Noregi, svarar hetta til 1,6% av BTÚ, ella í krónum uml. 19,6 mia. krónur. Hetta talið økist frá ári til árs, m.a. orsakað av teirri tøkniligu menningini á økinum.

**Millumtjóða sáttmálar**
Upphavsrættur tekur støði í Bern-sáttmálanum frá 1886, “Convention de Berne pour la protection des oeuvres littéraires et artistiques”, við seinni broytingum (Paris 1971). Einki fyrivarni er tikið fyri Føroyar, hvørki í upprunasáttmálanum ella í seinni broytingum av Bern-áttmálanum, sum tí er fólkarættarliga bindandi fyri Føroyar.

Stórur partur av londunum í heiminum hava tikið undir við Bern-sáttmálanum. Tey eru limalond í sonevndu Bern-Uniónini og mynda ein felagsskap, WIPO (World Intellectual Property Organization), ið hevur høvuðssæti í Genève. Føroyar verða ikki sjálvstøðugt limaland í felagsskapinum, men atlimaskapur kann møguliga koma á tal.

Bern-sáttmálin er ein altjóða sáttmáli viðvíkjandi vernd av bókmentaligum og listaligum verkum. Sáttmálin varð á fyrsta sinni undirskrivaður 9. september 1886, og upprunaligu meginreglurnar eru framvegis í gildi. Innihaldið í Bern-sáttmálanum er endurskoðað nakrar ferðir. Tað hevur havt lógarbroytingar við sær, og eisini hava alsamt fleiri lond tikið undir við sáttmálanum og hava skipað síni upphavsrættarviðurskifti í samsvari við tað, sum verður álagt londunum.
Eisini eru aðrir sáttmálar, nevndir WIPO-sáttmálar, sum víðka rættin til verju sambært lóggávu til eisini at fevna um útinnandi listafólk, t.e. tey sum spæla á ljóðføri ella á annan hátt eru við til

at framføra eitt verk. Hesi fáa við lógini tryggjað rættindi til upphavsrættarviðurlag á líknandi hátt sum upphavsmenn at hugverkum. Talan er um WIPO Copyright Treaty og WIPO Performance and Phonograms Treaty. Eisini hava fleiri ES-direktiv innihald, sum er viðkomandi fyri upphavsrættin, og sum er tikið við í hesa lóg.

**Munurin á galdandi skipan og hesari lóg**
Løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 hevur verið galdandi, og tann lógin legði fyri ein stóran part upp til, at upphavsrætturin varð skipaður við kunngerð. Mentamálaráðið hevur hugsað hesa støðutakan av nýggjum, tí stóra kunngerðin um vard verk innihelt í stóran mun lóggávutekst, eitt nú týdningarmiklar ásetingar um rættindi, skyldur, gjald, avrokningartreytir, seming o.a. Við atliti at rættartrygdini egnar hesin tekstur seg betur at verða skipaður í lóg, meðan nágreiningar og neyvari reglur innan lógarinnar karmar kunnu ásetast í kunngerð, eitt nú reglur fyri semingsmann. Eisini er summar smærri umorðingar gjørdar, og einkultar nýggjar ásetingar eru komnar eitt nú §§ 32a, 35, stk. 4-7 og § 46a.

Av tí at serligu viðmerkingarnar til lógina frá 2013 vóru góðar og umfatandi, eru tær endurgivnar í hesa lógina. Fleiri av ásetingunum eru av lógartøkniligum grundum settar aðrastaðni í aðrar lógargreinar, og tilvísingarnar eru eisini tillagaðar. Innihaldsliga er sum so eingin munur á rættarstøðuni annað enn, at sokallaðu lánireglarnar í kapittul 2 og høvuðstreytirnar fyri upphavsrættarfelagsskapir eru tiknar við í lógina. Annars er stórt sæð talan um tað sama.

**Um upphavsrættin**
Rætturin er bygdur upp á tann hátt, at ein ávísur persónur, t.d. tann, ið skapar eitt bókmentaverk, fær ein nærri lýstan einkarætt til verkið. Bern-sáttmálin er bygdur upp soleiðis, at støði verður tikið í landøkisgrundregluni, sum merkir, at lógin er galdandi í hesum landinum og bara her. Í Bern-sáttmálanum verða ásett nøkur minstukrøv, sum lóggávan í landinum skal lúka. Bern-sáttmálin tryggjar eitt minstamark av rættindum, sum limalondini átaka sær at tryggja í teirra egna heimliga lógarverki, so at rithøvundar og listafólk altíð hava eitt minstamark av tryggjaðum rættindum. Sáttmálin skal eisini tryggja, at rithøvundar og listafólk, sum eru borgarar í einum landi, sum hevur tikið undir við Bern-sáttmálanum, eisini eiga tryggjað rættindi í einum øðrum landi, sum er fevnt av Bern-sáttmálanum, og tað er líkamikið, um verkið er vart í heimlandinum ella ikki.

Lógin inniheldur tær ásetingar, sum hava við sær, at minstukrøvini í Bern-sáttmálanum verða hildin. Upphavsrættarlógir verða mangan yvirháláðar av nútíðini, serliga tá ið tað snýr seg um tøkniliga menning, tí hevur verið hildið best hóskandi til føroysk viðurskifti at áseta nøkur viðkomandi viðurskifti í kunngerð. Tó er Mentamálaráðið, sum víst á omanfyri, komið til ta niðurstøðu eftir drúgva umhugsan, at eitt so víðfevndandi kunngerðaruppskot, sum uppskotið um vard verk í stóran mun var, eigur at verða skipað í lóg. Umframt at nýggja lógin hevur sett fleiri av ásetingunum í kunngerðini um vard verk í lógartekstin, inniheldur nýggja lógin greiðari ásetingar fyri tað, ið fyrisitingarliga kann skipast í kunngerð.

*Fyrsti kapittul* í hesi lóg avmarkar upphavsrættarøkið til, hvørji sløg av verkum talan er um, og nær talan er um upphavsmann til eitt verk. Harumframt er ásett, nær talan er um framleiðslu av eintøkum av verkinum, og nær verk kemur undir lógina, tá ið verkið er almannakunngjørt. Nøkur sløg av verkum verða einans gjørd í fáum eintøkum, meðan onnur, t.d. bøkur og tónleikafløgur,

verða framleidd í stórum mongdum. Í hesum sambandi verður eisini ásett, nær talan er um týðing og tillaging av einum verki, og um ritsavn og felagsverk.

Eitt tað mest týðandi hugtakið í upphavsrættinum er ‘droit moral-reglan’. Henda regla snýr seg um, at er upphavsmaður kendur, skal navnið á viðkomandi verða upplýst, tá verkið verður nýtt. Tí verður álagt øllum, sum á einhvønn hátt brúka vard verk, at upplýsa navnið, har tað hóskar seg, bæði á eintøkum og tá verkið verður almannakunngjørt. § 3 ásetir umframt hesa skyldu eisini bann fyri, at eitt verk verður broytt ella kunngjørt á slíkan hátt ella í slíkum samanhangi, sum ger, at heiður ella serkenni upphavsmansins verða skerd. Tað kann hvørki við avtalu ella á annan hátt víkjast frá hesum rætti, sum upphavsmaðurin hevur. Hevur ein persónur skapað eitt verk, er hann ella hon upphavsmaður til tað verkið. Er navnið á upphavsmanni ikki kent, skal meting gerast, og er verkið útgivið undir dulnevni ella øðrum frámerki, eru tað hesi frámerki, sum skulu upplýsast til tess at uppfylla moralsku skylduna í § 3.

Orsakað av at upphavsrættarliga vard verk í dag eru nógv meiri útsett fyri at verða misnýtt, enn tey hava verið, hevur lógarverkið um upphavsrætt eisini fingið nógv størri týdning. Tøkniliga menningin, sum t.d. hevur havt við sær stórnýtslu av ljósprentmaskinum, brúk av kaðalsjónvarpi, fylgisveinaútvarpi og fylgisveinasjónvarpi, útbreiðslu av sjónbandaskráum og telduútbúnaði, hevur tey seinastu árini gjørt, at nógvar broytingar eru gjørdar í upphavsrættarreglunum í londunum kring okkum.

Í lógini verða ikki sett tey stóru krøvini til, nær nakað kann kallast eitt verk. Tað er í veruleikanum nóg mikið, at verkið er sjálvstøðugt, og at upphavsmaðurin hevur sett sín egna dám á verkið. Sambært lógini verður munur tí stórt sæð ikki gjørdur á einum lesarabrævi í bløðunum, einari setursritgerð ella á einari stórari skaldsøgu sum *Frænir eitur ormurin*. Í øllum hesum førum er talan um verk, sum hava rætt til somu vernd. Vit siga, at hesi verkini eru vard, tí tey lúka meginregluna um originalitet ella verkshædd, ið sambært einari útbreiddari allýsing merkir, at verkið skal vera eitt persónligt og skapandi avrik, sum er úrslit av kreativiteti í ein ávísan mun, uttan at nøkur treyt verður sett til góðskuna.

Upphavsrætturin verjir, hvussu verkið er sett upp, ikki hugskotini ella ta vitanina, sum verkið byggir á, men hvussu hesi hugskotini og henda vitanin verða borin fram (manifestatión). Talvur, skráir o.a., sum er ein uppreksan av tí, sum vit frammanundan vita, verða ikki vard sum verk, tí tey ofta ikki lúka kravið um originalitet.

Tann, sum hevur skapað verkið, verður nevndur upphavsmaður. Vanliga er upphavsmaður ein fysiskur persónur. Men alt eftir hvat siðvenja er í ávísum vinnugreinum, kann talan vera um, at upphavsrætturin kann verða avhendaður til t.d. eina fyritøku. Tílík viðurskifti skulu vera greið fyri arbeiðstakaran og skulu tí helst vera viðgjørd í starvssetanarsáttmálanum ella í serstakari avtalu millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara. Í ávísum førum - serliga innan KT (sí § 49) – verður upphavsrætturin undir ávísum umstøðum til verk arbeiðsgevarans, um ikki annað er avtalað í starvssetanarsáttmálanum. Hetta er tí, at tað hevði verið nærum ógjørligt at rikið KT-fyritøku, um rættindini til tey forrit, sum verða framleidd í arbeiðstíðini eftir fyriskipan og leiðbeining hjá arbeiðsgevaranum, høvdu fallið til arbeiðstakararnar. Sama ger seg helst eisini galdandi í t.d. lýsingarvinnuni, har búmerki og annað lýsingartilfar verður skapað í arbeiðstíðini fyri arbeiðsgevaran. Hetta eru atlit, sum arbeiðsgevari og arbeiðstakari eiga at taka støðu til, tá tey gera starvssetanarsáttmálar, og tá tey hava lønarsamráðingar.

Nýtslurættur hjá arbeiðsgevara kann eisini vera viðgjørdur í sáttmála millum yrkisfeløg og arbeiðsgevarar. Hóast best er, um hesi viðurskifti verða viðgjørd ítøkiliga, er sum so eisini gjørligt, at arbeiðstakarin tigandi játtar arbeiðsgevaranum nýtslurætt til skapaða verkið. Tað kundi til dømis verið, um arbeiðstakarin í longri tíð og uttan áhaldandi at mótmæla nýtsluni visti, at arbeiðsgevarin brúkti verkið.

Í sambandi við lógarfyrireikandi arbeiði í Norðurlondum hevur málið um rættin hjá arbeiðsgevara til verk, skapað í føstum starvi, verið frammi fleiri ferðir. Enn hevur ikki verið meiriluti fyri at gera reglur, sum í síni heild geva arbeiðsgevarum upphavsrætt til verk, skapað í føstum starvi. At slíkar reglur ikki eru settar í gildi, er grundað á, at tað er avtalufrælsi á økinum. Hetta hevur eisini við sær, at órímiligar avtalur kunnu verða ógildaðar eftir § 36 í avtalulógini. Einastu ítøkiligu undantøkini til avtalufrælsið í upphavsrættinum eru §§ 3 og 38 um ávikavist rættin hjá upphavsmanni at verða nevndur sum upphavsmaður og fylgirættargjald.

Tað hendir ofta, at eitt verk er samansett av fleiri ymiskum, sjálvstøðugum pørtum. Eitt nú kunnu í eini lesibók til barnaskúlan vera tekstir av øllum møguligum slagi: myndir, tekningar, sangir, nótar o.s.fr. Tey, sum hava latið tilfarið, hava hvør í sínum lagi givið loyvi, og tey hava hvør sær upphavsrættin til tað tilfar,
tey hava latið. Um verndartíðin er farin, er ikki neyðugt við loyvi. Eisini tann, sum hevur sett hesi brotini saman til eina nýggja heild, t.d. til eitt savnverk hevur upphavsrætt til savnverkið, hóast hesin rætturin er treytaður av loyvi frá teimum, hvørs verk vera savnað. Í lógini verður hetta verkið umrøtt sum eitt savnverk. Í lógini er eisini eitt hugtak, sum kallast felagsverk. Felagsverk er skapað av tveimum ella fleiri, soleiðis at ikki ber til at skilja ímillum, hvør eigur hvat. Tey, sum eiga tilfarið, hava tá upphavsrættin í felag.

Tá ið eitt handrit er liðugt skrivað, og verkið er klárt, er tað eina og aleina ogn upphavsmansins. Tað er bara hesin, ið ger av, hvat síðan skal henda við verkinum. Hann kann leggja tað í skuffuna, og hann kann gera nøkur eintøk av tí at selja til almenningin. Upphavsrætturin liggur júst í hesum, at tað er upphavsmaðurin, ið ger av, hvussu verkið skal brúkast. Hann hevur einkarætt til at gera eintøk av verkinum og at gera verkið tøkt fyri almenninginum. Eitt nú kann tann, ið hevur skrivað eitt handrit velja at fara til ein útgevara, sum átekur sær at geva verkið út – undir nærri avtalaðum treytum.

Upphavsrætturin er ikki ævigur. Verkið er vart av upphavsrættinum, so leingi upphavsmaðurin er á lívi og til 70 ár eftir deyðaár hansara. Er talan um eitt felagsverk, verður verkið vart í 70 ár eftir tað árið, tá ið tann seinasti av upphavsmonnunum doyði. Kapittul 8 um gildistíð er ein dagføring, soleiðis at Føroyar nú fylgja gildistíðini fyri verju, sum ásett er í ES-londunum.

Upphavsmaður hevur ikki treytaleysan einkarætt yvir verkinum. Tá ið verkið er almannakunngjørt, hevur upphavsmaðurin ongan rætt til ikki at loyva, at verkið verður brúkt í ávísum samanhangi. Tað er t.d. loyvt at sitera úr verkinum uttan at biðja um loyvi til hetta fyrst, og uttan at gjaldast skal fyri hetta, eins og rithøvundurin ikki kann nokta fríum orðaskifti um verkið.

Lógin gevur rætt at gera eintøk av útkomnum verkum at nýta til egið brúk. Tað er t.d. loyvt at ljósrita ein sang at brúka í privatari veitslu í familjuni ella millum vinir, somuleiðis er loyvt at

ljósrita eina blaðgrein ella brot úr eini bók til egið brúk. Nýtsla av hesum slagi nýtist hvørki loyvi frá upphavsmanni, ella at gjald verður goldið fyri ljóstøku av tilfarinum.

Talgilding hevur givið upphavsmonnum stórar avbjóðingar, bæði rithøvundum, týðarum og útgevarum. Møguleikarnir fyri at misnýta skipanir eru stórir, m.a. tí at tað í dag er so lætt at gera verkið atgeingiligt við at leggja tað út á alnetið. Samstundis hevur tann nýggja tøknin ruddað slóð fyri, at verkið verður spjatt og tess meira brúkt.

*Annar kapittul* í lógini snýr seg um avmarkingar í upphavsrættinum, tá ið treytin um lógliga útgávu er lokin. Upprunaliga var hildið skilagott at áseta fleiri av reglunum í kunngerð, tí at umsitingin av upphavsrætti í Føroyum er nýggj, og kunngerðarhátturin hóskar væl til føroysk viðurskifti, og arbeiðið við at menna upphavsrættarøkið í kunngerð kann gera tað møguligt at gera skjótar dagføringar í lógarverkinum, uttan at Løgtingið skal taka støðu í hvørjum einstøkum føri.

Hinvegin er Mentamálaráðið komið til ta niðurstøðu, at tað í einum rættarsamfelagi ikki ber til *de facto* at lóggeva í kunngerðarformi, tá ið avgerandi viðurskifti skulu skipast, sum eru av stórum týdningi fyri rættarstøðuna. Hetta stillar sera strong krøv til heimildina, og ivasamt var, um upprunaliga § 17 í lógini frá 2013 var ein nóg greið heimild til í smálutum at skipa sokallaðu lánireglurnar í kapittul 2 við serligum atliti at føroyskum viðurskiftum, sbr. meginregluna í UfR1991.352Ø og UfR1994.397Ø, har landsrætturin metti, at avmarkingar í upphavsrættarliga einkarættinum krevja greiða lógarheimild. Harumframt kann nevnast, at tað er ein skylda sambært Bern-sáttmálanum at lata vera við at áseta onnur undantøk enn tey, ið eitt nú Bern-sáttmálin heimilar, sbr. viðmerkingarnar til donsku lógina í bet. 1197/1990, bls. 123: *"Man finder dog, at der kan være grund til at bemærke, at indskrænkningerne i rettighederne er udformet i overensstemmelse med reglerne i de internationale konventioner, herunder navnlig Bernerkonventionen."*

Eintøk at nýta til egið brúk eru rímiliga neyvt ásett. Hetta er gjørt, tí at henda nýtslan er viðkomandi fyri so at siga øll. Hetta eru somuleiðis viðurskifti, sum nógv verður gjørt burturúr í upphavsrættarhøpi. Ásetingin er at meta sum avmarking, men gevur samstundis loyvi til rættiliga nógv. Tá man hevur ognað sær eitt eintak av einum verki, er loyvt at taka avrit og framleiða eintak til egið brúk, um einki fíggjarligt spyrst burturúr. Tað merkir samstundis, at bann er fyri at framleiða við vinningi fyri eyga. Eisini eru avmarkingar í mun til nýtslu av verkum, sum hava vinnuligt endamál. T.d. er ikki loyvt at byggja ein bygning eftir vardum arkitektatekningum ella at eftirgera telduforrit.

Reglurnar í kapittul 2 fevna um nýtslu av vardum verkum, eitt nú nýtslu í frálæruhøpi, á stovnum, virkjum, sjúkrahúsum, í søvnum landsins, og tá ið varda tilfarið verður broytt, soleiðis at sjón- og hoyriveik, kunnu gagnnýta tað. Lánireglurnar eru undantøk til einkarættin sambært § 2, sum eiga at tulkast avmarkandi. Lánireglurnar eru grundaðar á mentanarlig og samfelagslig fyrilit fyri fríum atgeingi til brúk av vardum verkum. Tær helst týdningarmiklastu reglurnar eru §§ 12, 19 og 22. Eitt annað grundsjónarmið er, at avmarkingar eiga ikki at gerast í einkarættin hjá upphavsmanninum, tá ið brúkið av ávísum vardum verki ikki er av heilt ótýðandi fíggjarligum týdningi, sbr. UfR1993.572H.

Sambært kapittul 2 er talan um trý sløg av ásetingum:

1) Frítt brúk, t.e. at brúkari kann uttan loyvi og uttan viðurlag brúka verk sambært viðkomandi áseting,
2) tvangsloyvi, t.e. at ásetingin gevur brúkara rætt at brúka verk sambært viðkomandi áseting, tó hevur upphavsmaðurin krav upp á viðurlag ella
3) avtaluloyvi, t.e. tá ið ein felagsskapur er góðkendur innan ávísa listagrein, at avtala kann gerast millum brúkara og avvarðandi felagsskap um lógarásett brúk av vardum verkum.

Ásetingarnar í kapittul 2 eru úttømandi, og fleiri avmarkingar í einkarættinnum hjá upphavsmanninnum krevja greiða lógarheimild, sbr. UfR1991.352Ø og UfR1994.397Ø.

*Triði kapittul* er um felags umsiting av upphavsrættargjøldum og seming. Tann fyrisiting, sum upphavsrættarfelagsskapirnir hava, er til stórt gagn fyri upphavsmenn til verk, sum verða brúkt dagliga. Felagsskapirnir gera avtalur, sum fevna um allar upphavsmenninar, og sum tryggja, at goldið verður fyri nýtsluna. Brúk av vardum verkum verður neyvt regulerað, umframt at avtalur helst skulu fyriliggja. Til tess at allir felagsskapir virka undir somu korum, eru høvuðstreytirnar til felagsskapirnar tiknar við í lógina, og tað verður heimilað landsstýrismanninum at seta nærri reglur um avtalur og treytir.

Í øllum samfeløgum er listin, so ella so, partur av gerandisdegnum, ella ein partur av tí dagliga samfelagnum. Fólkini, sum arbeiða við listini, kalla vit listafólk, tey hava vanliga ymiskar útbúgvingar og arbeiðsroyndir. Men felags fyri tey er, at tey hava upphavsrættindi til tað, tey gera og skapa. Nógvastaðni taka hesi fólkini seg saman í stór og smá feløg, sum m.a. hava sum endamál at verja rættindini hjá teirra limum, hjá listafólkunum.

Til tess at standa enn meira saman, er tað ikki óvanligt, at smáu listafeløgini sláa seg saman og skipa eitt felag, ið yvirskipað samskipar áhugamálini, og sum serliga kemur á vøllin, tá ið áhugamál limanna skulu lýsast fyri eitt nú tí almenna myndugleikanum, fyri stovnum o.ø., bæði innanlands og uttanlands.

Vit hava í Føroyum nógv ymisk feløg, hvørs endamál er at taka sær av áhugamálum hjá upphavsmonnum og rættindahavarum. Hesi feløg, sum verða nevnd seinni í tekstinum, hava verið virkin serliga tey seinastu 30-40 árini, tey hava ment seg í samljóði við ta menning, sum serliga er farin fram á listaøkinum seinnu helvt av seinastu øld. Man kann siga, at hesi áhugafeløg fyri umleið 30 árum síðan eru gingin saman í tveir yvirskipaðar felagsskapir, Listafólkasamband Føroya og Fjølrit, hvørs endamál m.a. er at virka fyri áhugamálum hjá rættindahavarum. Í hesi lóg er heimildin fyri semingsmannin eisini nágreinað, soleiðis at hesi viðurskiftini kunnu skipast nærri í kunngerð um seming, sum upprunaliga ætlað.

*Fjórði kapittul* er um onnur rættindi. Hesi rættindi eru ikki upphavsrættindi, men hesi sløgini av rættindum eru tó nær skyld. Onnur rættindi hava sín uppruna í verkum, sum eru vard av upphavsrættinum. Til dømis fáa útinnandi tónleikarar rættindi til eina upptøku av einum lagi, uttan tó at hava upphavsrætt til verkið. Hetta verður umsitið av felagsskapi, sum umboðar rættindahavarar til hesi ávísu øki. Sum nú er, umsitur Koda rættindini hjá og útgjald til lagasmiðir, meðan Gramex umsitur rættindini hjá og útgjald til útinnandi tónleikarar.
Tað sama ger seg galdandi hjá framleiðarum av ljóðupptøkum, myndatøkum og fotomyndum,

sum fáa rættindi til eina ávísa útgávu av einum verki, sum er vart av upphavsrætti. Dátugrunnar og tíðindaskriv eru eisini í virkisøkinum í hesum kapitli.

Umframt vernd sambært § 2 og reglunum í kapittul 4 um útinnandi listafólk, virka reglurnar í *fimta kapittli* afturat hesum. Talan er um verju av titli og undirskriftum á listaverkum. Brot á nevndu ásetingar eru ikki at meta sum upphavsrættarbrot, men fylgjurnar eru tær somu við revsing, endurgjaldi og samsýning. Harumframt skal nevnast, at serliga reglan um átalu eisini fevnir um brot á ásetingarnar í hesum kapittli.

*Sætti kapittul* ber heitið tøkniligur útbúnaður. Tøkniligur útbúnaður hevur tørv á serstakari regulering og verður ásettur í kapitli fyri seg. Tøknin gevur møguleikar og atgongd, sum í stóran mun krevja avmarking. Tí verður bæði ásett, hvussu farast kann og skal fram, umframt tær gerðir, sum eru bannaðar.

*Sjeyndi kapittul* ber heitið sundurbýti av upphavsrætti. Upphavsrættur kann verða latin øðrum, og hann kann fara í arv til tey, sum eftir sita. Upphavsrættur kann tó ikki koma undir innheinting hjá einum kravánara, hvørki rætturin hjá upphavsmanninum ella hjá teimum, sum hava fingið henda rætt við hjúnalagi ella sum arv.

*Áttandi kapittul* er um gildistíð. Vanliga gildistíðin fyri upphavsrætt er 70 ár eftir, at upphavsmaðurin doyði. Í hesi lógini eru ásettar gildistíðir í sambandi við avleidd rættindi, sum ætlanin upprunaliga var at áseta í kunngerð. Avleidd rættindini eru rættindini hjá teimum, sum hava verið við til at skapa, framleiða ella framføra verk, sum ikki beinleiðis koma undir lógina, men eiga at fáa upphavsrættarverju fyri verk teirra.

*Níggjundi kapittul* er um rættarverju. Í hesum kapitli verður á ymsan hátt heimilað upphavsmonnum aftursvar fyri brot á teirra rættindi. Hvørjir møguleikar eru, veldst um hvat ítøkiliga brotið fevnir um. Er talan um smærri brot, verður avleiðingin sum oftast bert sekt. Afturat sektini kann upphavsmaðurin í ávísum førum eisini krevja, at ólógligu eintøkini verða fyribeind. Í serliga grovum førum, kann tann, ið hevur gjørt seg inn á rættindi hjá upphavsmonnum, verða dømdur fongsulrevsing.

Upphavsmaðurin kann fáa endurgjald fyri tann skaða, brotið hevur elvt til. Eisini kann rættindahavari krevja rímiliga samsýning fyri ólógliga nýtslu.

Í fleiri ár hevur endurgjaldsásetingin í Danmark verið umsitin eftir tí sonevnda ‘double up’ meginregluni. Grundgevingin fyri dupulta endurgjaldinum hevur verið, at tað er so torført og kostnaðarmikið hjá rættindahavarum at kanna og rættarsøkja tey, sum fremja brot á upphavsrættin. Tó er Hægsti Rættur í Danmark farin burtur frá hesari meginreglu.

Reglurnar í rættargangslógini um fútabann kunnu eisini verða nýttar í sambandi við brot á upphavsrætt. Tey sakarmál, ið helst hava fingið mest umtalu í fjølmiðlum seinastu árini, har fútabann og upphavsrættur vóru høvuðsmál, eru málini ímóti The Pirate Bay. Í hesum sakarmálum bannaðu umboð hjá upphavsrættarmonnum Telenor og øðrum útbjóðarum av alnetsambandi at loyva viðskiftafólkum sínum atgongd til heimasíðuna hjá The Pirate Bay. Heimasíðan hjá The Pirate Bay var mett at vera millum teir størstu útbjóðararnar av ólógligum tilfari.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Í sonevndu TRIPS-avtaluni varð heimilað rættindahavarum at tryggja sær prógv fyri broti við fútans hjálp. Hesar reglur eru enn ikki settar í gildi í føroysku rættargangslógini. Mentamálaráðið hevur heitt á Løgmansskrivstovuna um at taka ásetingarnar um próvtrygging við í næstu dagføring av rættargangslógini. Harumframt varð eisini mælt til at endurskoða galdandi ásetingar um fútabann, so tær vera meira tíðarhóskandi.

*Tíggjundi kapittul* er um gildisøki. Við kunngerð verður lógarinnar landafrøðiliga gildisøki ásett. Ætlanin er at áseta, at lógin er galdandi fyri føroyskt landøki, havleið og loftrúm. Lógin fer helst eisini at fevna um t.d. øll skip, sum eru skrásett í Føroyum. Tað hevur við sær, at føroyskt skrásett skip skulu avrokna við upphavsrættarfelagsskapir, sum virka sambært hesari lóg, í tann mun teir t.d. spæla tónleik í felagsrúmum.

*Ellivti kapittul* er um gildiskomu og skiftisreglur. Einasta áseting í hesum kapitli, sum er øðrvísi enn vanligar skiftisreglur, er ásetingin um loyvi til upphavsrættarfelagsskapir. Her verður ásett, at tey loyvi til innkrevjing, sum eru givin við gomlu lógini, ikki missa gildi við nýggju lógini. Ætlanin hevur ikki verið at broyta hetta økið við lógini. Og tí hevði tað bert verið atvold til óneyðugt umsitingararbeiði, um felagsskapirnir aftur vóru noyddir at søkja loyvi, tá nýggja lógin kemur í gildi. Í skiftisreglunum stendur, at rættindini, ið eru uppstaðin, áðrenn henda lóg fær gildi, missa ikki sítt gildi, men málini eru fevnd av eldru lógini.

At enda her í almennu viðmerkingunum verður stutt greitt frá Listafólkasambandi Føroya og upphavsrættarfelagsskapinum Fjølriti, virksemi og søgu teirra.

**Listafólkasamband Føroya, LISA,** var stovnað í 1982 við hesum endamálum: At styrkja listina og listafólk í mentanarpolitiskum høpi, at virka fyri áhugamálum og rættindum limanna og at umboða limirnar í almennum málum, sum hava felags áhuga.

LISA hevur í dag 12 limafeløg við tilsamans umleið 2.000 limum og er skipað við umboðsráði og starvsnevnd.

Limafeløgini í LISA eru:

Arkitektafelag Føroya
Designarafelagið
Einleikarafelag Føroya
Felagið Føroysk Tónaskøld
Føroysk filmsfólk
Føroyskir Yrkisfotografar
Føroysk Myndlistafólk
Føroya Tónleikarafelag
Kórsamband Føroya
Leikarafelag Føroya
Myndlistasambandið
Rithøvundafelag Føroya

Ovasti myndugleikin í LISA er umboðsráðið, sum hvørt limafelag velur eitt umboð í. Umboðini

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

verða vald á aðalfundi í feløgunum. Dagligu fyrisitingina hevur starvsnevndin, sum verður vald á aðalfundi í umboðsráðnum. Í starvsnevndini sita 3 fólk, og teirra arbeiði er at skipa fyri dagliga virkseminum í LISA, hetta umfatar m.a. samskifti við limir og felagsskapir og at virka fyri samstarvi við myndugleikar og limafeløg.

Virkisøkið hjá LISA er enn sum fyrr: samstarv, rættindi og bøtt arbeiðskor. Hesi trý hugtøkini eru tær mest umráðandi ábendingarnar í einum almennum mentanarpolitikki. Felagsskapir og listagreinir skulu samstarva tvørtur um mørk, øll við áhuga og gávum eiga at kunna vera við, ein skúling av førleikanum eigur at vera, mentan og list eiga at vera óheft av stjórn og valdi, og, ikki minst, nýggjar royndir eiga at fáa rúmar ræsur, tí hetta er hjartablóðið í allari skapan.

Í álitinum ‘Avmarkaður marknaður”, sum landsstýrismaðurin í mentamálum hevði biðið um í 1995, verður skrivað soleiðis um LISA:

“Í Listafólkasambandinum verður hildið, at ein natúrligur partur av føroyskum mentanarpolitikki má vera at geva virknum mentafólki beinleiðis ábyrgd av tiltøkum hjá tí almenna. Í danska listagrunninum, Statens Kunstfond, t.d. eru tað bara listafólk, ið eru í nevndum og viðgera tær listaligu íløgurnar. Stjórnin velur nevndirnar, men síðan fáa tær allan avgerðarrætt, tó bara í 4 ár, tá skulu onnur fólk veljast. Í hesum liggur, at tey, sum sita, skulu taka støðu og velja burturúr, sum tey sjálv halda vera frægast. Hetta gevur tað heilt neyðuga kjakið um dygd, sum so illa fær verið, tá ið tað eru umboð fyri politiskar flokkar, ið skulu taka avgerðir.

Ein fylgja av stovnsetingini av LISA í 1982 var m.a. sáttmálin við landsstýrið um ljósrit í skúlunum, skipað fyrst gjøgnum Ljósritagrunnin, seinni gjøgnum upphavsrættindafelagsskapin Fjølrit. Í Listafólkasambandinum varð hildið, at ábyrgdin hjá tí almenna var í tveimum: At verja tað besta úr livandi mentan, og at tryggja møguleikar fyri nýroyndum og tí ókomna. Serliga hetta seinasta hevur LISA lagt dent á, og hevur gjørt vart við tann alstóra týdning, tað hevur hjá listafólki at fáa umstøður at arbeiða og gera verk liðugt [...].”

**Fjølrit** er felag fyri føroyskar rættindahavarar til listaverk og onnur hugverk. Limir í Fjølriti eru feløg, sum fyri limir sínar kunnu samráðast og gera sáttmálar um loyvi til at fjølrita verk hjá limunum. Fjølrit hevur tað endamál at virka fyri áhugamálum hjá rættindahavarum og ta uppgávu at umsita tann pening, sum kemur inn fyri nýtslu av vardum listaverkum og øðrum hugverkum í margfaldaðum líki. Fjølrit skal eisini samstarva við útlendsk rættindahavarafeløg um býti av gjøldum.

Í dag eru hesi upphavsrættindafeløg/forløg limir í Fjølriti:

Føroysk Bókaforløg
Føroyskir Yrkisfotografar
Felagið Føroysk Myndlistafólk
Føroysk Tónaskøld
Føroysk miðlafók
Rithøvundafelag Føroya

Fjølrit verður stýrt av umboðsráðnum og stjórnini. Í umboðsráðnum er ein limur fyri hvørt limafelag í Fjølriti. Umboðsráðið ger av, hvussu Fjølrit røkir uppgávur sínar, velur stjórnina og

hevur eftirlit við henni. Á aðalfundi verða formaður og næstformaður valdir í umboðsráðið. Fjølrit hevur, síðan tað var sett á stovn, virkað fyri, at lógin um upphavsrættindi verður framd í verki, at rættindahavarar í størri mun enn í dag fáa lógarásetta endurgjaldið fyri, at vardu verk teirra verða fjølritað og nýtt á annan hátt, sum kemur undir lógina um upphavsrætt. Fjølrit hevur sum eitt av sínum endamálum at forða fyri, at vard verk verða fjølritað og nýtt í aðramátar, uttan at gjald verður latið afturfyri.

Verndarsáttmálin millum Føroya landsstýri og Fjølrit frá 24.06.1992 var eitt stórt framstig tann rætta vegin. Sáttmálin fór tó úr gildi tann 31. desember 2013, og síðani varð gjørdur ein fyribils sáttmáli. Í løtuni verður arbeitt við at fáa ein nýggjan sáttmála í lag, síðani Fjølrit hevur fingið nýggja góðkenning sum felagsskapur sambært lógini frá 2013.

Fjølrit metir, at øll tann nýggja tøknin ger, at alneyðugt er, at Føroyar fáa sína egnu upphavsrættarlóg, og at hon verður dagførd javnt og samt. Tá ið nýggj lóg um upphavsrætt verður sett í gildi í Føroyum, fer hon at krevja nógv av føroyskum myndugleikum, og hon fer eisini at krevja nógv av felagsskapum sum Fjølrit og Listafólkasambandinum.

Hetta tykist Fjølrit eisini gera sær greitt, tí til síðst í ársfrágreiðingini fyri 2011 verður soleiðis sagt um framtíðina:

“Vit kunnu bara vóna, at tann nýggja lógin fer at stilla okkum næstan líka frítt sum í dag, tá útluting av gjøldunum umræður, men tað er mín fatan, at lógin ella kunngerð eftir lógini fer at seta sum treyt fyri endaligari góðkenning, at Fjølrit fyri ein (megin)part broytir sín avrokningarhátt, soleiðis at tey, sum verða avritað, í størri mun eisini fáa útgjald frá Fjølriti.

Tað fer at seta sera stór krøv til Fjølrit sum felagsskap, og neyðug umskipan fer at kosta nógv – bæði í uppstarti og í umsiting í framtíðini. Gerast má ein so einføld og bílig, men so ”rættvís” loysn sum gjørligt til at finna fram til tey, sum verða avritað, og at veita teimum rættvíst útgjald. Hetta hevur nevndin í Fjølriti umrøtt við systurfeløg síni í Norðurlondum, og vit hava fingið fleiri góð ráð, sum eru verd at fylgja.

Undir øllum umstøðum krevst samstarv og góðvilji frá skúlunum til at fáa til vega tað rætta faktiska ella statistiska grundarlagið til at býta ein meginpart av inntøkum Fjølritar til navngivnar persónar, hvørs verk eru avritað í skúlunum, ella til feløg teirra” (Fjølrit, Ársfrágreiðing 2011).

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Land og kommuna skulu vegna ávísar brúkarar t.e. stovnar, skúlar, søvn o.tíl. gjalda upphavsrættargjøld.

### 2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógin hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið og kommunur. Sannlíkt er harumframt, at ávíst meirarbeiði verður í Mentamálaráðnum, nú sjóneykan verður sett á málsøkið.

### 3. Fíggjarligar avleiðingar fyri vinnunna

Uppskotið hevur ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Men sum frá

líður, og upphavsrættarøkið verður betur skipað, kann hugsast, at fleiri inntøkur verða innan ávísar listagreinir.

**4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

7. **Avleiðingar orsakað av millumtjóða sáttmálum**
Uppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar vegna millumtjóða sáttmálar. Mentamálaráðið fer tó at taka stig til, at altjóða upphavsrættarsáttmálar, WIPO-sáttmálar, settir verða í gildi fyri Føroyar, og sum Føroyar við hesi lóg vilja lúka.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Hoyring**

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Í januar 2015 var undanhoyringarfundur í Mentamálaráðnum við luttøku av nøkrum av pørtunum.
Uppskotið hevur síðan verið í hoyring hjá viðkomandi pørtum.nøkur svar komu inn, og tilmælini blivu viðgjørd og innlimað í tann mun, tað hevur verið í samsvari við lógina og ætlanina við lógini. Í hesum lógaruppskoti er talan um at innlima stóran part av ásetingunum í kunngerðaruppskotinum um nýtslu av vardum verk í lógina sjálva, og tað broytir so eisini upp á talmerkingina av lógargreinunum í mun til galdandi lóg..

Upplýst verður, at hesi fingu upprunaliga lógaruppskotið til hoyringar tann 19. januar 2015 við svarfreist 9. februar 2015:

**Mentanarstovnar og -feløg**
Listafólkasamband Føroya
Felagið Føroysk Tónaskøld
Føroya Tónleikarafelag
Designarafelagið
Yrkisfotografar í Føroyum
Kórsamband Føroya
MenTón
Arkitektafelag Føroya
Føroysk Myndlistafólk
Myndlistasambandið
Einleikarafelag Føroya
Leikarafelagið
Tjóðpallur Føroya
Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Rithøvundafelagið
Sláið Ring
Føroya Heimavirkisfelag
Fjølrit
Norðurlandahúsið
Mentanargrunnur Landsins
Fróðskaparsetur Føroya
Søvn Landsins
Mentanarhúsið í Fuglafirði
Mentanarhúsið Løkshøll
Havnar Sjónleikarafelag
Ítróttasamband Føroya
Fólkakirkjan
Dómpróstur
Bergur Debes Joensen
Heimamissónsforlagið
Hin Føroyski Bíbliugrunnurin
Listasavn Føroya
Framleiðarafelagið
Copydan
KODA

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Gramex
Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum

**Forløg og líkn.**
Bókadeild Føroya Lærarafelags
Nám
Fróðskapur sp/f
Sprotin
Stiðin
Tutl

**Fjølmiðlar**
Blaðútgevarafelag Føroya
Kringvarp Føroya
Lindin
Rás 2
Televarpið
Iktus
10'arin
Føroysk Miðlafólk

**Onnur**
Fjarskifti
Vinnumálaráðið
Vinnuhúsið
Kulturministeriet
Inger Smærup Kristensen
Sunnuva Bæk
Innkomnar viðmerkingar:

LISA hevði einamest viðmerkingar til orðingar í lógini og samsvar við galdandi lóg í Danmark. Eisini skeyt felagsskapurin upp, at onkur grein skuldi umorðast.
Onkur hugtøk vórðu ikki nýtt heilt reglufast. Hetta var í ávísan mun tikið til eftirtektar.

Koda, Gramex og Copydan eru teir felagsskapir, sum føroysku listafólkini hava valt at umboða seg. Hesi hava síðan yvirtøkuna fingið loyvi frá Mentamálaráðnum at krevja inn upphavsrættargjøld í Føroyum.

Koda/Gramex hevði ávísar tøkniligar viðmerkingar og uppskot til nágreiningar soleiðis, at uppskotið eisini er í samsvar við nýggjari reglur í Danmark, ið eru innlimaðar sum fylgi av ymsum ES-reglum.

Fjølrit tekur undir við, at reglurnar um nýtslu av vardum verkum verða settar í lóg í staðin fyri í kunngerð, sum soleiðis sum galdandi upphavsrættarlóg fyriskrivar.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Fjølrit tekur undir við, at upphavsrættargjøld sum høvuðsregla skulu avroknast til avvarðandi upphavsrættarmann, men felagsskapurin saknar eina undantaksreglu, tá ið serliga kostnaðarmikið er at nágreina hvønn upphavsmann sær, tá talan er um umfatandi fjølriting av einum stórum tali av upphavsmonnum – her verður hugsað um brúksavtalur, har t.d. skúlar gera avtalu við góðkendan felagsskap um dagliga kopiering til undirvísingarbrúk. Slík kopiering umfatar bæði útlendskt og føroyskt tilfar.

Sambært Fjølrit kundi verið ásett, at hesar upphæddir fara í grunn, sum eftir umsókn skal veita stuðul til mentanarlig tiltøk, sum limir í limafeløgum Fjølritar ynskja at fremja.

Sum heild tóku øll undir við lógaruppskotinum frá 2015, og vórðu nakrar tillagingar gjørdar í sambandi við hoyringingina.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1 – Verk og upphavsmaður**
Ásetingarnar í §§ 1 og 2 eru óbroyttar, men av lógarttøkniligum ávum eru §§ 1 og 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 skrivaðar saman í somu lógargrein, har stk. 1 og 2 svarar til gomlu § 1 og stk. 3 og 4 svarar til gomlu § 2. Viðmerkingarnar til gomlu lógina eru tiknar við og eru at lesa niðanfyri:

*”Upphavsrættarverjan fevnir einans um bókmentaverk og listaverk. Verk, sum ikki kunnu roknast sum bókmentaverk ella listaverk, eru ikki fevnd av upphavsrættinum. Hetta merkir, at tøkniligar framleiðslur, sum t.d. maskinur og partar av maskinum, ikki eru vard við upphavsrætti. Hesi kunnu hinvegin verða skrásett við patenti e.l.*

*Hugtøkini bókmentaverk og listaverk í hesi lóg eru tó ikki mentanarpolitisk hugtøk, tey eru løgfrøðilig hugtøk, sum verkini verða mett út frá. Til dømis eru telduforrit fevnd av lógini, hóast hesi í vanligum høpi ikki eru at meta sum bókmentaverk ella listaverk.*

*Orsøkin til, at vard verk ikki verða skrásett, er, at tað verða ikki sett formlig krøv í mun til upphavsrættarverjuna. Tað er tí ikki ein treyt fyri, at eitt verk verður vart, at tað skal vera skrásett*
*ella hava sjónligt frámerki, t.d. ©. Hetta er bæði galdandi fyri føroysk og útlendsk verk. Eitt frámerki á verkinum er meira at meta sum ein ávaring og kunning um, at talan er um vart verk, og at upphavsmaðurin ger rættin galdandi.*

*Av tí at eingi formlig krøv eru, tekur upphavsrættarverjan við, tá ið verkið verður skapað. Verjan byrjar longu, áðrenn verkið er liðugt skapað. Tað merkir, at strikumyndir, útkast og annað verður*
*vart á sama hátt, sum liðugt skapað verk, uttan mun til um verkið er givið út ella eyðmerkt við undirritan.*

*Tað er ikki krav, at eitt verk skal vera í føstum formi. Munnlig verk verða vard sambært orðaljóðinum í § 1, stk. 1 um verk í røðu, uttan mun til hvussu ella í hvørjum sniði verkið verður almannakunngjørt. Røðan í hesum høpi kann vera samrøða ella ein ófyrireikað*

*tónleikaframførsla. Verjan fyri hesi sløg av verkum kann vera viðkomandi, um eintøk verða framleidd av verkinum uttan loyvi, t.d. ein endurgeving.*

*Eisini verk, sum ikki er lógligt, t.d. tí bann er í lóggávu móti at geva út ella at koma við útsøgnini, er vart av upphavsrættinum. Eitt verk, sum ger seg inn á eitt annað vart verk, t.d. listastuldur, kann verða vart upphavsrættarliga sum tillaging.*

*Eitt hugverk, sum í útgangsstøðinum er vart sambært hesi lóg, kann falla uttanfyri, t.d. um talan er um almenn skjøl, um hálvleiðaravøru (elektróniska flís), at tíðin fyri upphavsrættarverju er farin, ella at verkið hevur sín uppruna í landi, sum enn ikki hevur sett í gildi altjóða sáttmálar á økinum.*

*§ 1 reksar upp vard verk, men talan er ikki um fullfíggjaða uppreksan. Heldur er talan um dømi, har lógin skal kunna tulkast í mun til tey verk, sum í framtíðini kunnu hugsast at verða fevnd av lógini. Rættarúrskurðir og aðrar niðurstøður úr grannalondunum eiga at vera metingarstøði í mun
til innihaldið.*

*Fyri at eitt verk verður vart sambært hesi ásetingini, skal ávís verkhædd vera, sum er eitt minsta krav fyri, at tað skapaða kann roknast sum sjálvstøðugt verk.*

*Verkið skal vera úrslit av einum persónligum, skapandi avriki hjá upphavsmanni fyri at hava verkhædd. Tá mett verður, um eitt verk hevur verkhædd, verður dentur lagdur á, um talan er um eitt sjálvstøðugt, nýskapað verk. Metingin av verkhæddini er ymisk innan listagreinirnar.*

*Sum dømi um, hvørji verk verða vard, kann Bern-sáttmálin nýtast, her endurgivin á donskum máli:*

*Artikel 2*
*1) Udtrykket »litterære og kunstneriske værker« omfatter enhver frembringelse på det litterære, videnskabelige og kunstneriske område, uanset udtryksmåden eller udtryksformen, såsom bøger, brochurer og andre skrifter; forelæsninger, taler, prædikener og andre værker af samme art; dramatiske eller musikdramatiske værker; koreografiske værker og pantomimer; musikalske kompositioner med eller uden ord; kinematografiske værker, hvorved sidestilles værker, som er kommet til udtryk gennem en fremgangsmåde, der er analog med kinematografi; tegninger, malerier, arkitekturværker, billedhuggerværker, gravurer og litografier; fotografiske værker, hvormed sidestilles værker, der er kommet til udtryk gennem en fremgangsmåde, der er analog med fotografi; brugskunst, illustrationer, kort, planer, skitser og tredimensionale værker vedrørende geografi, topografi, arkitektur eller videnskab.*
*2) Det er dog forbeholdt unionslandenes lovgivning at bestemme, at værker i almindelighed eller bestemte kategorier af værker ikke skal nyde beskyttelse, medmindre de er blevet fikseret i en eller anden materiel form.*
*3) Oversættelser, bearbejdelser, musikarrangementer og andre omarbejdelser af et litterært eller kunstnerisk værk beskyttes som originalværker, uden at der dog herved gøres indskrænkning i den ret, der tilkommer originalværkets ophavsmand.*
*4) Det er forbeholdt unionslandenes lovgivning at bestemme, hvilken beskyttelse der skal tilstås officielle tekster på lovgivningens, administrationens og retsplejens område samt officielle*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*oversættelser af sådanne tekster.*
*5) Samlinger af litterære eller kunstneriske værker såsom encyklopædier og antologier, som på grund af udvalget eller arrangementet af deres indhold udgør intellektuelle frembringelser, beskyttes som sådanne, uden at der dog herved gøres indskrænkning i den ret, der tilkommer ophavsmændene til de værker, der indgår i sådanne samlinger.*
*6) De i denne artikel nævnte værker nyder beskyttelse i alle unionslandene. Denne beskyttelse gælder til fordel for ophavsmanden og dem, der indtræder i hans ret.*
*7) Med forbehold af bestemmelserne i denne konventions artikel 7 4) kan unionslandene i deres lovgivning bestemme, i hvilket omfang deres love skal anvendes på brugskunst og industrielle mønstre og modeller, såvel som de betingelser, under hvilke sådanne værker, mønstre og modeller skal nyde beskyttelse. Værker, som i hjemlandet udelukkende beskyttes som mønstre og modeller, har i et andet unionsland kun ret til den særlige beskyttelse, som i det pågældende land ydes mønstre og modeller. Dersom en sådan særlig beskyttelse ikke ydes i det pågældende land, skal sådanne værker dog beskyttes som kunstværker.*
*8) Beskyttelsen efter denne konvention finder ikke anvendelse på dagsnyheder eller blandede meddelelser, som har karakter af almindelige pressemeddelelser.*

*Bern-sáttmálin er ikki úttømandi, og tí verða onnur verk enn tey nevndu, eisini vard av upphavsrættinum.*

*Upphavsmaður er persónurin, ið hevur skapað verkið. Løgfrøðiligar eindir, sum til dømis stovnar, virki v.m. kunnu ikki vera upphavsmenn, soleiðis at skilja, at hesi ikki kunnu vera keldur til vard verk. Løgfrøðiligar eindir kunnu tó í starvssáttmálum treyta sær ein brúkrætt til verkið í tann mun, tað er vanligt og neyðugt í vanliga virkseminum í vinnugreinini. Talan kann til dømis vera um brúkrætt til búmerki innan lýsingavinnuna, forrit í telduvinnuni ella til jinglur í útvarpi. Sí eisini almennu viðmerkingarnar til kapittul 1 omanfyri.*

*Lógin um upphavsrætt snýr seg um verjuna av verkinum, men til ber eins væl at siga, at talan er um verju av upphavsmanninum. Tað var persónliga íkastið hjá upphavsmanninum, sum førdi til eitt verk, sum er orsøkin til upphavsrættin. Hetta sæst m.a. aftur, tá ið talan er um felagsverk, har íkastið hjá einum persóni kann hava so lítlan týdning fyri samlaða verkið, at tað ikki hevur við*
*sær upphavsrættarverju. Tað er ein treyt fyri verju sambært § 1, at verkið er skapað av einum menniskja.*

*Hugtakið upphavsmaður fevnir um tann persónin, sum hevur skapað verkið, men tað kann eisini nýtast í mun til tann, sum hevur fingið rættin til eitt verk við avtalu, arvi ella líknandi. Persónar, sum eru ómyndugir ella líknandi, eitt nú børn ella sinnissjúk, kunnu vera upphavsmenn.*

*Vanligt er, at navnið á upphavsmanninum stendur á verkinum. Er ivi um, hvør er upphavsmaður til eitt verk, verður málið avgjørt við vanligari próvdøming. Danmark førir ikki skrá yvir vard verk og upphavsmenn teirra, og tað verður heldur ikki gjørt í Føroyum. Nakrir av felagsskapunum hjá upphavsmonnunum føra skráir, men hesar skráir verða ikki roknaðar sum avgerandi prógv fyri, hvør er upphavsmaður. Til ber at fáa notarstemplað handrit, myndir og annað á Dómaraskrivstovuni.*

*Stk. 2. Einkarætturin merkir, at upphavsmaðurin hevur framíhjárætt til at gera eintøk av*

*frumverkinum og geva tey út. Hetta er galdandi fyri allar framleiðslur og útgávur av verkinum. Upphavsmaðurin skal sostatt geva loyvi til nýtslu av sínum verki.*

*Loyvið, sum upphavsmaðurin gevur, kann verða givið ítøkiligt ella generelt. Eitt ítøkiligt loyvi verður givið til t.d. at framleiða ávíst tal av verkinum. Eitt generelt loyvi verður givið, tá ið t.d. verkið verður avhendað við rættindum til almenna framførslu.*

*Brúk av vardum verki í ósamsvari við § 2 kann tó vera í lag, og hevur tí ikki neyðturviliga við sær brot á upphavsrættin. Dømi um hetta er, um so er, at avmarking er í upphavsrættinum sambært hesi lóg til lógliga nýtslu innan ávíst virksemi ella í ávísum førum, uttan at upphavsmaðurin gevur loyvi. Samanumtikið fevnir einkarætturin um rættin sambært § 2, undantikið avmarkingarnar í kapitli 2 í lógini. Sum dømi kunnu nevnast tillaging til blindamál og*
*eintøk, framleidd til privata nýtslu.*

*Upphavsrætturin avmarkast eisini av vanliga ognarrættinum. Upphavsmaður kann ikki ráða yvir verki, sum er ogn hjá øðrum. Upphavsmaður hevur heldur ikki atgongd til sítt verk, sum er ogn hjá øðrum.*

*Upphavsmaðurin hevur rætt at hava eftirlit við framleiðsluni og útgávuni av verkinum. Verkið skal verða útgivið á lógligan hátt, um tað lógligt skal brúkast við teimum loyvum, sum eru tikin við í hesa lóg.*

*§ 2 gevur ikki verju ímóti, at eitt verk verður avdúkað, áðrenn upphavsmaðurin hevur givið loyvi til útgávu. Greinin skilur heldur ikki millum frumeintak og avritað eintak. Eitt eintak er eitt eintak.*

*Einkarætturin at gera eintøk hevur við sær, at upphavsmaðurin má geva loyvi til at framleiða avrit av einum verki. Dømi um slíka framleiðslu er: Ljósprenting av eini bók, avmynding av einum málningi, endurgeving av einum málningi í sambandi við sjónleikapalllýsing, prenting av eini bók við myndum av málningum ella eftirskriving av eini yrking.*

*Tá ið talan er um ólógliga framleiðslu í størri mongdum, er talan um náptøku, sum í grannalondunum verður nevnd "piratkopiering".*

*Umframt at hava rættin at gera eintøk av sínum verki hevur upphavsmaðurin eisini einkarætt at geva verkið út.*"

**Til § 2 – Framleiðsla og útgáva**
Ásetingin í § 2 er tann sama sum í § 3 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

"*Stk. 1 allýsir framleiðslu. Einhvør beinleiðis ella óbeinleiðis, fyribils ella varandi, heil ella lutvís framleiðsla av einum eintaki er at rokna sum framleiðsla. Tað er serliga spurningurin um fyribils eintøk, sum er viðkomandi, og sum ivi oftast verður sáddur um. Við hesum skuldi verið greitt, at øll avriting av einum eintaki, uttan mun til tøkni ella miðil og uttan mun til, hvussu leingi eintakið verður goymt, skal verða gjørd við loyvi frá upphavsmanninum.*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

*Í seinna punktum um tól, sum kann endurgeva verkið, verður dentur lagdur á, at talan ikki einans er um ítøkilig, fysisk og sjónbar eintøk, sum t.d. eina bók ella ein málning, men eisini um ljóðbond/-upptøkur, sjónbond og líknandi. Ljóð- og sjónbandaupptøkur eru nevniliga ikki sjónligar, fyrr enn tær verða vístar á miðli, sum kann endurgeva tær.*

*Ásetingin fevnir eisini um telduforrit og onnur verk á einari teldu ella í dátugrunni. Hvørt nýtslan av telduforritinum e.l. kemur undir § 2 ella § 3, stk. 1 er uttan týdning, tí at talan verður í øllum førum um framleiðslu av eintøkum.*

*Tað er eisini brot á hesa áseting, um upphavsmaðurin verður forðaður í at gera verkið tøkt fyri almenninginum. Henda støðan kundi staðist, um onkur t.d. fekk netumsitarar hjá YouTube at forða fyri atgongd til eitt ávíst verk.*

*Stk. 2. Til ber at gera brúk av einum verki á tríggjar ymiskar hættir, sum verða reksaðir upp í hesum stykki.*

*Nr. 1 snýr seg um spjaðing til almenningin av eintøkum av verkum. Talan er ikki um sendingar í útvarpi ella sjónvarpi, tí tær koma undir almenna framførslu. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi verkum á talgildum neti o.l. Orsøkin er, at tað her er talan um spjaðing av fysiskum tilfari.*

*Rætturin at spjaða er ein heimild, sum er orsakað av einkarættinum hjá upphavsmanninum. Upphavsmaðurin hevur einkarætt at loyva framleiðslu av eintøkum av verkum, sum tann er upphavsmaður til og hevur tí eisini einkarætt at loyva spjaðing av verkunum. Eitt loyvi til framleiðslu av eintøkum av verkinum er ikki tað sama sum, at loyvi er givið til spjaðing av eintøkunum.*

*Tað er ein fortreyt fyri verju, at spjatt verður til almenningin. Spjaðing av eintøkum í privatum høpi hevur upphavsmaðurin onga løgfrøðiliga ávirkan á, og kann tað vera trupult at skilja millum alment og privat. Eitt eintak má tó roknast fyri at vera spjatt til almenningin, tá ið tað verður selt, lænt e.l. til ein privatpersón, sum upphavsmaðurin ikki hevur persónlig bond til.*

*Nr. 2 er um, at verk er tøkt fyri almenninginum, um tað verður sýnt fram alment, t.d. tá ið tað verður sent í sjónvarpi. Hugtøkini sýna fram og framføra kunnu vera ymisk í upphavsrættarhøpi og í vanligari talu. Tá ið tosað verður um at sýna film í biografi, er talan um at framføra verkið alment. Einkarætturin fevnir einans um almenna sýning og skal hugtakið skiljast á sama hátt, sum tá ið talan er um rættin til at spjaða eintøk.*

*Rætturin at sýna fram er serliga viðkomandi í mun til listaverk, har útsjóndin á verkinum er tað, tað snýr seg um. Mest vanliga dømi er listaframsýningin. Eitt eintak av listaverkinum kann sostatt eisini verða sýnt fram, hóast verkið, sum verður sýnt fram, er eitt avrit av frumlistaverkinum.*

*Nr. 3 snýr seg um at framføra alment, eisini tá ið talan er um sending í útvarpi ella sjónvarpi. Tá ið mett verður um, hvørt eitt verk verður framført alment, er tað uttan týdning, um framførslan er almenn av aðrari orsøk, t.d. í mun til loyvi frá løgreglu ella rindan av avgjaldi til landið. Markið*

*millum privata og almenna framførslu er heldur ikki tað sama sum markið fyri lógligari náptøku.*

*Eitt verk verður framført alment, tá ið t.d. livandi tónleikur verður framførdur á einari konsert, tá ið tónleikur verður spældur í einum handli, ein sjónleikaframførsla, biografsýning av filmi, upplestur á kaffistovu ella í útvarpi, sending í sjónvarpi e.l.*

*Stk. 3. Fyri at tryggja, at upphavsmaðurin hevur einkarætt til almenna framførslu, verður í hesum stykki tilskilað, at almenn framførsla eisini er, tá ið verkið verður atkomuligt hjá brúkarum á sjálvvaldum staði og tíð. Serliga verður hugsað um møguleikarnar, sum eru á alnetinum, har brúkarin fær atgongd til eitt nú heimasíður hjá kringvarpsstøðum. Ásetingin kann eisini fevna um t.d. teldupostsamskifti og annað samskifti um alnetið.*

*Annars verður tað rættarstøðan í Norðurlondum sum eigur at verða nýtt sum metingarstøði, tá tað snýr seg um møguleikar fyri flutningi av verkum, tá ið talan kann verða um almenna framførslu.*

*Nr. 2 ásetir, at talan er um almenna framførslu, tá ið tónleikur verður spældur á einum arbeiðsplássi, men talan skal vera um størri skara av fólki. Ein størri skari av fólki eru á leið 40 fólk við verandi meting.*

*Ásetingin merkir, at upphavsrættargjøld kunnu krevjast inn, tá ið tónleikur verður nýttur í arbeiðshøpi á virkjum við í minsta lagi 40 starvsfólkum. Hinvegin skal talan vera um, at øll starvsfólkini lurta eftir tónleikinum samstundis, og at hvørt arbeiðsstað verður talt upp fyri seg. Tí kemur hetta einans á tal, tá ið talan er um tónleik til arbeiðsuppgávuna, eisini hóast starvsfólkini sjálvi skipa fyri.”*

**Til § 3 – Upplýsing um upphavsmannin**
Ásetingin í § 3 er tann sama sum í § 8 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

”*Hetta er “droit moral”-reglan, har upphavsmaðurin hevur krav uppá at verða nevndur, sum góður skikkur krevur, tá eintøk av hansara verkum verða almannakunngjørd. Henda greinin er grundleggjandi verjan, sum upphavsrætturin snýr seg um.*

*“Droit moral”-verjan fevnir um at fáa navnið upplýst og um virðing fyri upphavsmanninum. “Droit moral” kann í útgangsstøðinum ikki latast øðrum. Talan er um persónlig hugsjónarlig rættindi, sum skilja seg frá teimum fíggjarligu, serliga tí at tey vara í allar ævir. Rættindini eru hugsjónarlig, tí upphavsmaðurin hevur persónligan áhuga í, at navnið á tí verður nevnt í sambandi við verkið.*

*Tað eru eisini fíggjarlig áhugamál í mun til, at navnið á upphavsmanninum verður nevnt í sambandi við eitt verk, t.d. sølu- og marknaðarvirði, og um felagsskapur skal krevja inn upphavsrættargjald í sambandi við nýtsluna av verkinum.*

*Skyldan at upplýsa navnið hongur neyvt saman við góðum siði, sum ásett í løgtingslóg um marknaðarføring um at sýna góðan marknaðarføringarsið. Navnið skal upplýsast allastaðni, har til ber uttan mun til, hvussu trupult tað kann tykjast. Metingin av góðum siði verður ikki gjørd*

*við støði í fatanini hjá upphavsmanninum av málinum, men skal taka útgangsstøði í og avgerast út frá einari objektivari meting. "Droit moral" er tí ikki bara verja fyri upphavsmannin, men eisini fyri almenn áhugamál.*

*Hóast eitt verk verður brúkt samsvarandi kapitli 2, har upphavsrætturin er avmarkaður, so hevur brúkarin skyldu til at upplýsa navnið á upphavsmanninum.*

*Er eitt verk almannakunngjørt undir dulnevni, er tað dulnevnið, ið skal upplýsast. Brúkarin skal sostatt virða upphavsmannin í hansara vali av navni. Tað verður roknað sum brot á upphavsrættin at upplýsa veruliga navnið á upphavsmanninum, um hesin hevur almannakunngjørt verkið undir dulnevni.*

*Stk. 2 er um rættin til virðing – droit au respect. Talan er um verju ímóti broytingum og snýr seg á sama hátt um verju í mun til atburð, sum er niðrandi fyri bókmentaligu og listaligu virðingina hjá upphavsmanninum, harundir um sermerki hjá viðkomandi.*

*Verjan móti broytingum hevur serligan týdning innan ávísar listagreinir, sum til dømis fagrar bókmentir, tónleik, dramatikk, film, málninga- og myndlistagreinina. Innan onnur listaøki, har brúkið er veruligt ella nýtsluræddað í størri mun, má roknast við, at upphavsmaðurin skal tola ávísa broyting. Tí er markið fyri broti á verjuna ikki tað sama innan øll øki.*

*Sambært stk. 3 kann upphavsmaðurin ikki siga rættin sambært greinini frá sær, uttan so at talan er um avmarkað brúk av verkinum, sum klárt og týðiliga er fráboðað ella ásett í avtalu. "Droit moral"-verjan, sum er ásett í fyrru stykkjunum í greinini, kann sostatt í útgangsstøðinum ikki avhendast. Tvs. at upphavsmaðurin hevur krav uppá at verða nevndur, sum góður skikkur krevur, tá eintøk av hansara verkum verða almannakunngjørd, um tann vil tað ella ikki, og uttan mun til í hvørjum landi verkið verður almannakunngjørt. Orsøkin er, at hóast fíggjarlig rættindi til verk kunnu verða avhend til onnur, so er tað framvegis upphavsmaðurin, sum hevur skapað verkið. Tá verkið verður brúkt, er tað tí framvegis upphavsmaðurin, ið skal nevnast við navni og ikki tann, ið fíggjarligu rættindini til verkið (ella umsitingin av verkinum) eru avhend til.*

*Dømi um eitt undantak til hesa meginreglu, sum kann koma undir stykki 3, er, at upphavsmaður kann loyva einstakt upplag, framførslu, framsýning v.m., at brúka verk hansara uttan at nevna seg við navni. Tað, ið hevur týdning í einari meting á hesum økinum, er hvat er væntandi hjá upphavsmanninum. Tá ið ein rithøvundur t.d. loyvir einum leikstjóra at gera skaldsøgu til film, er væntandi, at broytingar og tillagingar verða gjørdar. Er tílíkt loyvi givið, kann rithøvundurin ikki gera "droit moral" og "droit au respect" galdandi, uttan so, at broytingarnar eru meira víðgongdar, enn væntandi var."*

**Til § 4 – Almannakunngering og útgáva**
Ásetingin er óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

*"Talan er um allýsing av hugtakinum almannakunngering og útgávu. Hetta hevur avgjørdan týdning fyri avmarkingarnar í upphavsrættinum sambært kapitli 2, har tað í nærum øllum førum er ein treyt fyri at gera brúk av einum verki, at verkið er almannakunngjørt ella útgivið.*

*Eitt verk er almannakunngjørt, tá ið tað á lógligan hátt er gjørt alment atkomuligt.*

*Almannakunngeringin kann verða gjørd við, at eintøk verða boðin alment til sølu, til láns ella til leigu, ella um tey verða borin út til almenningin á annan hátt, t.d. almenn framsýning. Til hetta krevst loyvi frá upphavsmanninum. Hugtakið upphavsmaður fevnir um tann persónin, sum hevur skapað verkið, men tað kann eisini nýtast í mun til tann, sum hevur fingið rættin til eitt verk við avtalu, arvi ella líknandi. Persónar, sum eru ómyndugir ella líknandi, eitt nú børn ella sálarsjúk, kunnu vera upphavsmenn.*

*Eitt verk kann tó vera komið fram alment, uttan at upphavsmaðurin hevur givið loyvi til tess. Hetta kann vera hent, um upphavsmaðurin hevur selt eintak av verkinum til annan privatpersón, t.d. vinfólk. Rætturin til almannakunngering byrjar nevniliga fyrstu ferð, verkið skiftir eigara, samanber § 18.*

*Tá ið eitt eintak av einum verki fyrstu ferð verður spjatt alment ella til dømis verður víst alment, er ikki bara tað eina eintakið av verkinum alment, men verkið í síni heild almannakunngjørt ella útgivið. Eitt verk, sum er greitt úr hondum á slíkan hátt, at tað er broytt soleiðis, at annar enn upphavsmaðurin til frumverkið eisini hevur upphavsrætt, verður ikki roknað sum lógliga almannakunngjørt ella útgivið, fyrr enn tann, sum hevur upphavsrætt til broytta verkið, hevur givið sítt loyvi.*

*Av tí at tað er so avgerandi, nær eitt verk er almannakunngjørt ella útgivið, verður neyðugt at tulka almannakunngeringina avmarkandi í mun til tey fyrstu tiltøkini, sum verða sett í verk. Tá ein rithøvundur sendir sítt handrit til eitt forlag at vita um møguleikan at fáa verkið útgivið, er ikki talan um, at verkið er almannakunngjørt. Tað sama ger seg galdandi, um eitt verk verður latið ummælarum fyri útgávudagin.*

*Almannakunngeringin kann hava týdning fyri útrokningina av, hvussu long gildistíðin fyri upphavsrættin er.*

*Stk. 2. At eitt verk er útgivið hevur við sær, at eintøk av verkinum eru latin almenninginum upp í hendur, t.d. við at verkið er boðið alment til sølu, til láns ella til leigu. Ein almannakunngering merkir hinvegin ikki neyðturviliga, at verkið er útgivið. Ein útgáva merkir tó altíð, at verkið er almannakunngjørt.*"

**Til § 5 – Týðing og tillaging**
Ásetingin er óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

"*Sambært hesi grein kann ein umskriving av einum verki, til dømis umseting, verða vard upphavsrættarliga. Ein umseting er eitt óbeinleiðis verk, sum byggir á eitt verk, sum longu er skapað, ella sum er til. Upphavsrætturin er tengdur at frumverkinum og er avmarkaður soleiðis, at upphavsmaður til umseting ikki kann ráða yvir sínum verki (umsetingini) uttan loyvi frá upphavsmanninum til frumverkið. Er talan um fría nýtslu av verkinum, so er upphavsrætturin ikki tengdur at upphavsrættinum til frumverkið.*

*Tvær treytir skulu verða loknar, áðrenn tann, sum umskrivar, kann rokna við upphavsrættarverju.*
*Fyrra er, at tað, sum verður umskrivað, er eitt verk, og onnur er, at umskrivingin í sjálvum sær kann metast at vera eitt verk.*

*Eitt vart verk hevur verkhædd, tí skal verkið, sum verður umskrivað, hava verkhædd fyri at vera vart av upphavsrætti. Er eitt frumverk fevnt av § 1, er verkið upphavsrættarliga vart. Fyri tann, sum týðir ella tillagar, er tað bara umskrivingin av verkinum, sum verður vard. Umskipan av t.d. upplýsingum ella samanbering av upplýsingum hevur ikki upphavsrættarverju við sær.*

*Tað er ikki eitt krav, at verkið, sum verður umskrivað, er vart av upphavsrætti. Ásetingin fevnir sostatt eisini um týðing av verkum, sum ikki longur eru vard, tí at tíðin, har verkið nýtir upphavsrættarverju er runnin, ella at talan er um verk, sum ikki verða vard orsakað av ásetingini í lógini um, at almenn skriv, sum t.d. dómar og lógir, ikki eru vard upphavsrættarliga. Her kann umskrivingin verða vard av upphavsrætti.*

*Hitt kravið snýr seg um, at umskrivingin ella broytingin skal hava slíkt støði, at talan kann vera um eitt verk. Hetta merkir, at tað í sambandi við umskrivingina skal verða skapað eitt sjálvstøðugt avrik. Tað er ofta í tónleikaavrikum, at tað sæst eitt sjálvstøðugt skapað avrik, sum kann verða vart upphavsrættarliga. Tað er tó eitt minsta mark, t.d. verður ein broyting í ferðini á lagnum ikki roknað at hava slíkt støði, at tað verður vart upphavsrættarliga og heldur ikki ein broyting í tónalagnum. Tónleikarar, sum framføra eitt verk og byrja ófyrireikaðir, kunnu tó enda við at hava gjørt eitt sjálvstøðugt avrik, sum kann verða vart av upphavsrættinum.*

*Eru nevndu treytir gingnar á møti, hevur tann, sum hevur umskrivað ella broytt eitt verk, upphavsrætt til tað verkið.*

*Brúk av "nýggja" varda verkinum er tó treytað av, at upprunaligi upphavsmaðurin gevur loyvi til brúkið. Hóast eitt umskrivað ella umgjørt verk ikki lýkur krøvini í mun til støðið á verkinum, og harvið ikki er vart upphavsrættarliga, skal upphavsmaðurin til frumverkið geva loyvi til broytingina.*

*Upphavsrættarverjan samsvarar við ta verju, sum er fyri frumverk. Tann, sum hevur týtt ella tillagað eitt frumverk, hevur ikki bara fíggjarligu rættindini, men eisini "droit moral" sambært § 8 fyri eina og hvørja tillaging av tí nýggja verkinum.*

*Upphavsmaður til broytt verk hevur einans upphavsrætt til verkið, sum tað sær út í broyttum líki. Tað merkir, at tann, sum hevur umskrivað el.líkn., ikki hevur rættindi til frumverkið og heldur ikki til aðrar umskrivingar el.líkn. av sama verki. Ein, sum týðir eina útlendska bók, kann ikki nýta hesa áseting til at forða fyri, at aðrir týðarar brúka ta týðingina, tá teir fara undir at umseta somu bók.*

*Tá ætlanin er at brúka eitt upphavsrættarliga vart umgjørt verk, skal loyvi fáast til vega frá bæði upphavsmanninum til frumverkið og upphavsmanninum til broytta verkið.*

*Stk. 2 stuðlar undir meginregluni í § 1, tí tá seinna verkið er nýtt og sjálvstøðugt, fær tann, ið hevur skapað verkið, jú upphavsrætt til tað."*

**Til § 6 - Savnverk**
Ásetingin er broytt smávegis. Nú eitur tað "savnverk", tí verk kunnu vera vard av ásetingini, hóast tey ikki eru ritað í eitt savn. Tað avgerðandi er, at tey á originalan hátt eru savnaði saman.

Upprunaliga hugtakið ”ritsavn” tóktiskt eitt sindur misvísandi og kundi møguliga skiljast sum nakað, ið skal hava verið ritað, áðrenn tað verður vart sambært ásetingini. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru annars at lesa niðanfyri:

*”Í hesi grein er talan um brúk av verki í sínum frumskapi og sostatt ikki sum í undanfarnu grein, har talan var um at broyta verkið áðrenn útgávuna. Eitt ritsavn kann tó eisini vera eitt samansett savn av brotum úr ymiskum verkum.*

*Ritsøvn kunnu eitt nú vera: Stuttsøguritsøvn, frálæruritsøvn, yrkingasøvn, sangbøkur, sálmabøkur, lagatyssi, alfrøði, handbøkur, tíðindabløð, tíðarrit, dátugrunnar, íroknað margmiðil við teksti, ljóði og myndum.*

*Tað er tann, sum skapar verkið, sum verður vardur av upphavsrættinum, t.d. forlagsritstjórin.*

*Upphavsrætturin er í útgangsstøðinum altíð hjá einum likamligum persóni. Løgfrøðiligur persónur kann ikki hava upphavsrættin til eitt ritsavn, uttan við avtalu, sbr. § 1 um, nær upphavsrætturin byrjar.*

*Treytirnar fyri upphavsrætti eru í høvuðsheitum tær somu, sum í undanfarnu grein fyri tillagað verk. Fyri tað fyrsta skal talan vera um samansett verk, uttan mun til tíðarkarmin, har verkið er vart upphavsrættarliga. Tað merkir, at verk, sum eru so mikið gomul, at tey ikki longur eru vard av upphavsrætti, eisini koma undir ásetingina.*

*Hevur verkið, sum skal nýtast í ritsavninum, ikki slíkt støði, at talan er um sjálvstøðugt skapað verk, til dømis tí at talan bert er um upplýsingar, kann ritsavnið kortini verða fevnt av § 1 um upphavsrættarverju. Fyri tað næsta skal tann, ið hevur gjørt ritsavnið, hava gjørt slíkt avrik, at talan er um sjálvstøðugt skapað avrik, soleiðis at hetta framgongur av valinum ella innihaldinum, sum samlað sæð er eitt samansett verk. Ein landsrættardómur hevur t.d. lagt til grundar, at ein listaframsýning var vard sum sjálvstøðugt listaverk.*

*Upphavsrætturin til eitt ritsavn er treytaður av upphavsrættinum til frumverkið. Upphavsmaðurin til eitt savn kann ikki ráða yvir verkinum, uttan við loyvi frá upphavsmonnunum til frumverkini, sum verða nýtt í savninum. Tað sama ger seg galdandi fyri onnur, ið vilja brúka verkið. Tey mugu hava loyvi frá upphavsmanninum til savnið og til tey einstøku verkini í savninum.*

*Bløð og tíðarrit verða vanliga ikki roknað sum ritsøvn. Ein dátugrunnur kann vera eitt ritsavn í tann mun, at talan er um niðurtøkur og samansetingar, sum ganga undir almennar treytir fyri upphavsrættarvernd. Hesin rætturin hevur einki at gera við tann rættin, sum sjálvur dátugrunnurin hevur. Hesin rætturin hevur heldur einki at gera við líkastillaða rættin hjá upphavsmonnunum. Skal dátugrunnur verða roknaður sum eitt ritsavn, skal talan vera um savn við sjálvstøðugum verkum, upplýsingum ella øðrum innihaldi, sum er skipað á tann hátt, at tilfarið er teldutøkt ella á annan hátt atgeingiligt. Telduforrit, sum verða brúkt at reka dátugrunnar, og sum eru teldutøk, eru ikki fevnd av ásetingini.”*

**Til § 7 - Felagsverk**
Ásetingin er óbroytt. Viðmerkingnarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

*”Tá ið fleiri enn ein persónur hava skapað eitt verk, verður hetta nevnt felagsverk. Talan er til dømis um eitt felagsverk, tá ið tveir forritarar hava gjørt eitt telduforrit. Tann, sum verður roknaður sum upphavsmaður í einum felagsverki, skal hava givið eitt munandi íkast í sambandi við skapanina av verkinum. Eitt minni tøkniligt íkast hevði í hesum høpi ikki verið nóg mikið. Í mun til bókmentaverk hava persónar, sum hava givið íkast við at reinskriva, rættlesa ella líknandi, ikki upphavsrætt til verkið saman við rithøvundinum. Teirra leiklutur verður ikki roknaður sum eitt sjálvstøðugt skapað verk.*

*Tað avgerandi er ikki, hvat heiti tann hevur, sum gevur íkast til verkið, men hvussu stóran part av verkinum viðkomandi hevur viðvirkað til. Tað kann ikki avtalast við bindandi virknaði, at persónar, sum sambært hesi lóg ikki kunnu roknast sum upphavsmenn, skulu hava upphavsrætt til verkið. At upphavsmenn eiga upphavsrættin saman merkir, at allir upphavsmenninir skulu vera við til at ráða yvir verkinum, um ikki annað kann metast avtalað frammanundan.*

*Hvør einstakur upphavsmaður hevur upphavsrætt til verkið sum eina heild, og ikki bara til tann partin, viðkomandi hevur skapað. Tað merkir, at ein upphavsmaður ræður ikki einsamallur yvir nýtsluni av verkinum, um tað er í andsøgn við rættindini hjá hinum upphavsmonnunum til sama verk. Einasti rættur, sum upphavsmaður kann brúka einsæris, er rætturin at átala brot á upphavsrættin. Um so er, at eitt brot á upphavsrættin førir við sær, at endurgjald verður goldið, hava allir upphavsmenninir rætt til sín part av endurgjaldinum. Er talan um brot á “droit moral”, eru tað ikki neyðturviliga allir upphavsmenninir, sum verða ávirkaðir av brotinum.*

*Viðurskiftini millum upphavsmenninar til eitt felagsverk eru annars sambært avtalu. Tað veri seg til dømis spurningurin um innanhýsis viðurlag, har tað ikki er eitt krav, at viðurlagið verður javnt býtt millum partarnar.*

*Felags upphavsrættur til eitt verk hevur ávirkan á, hvussu long gildistíðin fyri upphavsrættin verður. Í hesum førinum varir verjan í 70 ár eftir deyðadagin hjá tí upphavsmanni, sum livdi longst.*

*Felags upphavsrætturin merkir sannlíkt eisini, at kravánari ikki kann rokna við at kunna søkja fulnað í eintøkunum av felagsverkinum.*

*Kunnu ymisku íkastini sundurskiljast sum sjálvstøðug verk, er ikki talan um felagsverk, men um tvíverk. Sum dømi kann nevnast tónleikaverk, har tey bæði íkastini tekstur og tónleikur kunnu skiljast sundur sum sjálvstøðug verk og nýtast hvør sær. Tað finnast ikki ítøkiligar reglur um tvíverk.”*

**Til § 8 – Meting um upphavsmannin**
Ásetingin í § 8 er tann sama sum í § 10 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru at lesa niðanfyri:

*”Henda grein snýr seg um tvær ymiskar reglur, sum báðar ætlandi skulu loysa møguligan iva um, hvør upphavsmaðurin er. Tað er umráðandi at vita, hvør hevur upphavsrættin og harvið heimildina at ráða yvir lista- ella bókmentaverkinum.*

*Sambært stk. 1 er upphavsmaðurin tann, sum er skrivaður á eintøk av verkinum, ella sum verður lýstur sum upphavsmaður, tá ið verkið verður almannakunngjørt. Hetta er galdandi, tá ikki annað er upplýst, og til annað er prógvað.*

*Ein rithøvundur, hvørs navn er upplýst á einum bókaumslagi at vera upphavsmaður til bókmentaverkið, hevur uttan iva rætt til at gera upphavsrættin galdandi við dómstólarnar v.m. Rithøvundurin hevur ikki próvskylduna í spurninginum, um tann er upphavsmaður til verkið ella ikki. Próvskyldan liggur hjá tí, sum ger annað galdandi.*

*At upphavsmaðurin er tann, hvørs navn framgongur av verkinum, er ikki bara galdandi, tá ið talan er um persónsnøvn. Tað ger seg eisini galdandi, tá ið talan er um dulnevni ella annað frámerki. Eitt frámerki kann vera undirskriftin hjá listafólkinum, forbókstavir ella líknandi. Eitt dulnevni er alment kent, um tað ikki er ivi um, hvør persónurin er, sum jú hevur upphavsrættin.*

*Ásetingin er eisini galdandi fyri felagsverk, har fleiri upphavsmenn geva út verk undir einum dulnevni, tá hetta dulnevnið er alment kent. Upphavsrætturin liggur hinvegin altíð hjá einum persóni. Tað kemur tí ikki upp á tal, at eitt virki ella ein stovnur hevur upphavsrætt til eitt útgivið verk.*

*Talan er í øllum førum um eina meting av, hvør er upphavsmaður og harvið hevur upphavsrættin. Henda meting kann vísa annað úrslit, um prógv fyriliggur.*

*Í teimum førum, har upphavsmaður gevur verk út undir dulnevni, er tað sambært stk. 2 útgevarin ella forlagið, sum umboðar upphavsrættin vegna upphavsmannin. Ásetingin er orsakað av fyriliti fyri tí dulnevnda. Umboðsreglan hevur við sær, at útgevarin hevur heimild at umsita upphavsrættin vegna upphavsmannin.”*

**Til § 9 – Almenn skjøl**
Ásetingin í § 9 er tann sama sum í § 12 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*”Henda grein ber í sær, at skjøl gjørd av almennum myndugleika, sum til dømis lógir og dómar ikki eru vard upphavsrættarliga. T.e. at tey kunnu avritast og spjaðast, uttan at fyrilit verður havt fyri upphavsrættinum.*

*Ásetingin fevnir bert um skjøl, sum eru gjørd innan almennu fyrisitingina og almennar myndugleikar, harundir kommunalum myndugleikum, nevndum og stovnum ella eindum, sum virka sjálvstøðugt, men í almennum høpi.*

*Skjøl, sum privatpersónar og privat virki hava gjørt, eru ikki fevnd av ásetingini, heldur ikki, tá tey verða send almennum myndugleika.*

*Útkast til skriv, skitsur og líknandi eru ikki fevnd av ásetingini. Tó verða lógaruppskot, sum verða send í hoyring, fevnd av ásetingini, men skriv, sum ikki fyriliggja í endaligari útgávu, eru ikki fevnd av ásetingini, fyrr enn tey verða send móttakaranum.*

*Eitt skjal, sum er fevnt av hesi áseting, fellur heilt uttan fyri upphavsrættarverju. Heldur ikki*

*"droit moral" kann gerast galdandi. Øvugt er skjal, sum ikki er fevnt av ásetingini, vart upphavsrættarliga sambært øllum galdandi reglum.*

*Greinin hevur eisini virknað fyri skjøl, sum eru gjørd, áðrenn lógin kom í gildi."*

**Til § 10 – Verja sambært aðrari lóggávu**
Ásetingin merkir, at verja sambært designlógini útilokar ikki verju sambært upphavsrættarlógini. Sum dømi kann nevnast, at um brúklist kann skrásetast sum vart snið sambært designlógini, kann hugverkið eisini verjast sambært upphavsrættarlógini. Tó kann skráseting av brúklist ikki fara fram sambært designlógini, um sniðið óheimilað brúkar eitt upphavsrættarliga vart verk, sbr. § 7, nr. 3, litra c í designlógini. Ásetingin um lógarástta verju av hálvleiðaravørum er tikin úr, tí ongin lógarásett verja er í Føroyum um hálvleiðaravørur.

**Til § 11 – Avmarkingar í upphavsrætti**
Ásetingin í § 11 er tann sama sum §§ 14 og 15 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013, har stk. 1-3 svara til § 14, og stk. 4 og 5 svara til § 15. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*"Stk. 1 ásetir, at upphavsmaður hevur krav uppá at verða navngivin, tá verk verður brúkt samsvarandi hesum kapitli, tað er bæði við heimild beinleiðis í lógini, og tá verk verður brúkt samsvarandi kunngerð. Hetta merkir, at "droit moral"-reglan í § 8 ikki verður avmarkað orsakað av avmarkingum í upphavsrættinum annars. Tá ið verk verður brúkt samsvarandi ásetingunum í hesum kapitli, skal upphavsmaðurin verða navngivin soleiðis, sum ásett í § 8, og verkið má ikki broytast ella brúkast á ein hátt, sum ger seg inn á frumverkið.*

*Einasta undantak er, um talan er um bygning ella brúklist, sum í ávísan mun kann verða broytt, uttan at upphavsmaðurin hevur givið loyvi, sbr. § 26.*

*Stk. 2. Her verður ásett, at um ein brúkari hevur rætt til at framleiða eintak av einum verki ella at gera tað alment atkomuligt samsvarandi undantøkunum í hesum kapitli, so kann brúkarin broyta verkið í avmarkaðan mun.*

*Verkið má ikki broytast í størri mun, enn loyvda brúkið krevur. Hetta skal tulkast tálmandi og avmarkandi. Tað er tí ikki loyvt at gera broyting av praktiskum ávum, ið ikki er neyðug. Til dømis er loyvt at endurgeva eitt verk í styttum formi í undirvísingartilfari, men tað er ikki loyvt at taka burtur brot úr verkinum. Málningar kunnu vísast í svart/hvítum, men tað er ikki loyvt at fara við myndini, sum einum lystir.*

*Stk. 2, 2. pkt. ásetir serliga keldutilvísingarskyldu, tá eitt verk verður endurgivið alment. Keldan er tað sama sum navnið á upphavsmanninum. Skyldan fevnir um upplýsing av navninum, sum ásett í § 8, og at upplýst verður um heitið á verkinum, navnið á t.d. tíðindablaði ella riti, har verkið er útgivið, navn á forlagi, sum hevur útgivið verkið og evt. stað og árstal. Keldutilvísingarskyldan skal nýtast samsvarandi góðum siði.*

*Stk. 3. Tað er eitt krav, at talan skal vera um lógligt eintak av verkinum, tá ið eintøk av verkinum verða framleidd. Hetta hevur serligan týdning, tá ið talan er um framleiðslu av eintøkum til egið brúk og er serliga viðkomandi, tá talan er um talgild eintøk. Tað er bert loyvt at framleiða eintak*

*til egið brúk, um eintakið, sum verður nýtt at framleiða ella avrita eftir, er eitt lógligt eintak.*

*Tað er heldur ikki loyvt at framleiða eintak til egið brúk, um eintakið, sum verður nýtt sum grundarlag, er eitt, har brot er framt á tøkniskipan, ella um tað verður farið uttan um tøkniskipan sambært § 30. Spurningurin, um eitt eintak er lógligt ella ikki, verður mettur út frá, um loyvi er givið til brúkið, ella um brúkið er fevnt av ásetingunum um undantøk í hesum kapitli.*

*Henda áseting er bert galdandi í mun til avmarkingarnar í upphavsrættinum og ikki í mun til loyvi, sum upphavsmaður gevur sambært avtalu. Spurningurin um lógligt eintak av verkinum kann tí verða fevndur av avtalunum um nýtslu av verkinum, sum verða gjørdar við heimild í ásetingunum um loyvi sambært avtalu."*

***Viðvíkjandi fyribils eintøkum í upprunaligu § 15***
*Henda grein er undantak til § 3, har ásett er, hvat er framleiðsla av vardum eintaki. Tað eru serliga fyribils framleidd eintøk, ið verða loyvd við hesi grein. Tøknin hevur við sær, at fyribils eintøk verða framleidd, tá ið t.d. eitt tónleikaverk verður spælt á telduni. Við hesum verður loyvi givið til hesa neyðugu framleiðslu, sum annars hevði verið ólóglig vísandi til einkarættin hjá upphavsmanni at framleiða eintøk.*

*Stk. 1. Hetta er undantak frá einkarættinum hjá upphavsmanninum, so verk kunnu verða margfaldað fyribils. Talan skal vera um tilvildarlig eintøk, sum t.d. sjálvvirkandi margfalding, har eitt eintak verður lagt á ambætara ella teldu í sambandi við kaging á alnetinum. Slík avritan hevur ikki munandi týdning fyri rættindahavaran. Hinvegin er ikki talan um heimild at gera eitt fyribils eintak av verkinum, tað er bert, tá margfalding er partur av t.d. tøkniliðinum.*

*Henda grein er fyrst og fremst fyri tann, ið varðar av sendinetinum ella er útbjóðari av alnetssambandi. Upphavsrættarkrøv skulu ikki verða sett móti hesum aktørum, tí at tøknin krevur, at tilvildarligt eintak verður framleitt til tess at flyta verkið á ein annars lógligan hátt. Sambært sonevnda Infosoc-direktivinum er tað ein fortreyt, at millumliðið ikki broytir upplýsingarnar og ikki ger seg inn á lógliga nýtslu av tøknini.*

*Rættindahavarar kunnu geva ítøkiliga góðkenning ella ósagda játtan til brúkið. Góðkenning kann*
*sostatt verða fevnd av eini avtalu um brúk av varda verkinum ella fyriliggja, tí rættindahavarin hevur gjørt verkið tøkt á alnetinum.*

*Tað er einans loyvt at gera eintak sambært hesi grein, um framleiðslan ikki í sær sjálvum hevur fíggjarligan týdning. Hesin parturin skal metast út frá, at avmarking í einkarættinum einans kann*
*gerast:*
- *í serligum føri*
- *sum ikki hevur skaðilig árin á vanligu nýtsluna av verkinum*
- *sum ikki á órímiligan hátt ger seg inn á lógartryggjaða rættin hjá upphavsmanninum*

*Hetta nevnist tann tríliðaða royndin, sum er umrødd í innganginum til kapittulin. Treytirnar í hesi*
*grein eru kumulativar!*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

*Ásetingin í § 14, stk. 3, har bann er sett móti at framleiða eintøk við støði í endurgeving av verkinum, er eisini galdandi fyri eintøk sambært hesi grein, sum tí er at meta sum undantak í mun til lógliga framleiðslu av verkinum. Tað merkir, at tað er í andsøgn við regluna, um útboð um alnetið er við til at spjaða ólógligt tilfar. Í slíkum føri ber til hjá rættindahavara at fáa fútabann mótvegis teimum, sum varða av sendinetinum ella alnetssambandinum, um treytirnar fyri fútabanni eru loknar, ella sambært tí, sum verður ásett í kunngerð.*

*Stk. 3. Infosoc-direktivið og e-handilslógin eru ikki sett í gildi í Føroyum. Infosoc-direktivið hevur nakrar avmarkingar av upphavsrættinum, og hesar verða í ávísan mun tiknar við í kunngerðirnar, ið verða gjørdar. Mentamálaráðið hevur umrøtt møguleikarnar við Vinnumálaráðið fyri at seta e-handilslógina í gildi.*

*Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, sum neyvari kunnu greiða viðurskiftini í mun til fyribils-, vara- og trygdareintøk. Tøkniliga menningin gongur skjótt, og hugsast kann, at tørvur verður á reglum, sum dagføra ella nágreina, nær eintøk kunnu gerast. Eisini er ætlanin at áseta reglur um avleiðingar av framleiðslu av eintøkum í ósamsvari við stk. 1, og um viðkomandi reglur, sum í Danmark eru innførdar við e-handilslógini.”*

**Til § 12 – Eintøk til egið brúk**
Ásetingin í § 12 er tann sama sum í § 16 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*”Ásetingin er um framleiðslu av eintøkum av vardum verki til egið brúk. Høvuðsreglan um møguleikan at framleiða eintøk av almennum verkum til egið brúk er ásett í stk. 1. Sambært stk. 2 er ikki loyvt at framleiða eintøk av ávísum verkum, uttan at upphavsmaðurin hevur givið loyvi. Í stk. 3 er ásett serlig undantaksregla, sum hevur við sær, at tað ikki er loyvt at framleiða eintøk av læntum ella leigaðum eintøkum. Stk. 4 snýr seg um at nýta hjálp frá fremmandum fólki, tá eintøk av verkum innan ávís øki verða framleidd. Til bannið móti at nýta fremmanda hjálp verður í stk. 5 lagt afturat eitt bann móti at nýta t.d. handlar, sum hava til endamáls at framleiða við vinningi fyri eyga, tá talan er um framleiðslu til egið brúk av tónaverkum, filmsverkum og bókmentaverkum.*

*Stk. 1. Møguleikin at framleiða eintak til egið brúk hevur við sær, at undantak verður gjørt frá einkarættinum hjá upphavsmanninum sambært § 2, soleiðis at henda avritan ikki er fevnd av upphavsrættarverjuni.*

*Løgfrøðiligir persónar hava ikki atgongd til at margfalda ella framleiða eintøk sambært hesi áseting. Løgfrøðiligir persónar, tað veri seg stovnar ella virki, eiga at hava avtalu við upphavsrættarfelagsskap um margfalding og framleiðslu av vardum tilfari.*

*Eisini er treyt fyri lógligari framleiðslu av eintaki av vardum verki til egið brúk, at verkið er almannakunngjørt ella givið út.*

*At brúkari kann framleiða ella fáa framleitt eintøk merkir, at tað í útgangsstøðinum er loyvt at nýta privata ella fremmanda hjálp, tá avritað verður til egið brúk.*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*Tað er ikki í andsøgn við hesa áseting at seta inn margfaldingarsperru, t.e. tøkniskipan, sum heilt ella lutvíst forðar fyri, at verkið kann verða avritað, t.d. á ljóð- og sjónbond. Lóglig framleiðsla er treytað av, at talan er um lógligt eintak.*

*Egið brúk*
*Løgfrøðiligir persónar, so sum vinnuvirki og stovnar, eru ikki fevndir av hugtakinum "egið brúk". Talan skal vera um brúk í einum húski ella í nærmastu familju og millum tey, sum privatpersónurin er saman við privat. Vanliga tulkingin er smøl, og talan skal vera um egið brúk.*

*Tað er ikki loyvt at brúka eintak, sum er framleitt til egið brúk, í vinnuligum høpi. Vinnuligt høpi verður tulkað breitt og fevnir bæði um beinleiðis og óbeinleiðis vinnu.*

*Henda regla loyvir tó, at starvsfólk í vinnuvirki kann margfalda til egna nýtslu og til onnur, sum viðkomandi hevur persónlig sambond við, íroknað einstakar starvsfelagar. Tað ber til at taka pening fyri at margfalda, men viðkomandi má ikki hava margfalding sum inntøkugrundarlag. Tikið kann verða gjald, sum samsvarar við útreiðslurnar, sum viðkomandi hevur havt í sambandi við margfaldingina.*

*Eintøk mugu einans verða framleidd til egið brúk. Talið á eintøkum er ikki ásett í lógini, men tað má metast um tað í hvørjum einstøkum føri. Í metingini verður dentur lagdur á, hvat slag av verki, talan er um og t.d. um, hvussu viðkvæmt verkið er í mun til margfalding.*

*Tað kann hava týdning, hvussu nógv eintøk av verkinum eru givin út ella almannakunngjørd. Er t.d. talan um listaverk, yrkingasavn ella nótar, sum vanliga bert verða givin út í smáum uppløgum, verður markið fyri margfalding til egið brúk sett við eitt ella tvey eintøk.*

*Umstøðurnar kunnu eisini hava týdning. Færri eintøk kunnu avritast av heilari bók, enn av einstøkum kapitlum í eini bók ella av eini grein í bókini.*

*At eintak, sum er framleitt samsvarandi hesi grein, ikki má brúkast í øðrum høpi merkir, at privatavrit ikki má breiðast út uttan fyri húskið ella vinaskaran. T.d. má eitt privat eintak, t.e. eitt avrit av einum lógligum eintaki, ikki nýtast til at spæla tónleik í eini matstovu ella líknandi. Heldur ikki privat avrit av listaverki má sýnast í almennum høpi.*

*Stk. 2. Í hesi áseting verða nevnd tey føri, har margfalding sum heild ikki kann/skal koma upp á tal.*

*Sambært nr. 1 er ikki loyvt at byggja bygning eftir vardum arkitektatekningum uttan við loyvi frá upphavsmanninum, hóast hetta verður gjørt til privata nýtslu. Tað er tó loyvt at taka mynd av bygningi og á tann hátt endurgeva vart tilfar.*

*Sambært nr. 2 er ikki loyvt at endurgera eitt listaverk, so tað kemur fram sum frumverk. Umstøðurnar í sambandi við endurgerð av listaverki kunnu hava við sær revsing sambært viðkomandi reglum í revsilógini.*

*Sambært nr. 3 er ikki loyvt at endurgera talgilt telduforrit til privata nýtslu. Hetta slagið av*

*endurgerð hevur serstaka áseting, sí § 26.*

*Hinvegin er loyvt at margfalda forritið í skrivligum formi, t.d. fotoavrit av pørtum av kelduloyvunum til eitt telduforrit, sum er útgivið í tíðarriti.*

*Nr. 4 snýr seg um dátugrunnseintøk. Undantakið frá loyvinum at margfalda til egið brúk er galdandi, um tvær treytir eru loknar. Í fyrstu atløgu skal talan verða um tóllisnan form, og í aðru atløgu skal talan vera um talgilt eintak, sum verður framleitt.*

*Fyri onnur verk enn telduforrit og dátugrunnseintøk er nr. 5 galdandi. Her er ikki fullkomið bann at margfalda til egið brúk, men hinvegin er avmarkað atgongd til at gera talgild avrit av verkum til egið brúk.*

*Stk. 3. Ásetingin hevur við sær, at tað ikki er loyvt at framleiða talgild eintøk av tónaverkum, filmsverkum, bókmentaverkum og øðrum verkum, sum ein hevur lænt á bókasavni ella frá vinum og kenningum. Somuleiðis er bannað at taka avrit av fløgu, DVD o.l., sum eru leigað.*

*Ásetingin fevnir um øll sløg av láni ella leigu, íroknað tá lænt ella leigað verður millum privatpersónar, t.d. vinir og kenningar. Ásetingin er galdandi uttan mun til, um útlánið ella útleiganin er lóglig ella ólóglig. Keypa fleiri persónar eina fløgu í felag og margfalda hana, kann talan verða um eina lániskipan, sum ikki er loyvd sambært lógini.*

*Tað er enn loyvt at avrita og framleiða analog eintøk, t.e. eintøk, sum ikki eru talgild. Tað kann vera analog avriting av kassettubandi, VHS-videobandi e.l. Hetta er eisini loyvt, tá talan er um lænt ella leigað eintak.*

*Henda áseting er bert galdandi fyri eintøk, sum eru framleidd, eftir at reglurnar vóru settar í gildi.*
*Sama áseting er í galdandi lóg, so hetta hevur onga broyting við sær í sambandi við gildiskomuna av hesi lóg.*

*Stk. 4. Fólk uttan fyri húskið merkir, at tað ikki er loyvt at nýta hjálp frá t.d. vinnurekandi til framleiðslu sambært hesi áseting.*

*Í donsku lógini verða hugtøkini privat og fremmand hjálparfólk nýtt. Privat hjálparfólk eru familja og vinaskarin hjá brúkaranum. Fremmand hjálparfólk hoyra ikki til nevnda skara.*

*Treytin fyri at nýta ókunnugt hjálparfólk er, at talan er um bílegging. Bíleggingin skal vera ein frammanundan, ítøkilig áheitan, sum brúkarin skal hava tikið stig til. Ókunnuga hjálparfólkið má ikki hava lýst við møguleikanum at avrita ella á annan hátt hava víst á henda møguleika. Ein fyritøka hevur ikki loyvi til at avrita eitt heilt upplag av einum verki og síðan vísa til, at talan er um einstøk eintøk til egið brúk.*

*Stk. 5. Hetta er bann ímóti at nýta kopieringsmaskinur ella aðra tøkniskipan til framleiðslu av privatum eintøkum.*

*Pkt. 1 merkir, at tað ikki er loyvt at taka avrit av nótum ella at gera líknandi upptøkur av*

*tónleika- og filmsverkum til privat brúk, um margfaldingin verður gjørd á almennum staði, sum rekur virksemi við vinniligum endamáli.*

*Pkt. 2 er ein serregla um bókmentaverk. Bannið at margfalda bókmentaverk er treytað av, at tað verður gjørt við tøkniligum útbúnaði, sum verður rikin við vinningi fyri eygai. At útgerðin skal verða rikin við vinningi fyri eyga fevnir m.a. um handlar, sum margfalda við fíggjarligum vinningi. Hinvegin eru bókasøvn og aðrir almennir stovnar ikki fevndir av ásetingini.*

*Tað verður mett, at tann, sum rekur handil, har møguligt er at margfalda, kann fráskriva sína ábyrgd við at upplýsa á staðnum um reglurnar viðvíkjandi upphavsrættarlóggávuni. T.e. at gera viðskiftafólk varug við, at avmarkingar eru í sambandi við margfalding av vardum tilfari.*"

**Til § 13 – Undirvísingartilfar**

Til brúk innan undirvísing loyvir ásetingin sambært avtalu við avvarandi felagsskap, at eintøk verða framleidd av útgivnum verkum sum undirvísingartilfar. Próvtøkutilfar verður í hesum mett at vera undirvísingartilfar  og harvið fevnt av undirvísingarhugtakinum. Ásetingin fevnir um allar hugsandi hættir at framleiða eintøk, og ásetingin er óikki tongd at, hvør tøkni verður nýtt í hesum sambandi. Tó er avriting av talgildum telduforritum ikki heimilað í ásetingini, men avriting av talgildum verkum annars er loyvd, um so er, at avtala er gjørd um hetta við góðkendan felagsskap.

Atlitið í hesi áseting er at heimila næmingum í lærugreinum við listarligum innihaldi at gera egnar framleiðslur. Talan er serliga um lærugreinir sum eitt nú tónleik og drama, har tónlist, leiklist og leikrit vanliga eru partur av undirvísingini. Talan kann eisini vera um upplestur av bókmentaverkum sum partur av undirvísingini. Ásetingin loyvir bert næmingum og møguliga lærarum at gera eintøk av egnum framførslum, og sostatt loyvir ásetingin ikki nevndu persónum at gera eintøk av framførslum hjá øðrum, og tað eru bert næmingarnir sjálvir og møguliga lærarin, ið kunnu gera upptøkurnar. Hetta merkir, at onnur ikki kunnu gera upptøkurnar fyri hesi.

Spælifilmur merkir, at filmurin skal hava verið framleiddur við tí endamáli at verða vístur í biografum, tvs. filmurin skal vera av slíkum slagi, ið vanliga verður víst í biografum. Dokumentarfilmar, stuttfilmar, filmar til undirvísing v.fl. eru ikki fevndir av ásetingini. Hugtakið "undirvísingarvirksemi" fevnir um almenna og privata kunnleikamillumgongu í skipaðum líki sum eitt nú háskúlar, námsfrøðiligt virksemi, eftirútbúgvingartilboð frá arbeiðsgevarum, fólkaskúlar, miðnámsskúlar, hægri lærustovnar v.m.

Uttan fyri hugtakið "undirvísingarvirksemi" fella staktiltøk av meiri undirhaldandi ella almennum slagi, sum í mun til tey luttakandi ikki kann metast at vera eyðmerkt av skipaðum skeiðs- ella undirvísingarvirksemi. Harumframt fella ymisk privat undirvísingarvirksemi uttan fyri hugtakið, har hesi ikki vanliga verða javnmett við nevnda virksemið, eitt nú privatir dansiskúlar, sbr. dómin UfR2003.212Ø.

**Til § 14 - Eintøk innan almennar og privatar stovnar, felagsskapir og vinnuvirki**

Ásetingin gevur umvegis avtalu við felagsskap virkjum og stovnum v.m. loyvi til innanhýsis nýtslu at gera avrit av yrkisligum greinum og stuttum brotum av útgivnum yrkisligum verkum og

tónleikaverkum. Ásetingin skal lesast saman við § 12 um framleiðslu til egið brúk, har tað ikki er loyvt løgfrøðiligum persónum at framleiða til egið brúk, og sostatt er treytin fyri, at ásetingin er galdandi, at talan er um stovnsgjørda avriting (institutionaliseret eksemplarfremstilling).

Um hugt verður eftir donsku viðmerkingunum frá 1995, skal talan vera um avriting av analogum verkum, sum í einari samanhangandi tilgongd verða avritað. Um til dømis avriting verður gjørd inn á eina maskinu, og avritið ikki kemur út analogt í tøttum tíðartilknýti til avritingina, er farið út um ásetingina. Ásetingin fevnir ikki um upptøku av útvarps- og sjónvarpssendingum, men á summum stovnum kann takast upp, sambært § 15 í lógini.

Orðingin til ”innanhýsis nýtslu” merkir, at gjørdu eintøkini eisini kunnu spjaðast innanhýsis á virkinum, stovninum, v.m.

Sum undantak til forboðið í § 12, stk. 4 at brúka hjálparfólk til framleiðslu av eintøkum, heimilar § 14, stk. 3 teimum í § 14, stk. 1 nevndu virkjum og stovnum at brúka hjálparfólk uttan fyri nevndu stovnar og virki at gera avrit av teimum í stk. 1 og 2 nevndu avritum.

Stovnar og virki v.m. skal tulkast breitt og fevnir um alla lands- og kommunufyrisiting, almenn og privat virkir, felagsskapir, fakfeløg v.m.

**Til § 15 – Sjúkrahús, røktarheim, fongsul v.m.**
Ásetingin gevur stovnum rætt í styttri tíðarskeiðum innanhýsis á stovninum at framleiða ljóð- og myndaupptøkur av upphavsrættarliga vardum verkum, sum verða send í útvarpi og sjónvarpi, við tí endamáli at vísa verkini forskotið fyri búfólkunum á stovninum. Talan skal vera um upptøku av nevndu verkum. Ásetingin heimilar ikki avritan av eitt nú fløgum, filmum v.m. Orsøkin til ásetingina er, at búfólk vegna ymsan aldur, ólíkar samdøgursrútmur, ymsar mannagongdir á stovnum v.m. kunnu verða avskorin frá at fylgja við sendingum í sjónvarpi og/ella útvarpi.

Viðvíkjandi tí stutta tíðarskeiðinum kann ein upptøka brúkast fleiri ferðir, um tørvur gerst á tí í tí ítøkiliga førinum, men upptøkurnar mugu ikki varðveitast longri enn neyðugt sambært endamálinum, sum í hægsta lagi kann vera nakrar dagar. Um farið verður út um hetta mark, er farið út um heimildina í § 15, og sostatt kann talan verða um brot á § 1 í lógini.

Hugtakið ”búfólk” skal skiljast sum persónar, ið av einhvørjari orsøk halda til á tílíkum stovnum.

Ásetingin skal lesast saman við § 12 í lógini, ið ikki loyvir løgfrøðiligum persónum, eitt nú virkjum og stovnum, at framleiða eintøk til privat brúk. Løgrøðiligir persónar kunnu gera avtalu við góðkendar felagsskapir. Ásetingin í § 15 er ein áseting um frítt brúk, har tað hvørki krevst samtykki ella viðurlag til rættindahavarar.

Forboðið móti vinnuligum endamáli skal skiljast sum forboð móti einum beinleiðis ella óbeinleiðis vinnuligum endamáli ella øðrum virksemi, ið kann javnsetast við eitt vinnuligt endamál. Hinvegin er ikki talan um vinnuligt endamál, um so er, at gjald einans er fyri tær veruligu útreiðslurnar, sum hava tilknýti til upptøkurnar.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Ásetingin loyvir ikki stovnum at býta upptøkur sínámillum, herímillum er ikki loyvt einari kommunu at gera upptøkur av sendingum til kommunalar stovnar, sjalvt um ein kommuna fyrisitingarliga er at meta sum ein stovnur.

**Til § 16 – Útflýggjan av vardum tilfari frá musealum søvnum**
Ásetingin er gjørd, tí privatir persónar sambært § 12, stk. 3 ikki - uttan loyvi frá upphavsmanninum - hava loyvi at framleiða talgilt eintak av einum eintaki, sum er lænt ella leigað. Talan skal vera um eintak av øðrum verki enn telduforriti og dátugrunseintaki, sbr. § 12, stk. 2, nr. 5, sbr. § 12, stk. 3.

Talan skal vera um almenn søvn, og fevnir ásetingin sostatt ikki um privatfíggjað søvn, goymslur ella museal søvn. Ásetingin loyvir bókasøvnum at nýta eitt nú teldupost og talgild telefax- og kopitól og aðrar online-møguleikar í sambandi við lánivirksemi, treytað av, at avtala er gjørd við góðkendan felagsskap sambært § 42. Fyri at ásetingin skal galda, er tað harumframt ein treyt, at talan er um eina ítøkiliga bílegging frá einum øðrum bókasavni ella einum endabrúkara.

**Til § 17 – Fólk við lesitarni og hoyritarni**
Ásetingin í stk. 1 er ein almenn undantaksregla, ætlað fólki við lesi- og hoyritarni. Ásetingin loyvir, at eintøk verða gjørd av útgivnum hugverkum. Harumframt loyvir ásetingin, at útgivin hugverk á annan hátt verða endurgivin og spjadd uttan mun til brúk av tøkni, bert málbólkurin eru fólk við lesi- og hoyritarni.

Ásetingin heimilar fríari nýtslu í tann mun, at upphavsmaður ikki hevur nakran rætt at krevja viðurlag ella at krevja fyribeining o.a.

Fólk við lesi- og hoyritarni verða vanliga mett at vera fólk, ið eru blind, sjónveik, deyv, orðblind, hava talibrek ella eru fólk, ið sum fylgi av serligum likamligum og sálarligum umstøðum ikki hava møguleika at útvega sær hugverk á vanligan hátt.

Ásetingin fevnir ikki um børn beint undir skúlaaldur, ið vanliga ikki eru før fyri at lesa vanligar bøkur. Vantandi førleikin hjá hesum børnum skyldast ikki breki, og sostatt fella tey uttan fyri ásetingina.

Donsku viðmerkingarnar til ásetingina nevna sum dømi, at vantandi førleiki vegna brek kann skjalprógvast við eitt nú einari læknaváttan, sbr. tillægsbetænkning frá 18. desember 1996 frá Folketingets Kulturudvalg.

Ásetingin í stk. 3 fevnir bert um sjónveik og fólk við lesitarni: blind, sjónveik, orðblind og onnur, ið ikki eru før fyri at lesa vanligan tekst. Sostatt fevnir ásetingin í stk. 3 ikki um deyv og fólk við talibreki.

Ásetingin í § 17, stk. 1 fevnir um endurgeving og spjaðing. Hetta merkir, at eintøk kunnu gerast, sum kunnu vísast og spjaðast til onnur, eins og talan kann gerast um almenna framførslu. Ásetingin fevnir um øll sløg av hugverkum.

Sum áður nevnt, er tað ein treyt fyri at brúka ásetingina í § 17, stk. 1, at tey endurgivnu og spjaddu eintøkini eru serliga ætlað teimum í stk. 1 nevndu persónum. Í donsku viðmerkingunum

til lógina stendur m.a.: ”Der skal være klare holdepunkter for at antage, at formålet udelukkende er at betjene de pågældende handicapgrupper… Værksgengivelsen har egenskaber, som viser, at gengivelsen er særligt tilrettelagt for de syns- og hørehandicappede... Normalt ikke andre end de handicappede selv, der er i stand til at udnytte gengivelser og eksemplarer, som er særligt tilrettelagt for disse grupper. ”

Harumframt skal talan vera um útgivin verk, sum sambært § 4, stk. 2 í lógini er, tá ið eintøk av verkinum við upphavsmansins samtykki eru boðin til sølu, ella við samtykki upphavsmansins á annan hátt eru spjadd alment.

Forboðið móti vinnuligum endamáli skal skiljast sum forboð móti einum beinleiðis ella óbeinleiðis vinnuligum endamáli ella øðrum virksemi, ið kann javnsetast við eitt vinnuligt endamál. Hinvegin er ikki talan um vinnuligt endamál, um so er, at gjald einans er fyri tær veruligu útreiðslurnar, sum hava tilknýti til endurgevingarnar ella spjaðingarnar.

Ásetingin í § 17, stk. 2 er eitt undantak frá stk. 1 viðvíkjandi ljóðupptøkum av ávikavist bókmentaverkum og tónleikaverkum.

Allar ljóðupptøkur av bókmentaverkum eru undantiknar rættinum at endurgeva og spjaða uttan at gjalda viðurlag sambært stk. 1. Hetta merkir, at framleiðslur av ljóðupptøkum, ið umframt ljóðupptøku eisini standast av teksti og/ella myndum, eisini eru fevndar av undantakinum sambært stk. 2, og kunnu hesar sostatt ikki uttan viðurlag frítt endurgevast og spjaðast sambært stk. 1. Talan kann eitt nú vera um ljóðbøkur við møguligum mynda- og/ella tekstískoyti.

Bert endurgevingar av tónlistaverkum, ið einans stendst av ljóði er undantikið stk. 1. Um so er, at ein ljóðupptøka av einum tónlistaverki er partur av margmiðlaframleiðslu (multimediefrembringelse), er slíkt fevnd av stk. 1. Ásetingin ber við sær, at fløgur við tónlistaverkum ikki eru fevndar av stk. 1 við teirri fylgi, at fólk við sjón- og hoyritarni ikki við heimild í § 17, stk. 1 kunnu endurgeva ella á annan hátt spjaða fløgur við tónlistaverkum.

Ásetingin í § 17, stk. 3 gevur atgeingi til framleiðslu av ljóðbókum og ljóðtíðarritum til fólk við lesitarni, herímillum serliga blind og orðblind. Ásetingin fevnir bert um útgivin verk. Hugtakið ”endurgeva” merkir lutvíst framførsla og lutvíst at flyta kaðalborið ella tráðleyst, sbr. § 3, stk. 3, nr. 1 í lógini. Harumframt fevnir ásetingin um spjaðing, t.e. útbreiðslu av fysiskum eintøkum, herímillum at læna út. Framførsla merkir harumframt, at Landsbókasavnið umframt fysiskt útlán eisini kann leggja ljóðbøkur út á netið til fólk við lesitarni á tann hátt, at einans fólk við lesitarni fáa atgeingi til ljóðbøkurnar. Vantandi førleikin at lesa vegna lesitarn skal onkursvegna skjalprógvast, t.d. við eini læknaváttan. Misnýtsla á netinum í hesum sambandi skal í størstan mun fyribyrgjast gjøgnum eitt nú kryptering.

Tað er harumframt ein treyt fyri nýtsluni av § 17, stk. 3, at framleiðslan av ljóðbókum ikki á órímiligan hátt ger inntriv í vinnumøguleikarnar hjá teimum vanligu forløgunum, ið virka á handilssligum grundarlagi. Hetta merkir, at eitt nú Søvn Landsins og onnur, sum annars vildu brúkt § 17, stk. 3 sum meginregla ikki skulu útgeva eina ljóðbók, ið longu er útgivin av einum vanligum forlagi, ið virkar á handilsligum grundarlagi, ella forlagið hevur ítøkiligar ætlanir innan stutta tíð at geva eitt ávíst verk út sum ljóðbók. Tó verður mælt til, at avvarðandi partar gera

samstarvsavtalur sínámillum hesum viðvíkjandi. Av tí, at talan er um sokallað tvangslicens, kann upphavsmaður krevja viðurlag.

Ásetingarnar í § 17, stk. 5-7 svara nøkulunda til § 17, stk. 4 í donsku lógini og gevur atgeingi til at gera upptøkur av verkum, ið verða send í sjónvarpi og útvarpi, herímillum talgildar upptøkur. Upptøkurnar mugu einans brúkast til fólk við sjón- og hoyribreki. Fevnd av ásetingini eru landsmyndugleikar, kommunur og aðrir sosialir ella almannagagnligir stovnar, ið kunnu gera avtalu við góðkendan felagsskap. Tað er ikki ein treyt, at stovnurin er almennur. Tó eru virkir, ið eru grundað á handilsligt grundarlag, ikki fevnd av ásetingini. Ásetingin gevur umframt rætt til at framleiða eintøk av upptøkum eisini rætt til at spjaða hesar til nevndu brúkarar innanhýsis. Nærri reglar verða avtalaðar millum stovnin v.m. og góðkenda felagsskapin.

**Til § 18 – Upptøka av framførslu av verkum í undirvísing**
Fyri at vera fevnt av ásetingini skal talan vera um eitt savnsrit (ritverk ella tekstasavn (antologi)), ið lúkar krøvini í § 6 í lógini. Um ritsavnið ikki er samansett eftir eini nøktandi ætlan ella hugskoti, er tað ikki fevnt av § 23, sbr. dómin í Eystara Landsrætti UfR 1994.132 Ø, viðv. avriting av evnissøvnum (kompendium) á einum lærdum háskúla, har stevndi viðgekk, at talan var um brot á einkarættin. Ásetingin fevnir eisini um tónleikasøvn, og tað er ikki ein treyt, at eitt savn er prentað.

Treytin um, at fleiri upphavsmenn skulu hava givið sítt íkast til ritverkið, merkir, at tað ikki er loyvt einans at taka ískoyti frá einum ella nøkrum fáum upphavsmonnum. Allarhelst skal talan vera um eitt so stórt tal á upphavsmonnunum, at tað má metast at vera tíðar- og orkukrevjandi fyri útgevaran at biðja um samtykki frá hvørjum einstøkum upphavsmanni. Ásetingin fevnir bert um bókmentaverk og tónlistaverk, sbr. Weincke 1976, s. 83.

Bókmenta- ella tónlistaverkini kunnu endurgevast í síni heild, um talan er um minni verk. Donsku viðmerkingarnar frá 1995 nevna sangtekstir, yrkingar og tílík verk sum verandi minni verk. Um talan er um stór verk, kann eitt minni vavi av einum tílikum verki endurgevast. Myndir og annað myndprýði kunnu endurgevast sambært ásetingini, um hesi verða endurgivin í tilknýti til tey sambært ásetingini nevndu ritverk.

Talan skal vera um ritverk, ið einans hevur til endamáls at verða brúkt til undirvísing ella gudstænastu, eitt nú sangbøkur til lærugreinina Tónleikur í skúlunum. At nevndu ritverk ikki skulu vera gjørd til undirvísingarbruk ella gudstænastu merkir, at tað eitt nú ikki ber til at savna brot úr ymsum lærubókum og endurgeva hetta sum ritverk uttan samtykki frá upphavsmanninum. Upphavsmaður kann krevja viðurlag sambært stk. 4. Viðurlagið eigur ikki at vera so mikið stórt, at vandi er fyri, at støddin á viðurlagnum kann hava darvandi ávikan á útgávuhugin av nevndu verkum til skúlabrúk, sbr. UfR 1994.425H.

Ásetingin skal lesast saman við teimum avmarkingum, ið standa í § 16 viðvíkjandi rættinum at loyva einstaklingum at gera eintøk av vardum verkum til egið brúk. Sambært ásetingini mugu ikki gerast fleiri enn 1.200 eintøk av hvørjum sanghefti, og sangheftið skal vera til brúk til privat endamál ella til ávís høvi, t.e. eitt ítøkiligt høvi, eitt nú ein ítøkiligan fólkafund, ein aðalfund ella til eina jarðarferð. Hinvegin er tað ikki loyvt at gera sanghefti til størri landsumfatandi røðir av fundum ella upp í saman at gera eintøk upp til 1.200 eintøk. Í donsku lógini er talið 300 eintøk av sangheftum, men av tí at føroyska sangmentanin og jarðarferðarmentanin er so nógv øðrvísi enn

í Danmark, og ofta er tað nógv størri luttøka í slíkum samanborið við tað vanliga í Danmark, verður tað mett rímiligt, at talið er hægri í Føroyum.

Ásetingin fevnir einans um sangtekstir, og ásetingin fevnir ikki um tónlistaverk sum eitt nú nótar og talsetingar. Tað er harumframt ein treyt, at sangteksturin á lógligan hátt er atkomandi hjá almenninginum. Ein sangtekstur er eitt bókmentaverk í sær sjálvum, og sostatt kann tann ikki endurgevast saman við tónleikinum, ið er eitt tónlistaverk. Sangteksturin kann tó verða útgivin, hóast tann er útgivin sum tónlistaverk, har sangteksturin er knýttur at tónleikinum, sbr. annars § 4 í lógini.

Umframt at geva rætt undir ávísum treytum at gera eintøk av sangtekstum, gevur ásetingin eisini rætt til at spjaða sangtekstirnar til luttakarar á eitt nú fundum.

**Til § 19 – Spjaðing av eintøkum**
Ásetingin í § 19 er tann sama sum § 18 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingin frá lógini í 2013 er endurgivin niðanfyri:

*”Henda áseting er reglan um, at tá ið upphavsmaður sjálvboðin hevur latið sítt verk til annan at eiga, so heldur hansara einkarættur yvir verkinum uppat. Hetta merkir tó einans, at einkarætturin*
*yvir júst tí eina eintakinum verður avmarkaður, og tað merkir tí ikki, at upphavsmaður missir rættin til t.d. at framleiða eintøk ella at taka støðu til almenna framførslu ella framsýning.*

*Tvær treytir skulu verða uppfyltar, áðrenn eitt verk verður roknað sum spjatt, soleiðis at tað kann spjaðast víðari. Fyri tað fyrsta skal verkið vera selt ella á annan hátt latið øðrum. Fyri tað næsta skal hetta vera gjørt við loyvi frá upphavsmanninum. Eru treytirnar uppfyltar, kann eigarin spjaða eintakið víðari, annaðhvørt við sølu, gávu, býti, ella við at leiga ella læna tað út.*

*Givna loyvið hevur við sær, at spjaðing av eintaki skal vera sambært avtalu við rættindahavaran til verkið. Útgangsstøðið er, at próvbyrðan áliggur tí, sum skjýtur seg undir, at loyvi er givið.*

*Treytin fyri, at verk verður roknað fyri at vera handað øðrum, er, at handanin er endalig. Sostatt merkir leiga ella útlán ikki, at upphavsmaður hevur givið loyvi til, at eintak av verkinum kann spjaðast. Sama ger seg galdandi við framførslu ella framsýning.*

*Kravið um sølu er neyvt tongt at útgávuni av einum verki, tí tað er eisini galdandi, tá ið eintak av verki verður selt. Til dømis tá ið listaverk verður selt privatpersóni ella fyritøku, uttan mun til um tað einans er eitt eintak av verkinum.*

*Í m.a. Danmark er loyvt at spjaða eintak av verki innan EBS-samstarvið, tí hava danir ikki longur loyvi sambært lógini at spjaða globalt. Av tí at Føroyar ikki eru við í ES ella EBS, gevur henda áseting enn loyvi til at spjaða globalt, t.e. um allan heim og ikki einans innan ávíst geografiskt øki. Hetta merkir eisini, at loyvt er at parallelinnflyta vøru, hóast hon ikki er seld á føroyska marknaðinum.*

*Stk. 2. Uttan mun til, hvar eitt verk er selt ella givið út, krevst serstakt loyvi til útleigan av einum verki. Rætturin hjá upphavsmanninum er tí enn fullkomin, tá tað ræður um útleigan, sbr. § 2.*

*Einastu undantøk eru bygningar og brúklist, sum kunnu leigast út, tá tey eru seld ella latin øðrum, so at viðurskiftini eru í samsvari við stk. 1.*

*Stk. 3 er undantak frá nýtsluprinsippinum sambært stk. 1, tá tað snýr seg um útlán. Tað er ikki loyvt at læna út filmsverk ella telduforrit í tóllisnum formi, uttan við loyvi frá upphavsmanni. Øll onnur verksløg kunnu verða lænt út, t.d. á bókasavni.*

*Stk. 4. Her verður ásett, at rætturin at spjaða eintøk av verkum ikki hevur ávirkan á rættin at móttaka bókasavnsgjald sambært løgtingslóg um bókasøvn. Talan eru um tvær skipanir, sum virka óheftar av hvørjari aðrari."*

**Til § 20 – Viðurlag fyri framsýning**
Ásetingin í § 20 er tann sama sum § 19 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingin frá lógini í 2013 er endurgivin niðanfyri:

*"Tá ið talan er um listaverk, er nóg mikið, at einans eitt eintak av verkinum er latið øðrum til ognar. Tað er ikki neyðugt, at verkið er útgivið. Orsøkin er, at tað sum oftast einans verður gjørt eitt eintak av verkinum. Tað er sostatt munur á útgávu og almennari framvísing. Tá eitt verk er útgivið, kann tað vísast alment, men tá verk verður víst alment á t.d. alnetinum ella í sjónvarpi, verður hetta at rokna sum almenn framførsla og ikki bara framvísing.*

*Tað er ikki loyvt at framsýna avrit av verkum vísandi til hesa grein. T.d. kunnu avrit av blaðgreinum ikki vísast alment uttan við loyvi frá upphavsmanninum. Er talan um myndasýning, sum ikki kann gerast uttan, at avrit verður tikið, er loyvt at gera tað."*

*At eintak av einum verki verður latið øðrum, merkir ikki, at viðkomandi fær upphavsrættin til verkið. Tí fær eigarin heldur ikki ræðisrætt yvir verkinum, uttan so at avtala er gjørd við upphavsmannin. Eigarin kann vísa verkið, men ikki gera eintøk av tí. T.d. um eitt listasavn eigur málning, so kann listasavnið ikki gera postkort o.a. uttan við loyvi frá upphavsmanninum.*

*Stk. 2. Í kunngerðini kann verða ásett minstaupphædd fyri framsýningargjald, tá ið listaverk verða sýnd fram alment, umframt at reglur verða um útrokning av viðurlagi fyri framsýning. Ongar reglur eru um framsýningarviðurlag, sum er, tí fyriliggur ítøkilig avtala í hvørjum einstøkum føri millum upphavsmannin og framsýnaran. Reglurnar verða gjørdar í tøttum samstarvi við tey, sum varða av økinum í Føroyum."*

**Til § 21 – Almenn framførsla**
Ásetingin í § 21 er tann sama sum § 20 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingin frá lógini í 2013 er endurgivin niðanfyri:

*"Henda greinin ásetir, nær eitt verk kann verða framført alment. Hvørt talan skal vera um framførslu uttan loyvi og møguliga eisini uttan viðurlag til upphavsmannin, eru viðurskifti, sum partarnir taka støðu til. Hóast talan er um almenna framførslu, kann ein slík framførsla vera uttan viðurlag, um felagsskapirnir t.d. upplýsa, at har er eitt minstamark fyri, nær viðurlag verður kravt inn.*

*Partarnir eru felagsskapur, sum umboðar upphavsmenn, ella upphavsmenn, sum ikki hava latið*

*felagsskap umboða seg, og brúkarin. Brúkarin er í hesum førinum tann, sum skipar fyri tiltakinum.*

*Munur er á, hvussu hetta slagið av framførslu verður avmarkað í ymsu londunum. Ásetingin fevnir bert um framførslur. Tað vil siga, at vísingar og framsýningar ikki eru innan fyri virkisøkið í hesi áseting. Og tí verða vísingar og framsýningar ikki frítiknar fyri at lata viðurlag eftir hesari áseting.*

*Ásetingin fevnir eisini um verk í talgildum sniði, t.d. fløgur og myndir úr dátugrunni.*

*Av tí at ætlanin við hesi grein er, at vard verk kunnu nýtast, uttan at upphavsrættargjøld skulu rindast, verða tríggjar treytir settar, sum skulu vera loknar, áðrenn almenn framførsla kann fara fram.*

*Talan skal vera um høvi, og ikki eitt væl fyriskipað tiltak. Tað skal vera eitt slag av tilvild, tá ið fólk savnast um eitthvørt og byrja eina framførslu.*

*Fyrsta treytin er tí, at atgongd til staðið, har framførslan fer fram, ikki er tengd at keypi av atgongumerki. Talan kann vera um alment stað, har fólk savnast at fagnast eitthvørt og byrja at syngja.*

*Framførslan skal tískil ikki vera aðalmálið ella orsøkin til, at fólk savnast. Roknast má við, at midnáttarsangurin á ólavsøku kann koma undir ásetingina, men hetta verða viðurskifti, sum felagsskapurin og kommunan, sum fyriskiparar, taka sær av.*

*Triðja treytin, sum skal vera lokin er, at eingin fíggjarligur vinningur spyrst burtur úr framførsluni. Hetta tí at rættindahavarin hevur rætt til sítt upphavsrættargjald, um fíggjarligur vinningur spyrst burturúr. Eisini skal havast í huga, at felagsskapur, sum antin ósagt ella í avtalu, gevur loyvi til framførslu uttan viðurlag, gevur loyvi vegna rættindahavaran og hevur sum uppgávu at krevja inn gjøldini fyri rættindahavaran. Verða t.d. tónleikarar nýttir til framførsluna, og fáa hesir løn fyri sítt arbeiði, verður framførslan at rokna sum vinnulig.*

*Ásetingin fevnir ikki um pall- og filmsverk, sum merkir, at verður eitt slíkt verk framført, skal avtala fyriliggja við felagsskapin, sum umboðar rættindahavararnar til verkið.*

*Stk. 2. Lóggávan um fólkakirkjuna leggur upp til, at gjald ella atgongumerki ikki verður tikið fyri tiltak í kirkjuni, tí verður mett hóskandi, at framførsla í sambandi við gudstænastu verður beinleiðis undantikin. Gudstænastan verður eisini undantikin í hinum Norðurlondunum. Ásetingin gevur heimild til, at sálmar verða framførdir í gudstænastu o.l., uttan at viðurlag skal rindast. Siðvenja er, at ikki verður rindað fyri framførslu av sálmum, og ætlanin er ikki at broyta hetta við hesi lóg.*

*Kirkjuligt virksemi sum barnadópur, ferming, jarðarferð o.s.fr. verða ikki roknað sum vanlig gudstænasta, men er kortini fevnt av ásetingini, tí at framførslan av verkinum ikki er berandi fyri tiltakið.*

*Tá ið tað stendur el.líkn. verður sipað til aðrar kirkjusamkomur ella onnur trúarsamfeløg, sum*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*hava tænastur, sum kunnu samanberast við gudstænastur. Sum gudstænasta er at rokna líknandi virksemi, sum verður útint í øðrum trúarsamfeløgum, har tað á samsvarandi hátt verður skipað fyri átrúnaðarligum virksemi, sum er í samsvari við siðirnar hjá øðrum trúarsamfeløgum.*

*Ásetingin merkir, at størri tiltøk, t.d. átrúnaðarlig tiltøk í ítróttahøll, har fjøldin er størri enn til vanliga gudstænastu, ella onnur tiltøk enn gudstænastur í kirkju ella samkomu, ið sum heild ikki eru at meta sum vanliga gudstænastu, ikki verða fevnd av ásetingini. Tá skal viðurlag rindast fyri framførsluna sambært galdandi reglum.*

*Í fráløruhøpi skal tulkast breitt og kann fevna um framførslu í floksrúminum ella í sambandi við hátíðarhald í skúla- og undirvísingarverkinum. Framførsla í skúlum er sum oftast ikki almenn, umframt at áhoyraratalið er avmarkað. Vanliga hevur almenningurin ikki sum so atgongd til tær framførslur, sum eru á skúlanum.*

*Framførsla uttan viðurlag sambært hesi áseting, eigur ikki at koma í bland við vanliga nýtslu av vardum verkum. Tey, sum varða av tilfarinum til skúlabrúk, eiga at hava avtalu við upphavsrættarfelag, soleiðis at upphavsmenn fáa viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum í undirvísingahøpi.*

*Annað punktum er undantak soleiðis at skilja, at er talan um framførslu, sum verður kringvarpað, so skal avtala fyriliggja við kringvarpsstøðina um framførsluna av vardu verkunum. Støð ella skúlar, ið skipa fyri fráløru í vinnuligum høpi, eiga at hava avtalur við felagsskapir, sum umboða upphavsmenn til vard verk, um nýtslu og viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum í fráløruni.*”

**Til § 22 - Sitat**
Ásetingin í § 22 er tann sama sum § 21 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013. Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Viðmerkingin frá lógini í 2013 er endurgivin niðanfyri:

”*Henda áseting gevur loyvi at sitera úr verki, sum er almannakunngjørt. Rætturin at sitera er ein av grundleggjandi avmarkingunum í einkarættinum hjá upphavsmanni til sítt verk. Tað er loyvt at sitera, uttan at upphavsmaðurin hevur givið loyvi ella kann krevja viðurlag. Høvuðsreglan er, at siterast kann úr øllum verksløgum.*

*Reglan um, at loyvt er at sitera, er galdandi fyri allar hættir at bera boðskapin fram. Tað er loyvt at gera eintak at spjaða út alment, vísa fram og framføra við at sitera. Hinvegin er ikki loyvt at gera sjálvstøðugar upptøkur av framførslum av verkum, tí verður undir øllum umstøðum talan um at sitera brot úr eini framførslu el.líkn.*

*Listaverk kunnu tó ikki siterast við heimild í hesi grein, tí tað hevði merkt, at petti av einum málningi, mynd el.líkn. kundi verið siterað. Siteringsásetingin gevur tí ikki rætt til at sitera myndir heilt ella lutvíst í øðrum høpi, t.d. í samklippi.*

*Mett verður ikki, at henda áseting kann nýtast at endurgeva einstaka mynd úr einum filmsverki. Orsøkin er, at endurgeving av einstakari mynd úr einum filmi er tað sama sum vanlig nýtsla av fotomyndum. Um loyvt var at endurgeva film við at endurgeva eina mynd úr filminum, hevði*

*man samstundis bannað at endurgivið aðrar myndir nyttuleyst. Tað er tó loyvt at endurgeva part av einum filmi í filmssniði.*

*Av omanfyri givnu orsøkum, hevur siteringsásetingin einans týdning fyri bókmentaverk, tónleikaverk, filmsverk og pallverk.*

*Eitt verk skal vera almannakunngjørt, áðrenn loyvt er at sitera. Fyrivarni um, at verkið ikki kann siterast, er ógildugt. Í sambandi við sitering er skylda til at upplýsa navn og hava kelduávísing.*

*Ásett er, at loyvt er at sitera verkið soleiðis, sum góður siður krevur, og í tí vavi, sum er neyðugt til endamálið. Her er talan um, at brúkarin skal vera trúgvur og heiðurligur mótvegis upphavsmanninum. Tað er ikki í samsvari við góðan sið at sitera skeivt ella tilvitað at taka eitt sitat úr sínum rætta høpi og harvið brongla røttu meiningina. At sitera rætt og at verða siteraður rætt, er tað einasta, sum vekir álit.*

*Ein sitering kann innlimast í eitt annað verk av tí, ið siterar. Tó eru avmarkingar, soleiðis at tað t.d. ikki ber til at útgeva eitt savn av sitatum ella brotum av tónleikaløgum til eitt lagatyssi, uttan við loyvi frá upphavsmanninum.*

*Eingin regla er um rættin at greiða frá ella umrøða vard verk. Orsøkin er, at hugskot til eitt verk ella høvuðsinnihaldið í einum verki, ikki er vart av upphavsrætti. Tað er m.a. loyvt at endurgeva tíðindi í eini frágreiðing ella at gera eitt savn ella ein dátugrunn við tíðindastubbum. Somuleiðis er loyvt at gera samandrátt av einum bókmentaverki at leggja í dátugrunn.”*

**Til § 23 – Sitering og endurgeving í vísindaligum høpi**
Ásetingin fevnir um almannakunngjørd listaverk og frágreiðandi og upplýsandi verk sambært § 1, stk. 2. Ásetingin skal lesast saman við vanligu sitatregluni í § 22. Sum meginregla skulu fevndu verkini endurgevast í síni heild. Tó kann tað allarhelst loyvast at endurgeva brot av nevndu verkum, um so er, at droit-moral rætturin sambært § 8 verður virdur. Tað er ein treyt, at verkini verða endurgivin í sambandi við ummæli (kritik) ella í sambandi við vísidaliga lýsing ella tulking saman við tekstinum. Í hesum sambandi er endamálið við tekstinum tað avgerandi.

Stk. 2 ásetir, at almannakunngjørd listaverk kunnu endugevast við umrøðu av gerandishendingum í avísum og tíðarritum, tó eru listaverk, ið eru framleidd við atliti at endurgeving í avísum ella tíðarritum, eitt nú blaðtekningar, fjølmiðlamyndir, ella myndir frá sjónvarpsskíggja frá tíðinda- og aktualitetssendingum, ikki fevnd av ásetingini. Í mun til stk. 1 er tað ikki ein treyt, at endurgivna listaverkið verður endurgivið saman við tekstinum.

Ein gerandishending er allarhelst, um hendingin er av heilt serligum slagi og hevur ein ávísan tíðindaáhuga, t.d. ein fernisering ella nýggjársrøða løgmans.

Í UfR1970.707Ø var talan um eina serliga gerandishending av ávísum tíðindaáhuga, tá ið ein nakin kvinna bleiv avmyndað á gólvinum í danska virðisbrævamarknaðinum.

Í einum norskum dómi NIR1996.358 var tað ikki ein nóg serlig gerandishending at almannakunngera myndir av børnunum hjá einum kendum norskum hjúnum.

Sum undantak nevnir stk. 3, at útgivin listaverk ella eintøk av einum slíkum, ið eru avhendað, kunnu endurgevast, tá ið endurgevingin ikki er tað berandi. Hetta merkir, at endurgevingin skal vera av meiri tilvildarligum slagi ella hevur lítið og einki at siga í tí ítøkiliga høpinum.

**Til § 24 – Endurgeving í kunnandi tilfari um sølu og líknandi**
Ásetingin gevur atgeingi til fría nýtslu av listaverkum í listaskráum. Sum listaverk sambært hesi áseting eru listaverk sum myndlist, brúklist, byggilist og fotolist. Tó er stk. 3 bert galdandi fyri byggilist. Tað stendur ikki í ásetingini, at verkið skal vera almannakunngjørt, men tað er helst galdandi, tí endurgeving er treytað av, at listaverkið er útgivið og harvið almannagjørt. Ásetingin loyvir útgávu av skráum yvir listaverk, sum eru partur av virkseminum hjá eitt nú søvnum, framsýningum, listaskálum og á listamarknaði, har listaverk verða seld. Harumframt heimilar 2. pkt. endurgeving av listaverkum í fráboðanum um framsýning, eitt nú í framsýningarlýsingum. Høvuðsendamálið er sostatt at tryggja kunningartilfar um framsýning, sølu og líknandi. Ein vanlig plakat hevur ikki neyðturviliga eitt tílíkt kunnandi endamál, og er endurgeving við tí endamáli at selja plakatina ikki fevnt av ásetingini við teirri fylgi, at samtykki krevst frá upphavsmanni til tílíka sølu. Skiljast skal sostatt millum kunnandi endamál og vanligt handilsligt endamál.

Ein skrá inniheldur ta neyðugu kunningina um innihaldið í t.d. einari framsýning. Talan skal vera um nakað, ið verður útgivið og selt ella givið/lutað burtur við tí endamáli at kunna um eitt nú framsýningina. Um talan er um skráir, ið líkjast meiri listabókum, eru hesar ikki fevndar av ásetingini. Í sovorðnum føri skal kannast, í hvønn mun greinar og tekningar v.m. rúma meiri enn skráin í sær sjálvum. Í dóminum UfR2000.1291Ø bar plakatin ”Louisiana Revy” meiri brá av einari listabók enn einari skrá.

Sambært 2. pkt. skal endamálið vera at lýsa fyri einari ítøkiligari og aktuellari framsýning v.m., sbr. í hesum sambandi omanfyri standandi dóm UfR 2000.1291Ø. Tað er líkamikið fyri brúki av ásetingini, hvør tøkni verður brúkt í sambandi við eina tílíka lýsing.

Stk. 2 er treytað av, at eitt listaverk er varandi sett upp við almennan veg, ella har tað varandi er atkomuligt fyri almeninginum, og sostatt ikki, har listaverkið er sett upp á privatum vegi, har tað krevst gjald fyri at koma inn, sbr. UfR2000.1291Ø.

Viðvíkjandi tí at vera høvuðsevnið í myndini, segði meirilutin í Hægstarætti í dóminum UfR2001.1691H: ”Afgørelsen af om kunstværket er hovedmotivet, … beror på en samlet vurdering af det helhedsindtryk, som selve billedet giver af den sammenhæng, hvori billedet er anvendt, og af anledningen til, at kunstværket er medtaget på billedet.” Í ítøkiliga førinum var talan um eina sparikassa-skrá, har lutvíst nøkur starvsfólk vórðu avmyndað, og lutvíst ein skulpturur á almennum stað. Hægstirættur metti, at skulptururin var bert ein minni partur av myndini.

Sambært stk. 3 kunnu bygningar sum meginregla frítt avmyndast, tó við virðing fyri tí ideella rættinum sambært § 11 í lógini, og avmyndan av summum bygningum kann eisini koma í stríð við upphavsrættin hjá arkitektum sambært § 1, stk. 1, har listaverk kann vera vart sum byggilist uttan mun til, hvussu ella í hvørjum sniði verkið verður skapað.

**Til § 25**
Ásetingin viðvíkur aftaluloyvi við góðkendan felagsskap, tá ið talan er um almannakunngjørd listaverk og møguleika at leggja málið fyri semingsmann.

**Til § 26 – Tíðindafrásøgn frá gerandishendingum**
Ásetingin gevur loyvi til uttan samtykki frá upphavsmanni at endurgeva verk elektróniskt, á filmi, útvarpi, sjónvarpi v.m. í tann mun endurgevingin av einum vardum verki er ein natúrligur partur av gerandishendingini.

**Til § 27 – Alment kjak**
Ásetingin er umorðað, men er stórt sæð innihaldsliga óbroytt og svarar til § 23 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

“*Heimildin í hesi grein gevur møguleikan frítt at endurgeva frá tingfundum, bý- og bygdarráðsfundum og frá fundum hjá øðrum almennum myndugleikum, t.e. rættarfundum og almennum fundum, sum verða fyriskipaðir at viðgera almennar spurningar. Við almennar fundir verður í hesum sambandi hugsað um fundir, sum samstundis eru politiskir og fólkaupplýsandi, og har almenningurin kann luttaka. Ein politiskur kjakfundur er fevndur av hesi grein, meðan ein prædika ikki er fevnd av hesi grein.*”

**Til § 28 - Innlit**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 24 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó er skoytt uppí, at avrit av privatum savnskjølum ikki mugu avritast. Talan kann eitt nú vera um skjøl hjá privatum, ið aldrin eru útgivin. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru annars endurgivnar niðanfyri:

“*Greinin loyvir yvirskipað, at verk verða nýtt sambært lógini um innlit í fyrisitingina og um innlit í savnsskjøl.*

*Stk. 1. Ásetingin í hesi grein merkir, at upphavsrætturin víkir fyri einhvørjum slag av umbøn um skjalainnlit sambært lógini. Tann, sum biður um innlit, hevur sostatt krav uppá hetta, eisini hóast verkið verður vart sambært hesi lóg. Innlitið kann verða givið sum avrit, ljósrit, til gjøgnumgongdar e.a. Ásetingarnar um meirinnlit eru eisini galdandi. Reglurnar eru bæði galdandi fyri fyrisitingarmyndugleikar og dómstólar. Dómstólar fevna um vanligu dómstólarnar (Føroya rætt, landsrætt og Hægstarætt). Tað merkir, at skjøl, sum eru løgd fyri dómstólarnar, sakarmálsskjøl og rættarrit frítt kunnu koma undir reglurnar um innlit sambært Rættargangslógini ella aðrari lóggávu uttan mun til upphavsrættarverjuna.*

*Stk. 2. Lógin um upphavsrætt er ikki forðing fyri, at atgeingi verður givið til skjøl, sum eru avhend til eitt alment skjalasavn, tó við teirri treyt, at ásetingarnar í skjalasavnslógini um atgeingi verða hildnar. Tá talan er um privat savnindi, kann loyvi verða givið til gjøgnumgongdar á staðnum, ella til útflýggjan sambært avtalu við ánara av skjølunum. Stk. 3. Innlit fevnir bæði um almannakunngjørd verk og verk, ið ikki eru almannakunngjørd.*

*Innlit í skjøl ella savnindi, ið ikki eru almannakunngjørd, verður ikki mett sum ein almannakunngering í sær sjálvum. Tann, ið fær innlit, hevur bert loyvi til hetta ávísa innlit og*

*ikki til at taka nýggj avrit ella annað, uttan so at heimild er til tess í øðrum ásetingum, ella loyvi er fingið í avtalu við upphavsmannin. Hesar ásetingar eru vanliga treytaðar av, at verkið hevur verið almannakunngjørt.*"

**Til § 29 – Nýtsla av vardum verkum í umsitingini**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 25 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Heimildin í hesi grein gevur møguleikan at endurgeva verk í sambandi við rættarmál og mál, sum verða viðgjørd í almennum nevndum, tað er ikki ein treyt, at tilfarið áður hevur verið alment frammi. Í ávísum rættarmálum kann tað verða neyðugt at ljósrita úr vardum verkum, sum yrkisbókmentum, tekningum, myndum og dagbókum. Sama kann hugsast í sambandi við sjónbandaupptøkur, sjónvarpssendingar o.s.fr. at brúka í einum rættarhøli.*"

**Til § 30 - Broyting í bygningi og brúklutum**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 26 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Eigari av bygningi kann broyta bygningin uttan at spyrja seg fyri hjá upphavsmanni. Henda rætt hevur eigarin, eisini hóast tað sannlíkt hevði gjørt seg inn á "droit moral" hjá arkitektinum. Fyri at broyting lógliga kann gerast á bygningsverk, skulu hesi krøv vera lokin: 1. broytingin er orsakað av tøkniligum fyriliti ella, 2. broytingin er orsakað av praktiska brúkinum av bygninginum. Tað er ikki ein fortreyt, at broytingin er neyðug, men broyting, sum einans verður gjørd av estetiskum orsøkum, er ikki heimilað í hesi grein.*

*Upphavsmaður kann ikki forða fyri, at bygningsverk verður oyðilagt ella tikið niður.*

*Eisini bygningsverk, so sum brýr, skip og líknandi eru fevnd av hesi áseting.*

*Sambært stk. 2 kunnu nýtslulutir verða broyttir, uttan at upphavsmaður skal geva loyvi. Her eru eingi krøv til endamálið við broytingini. Tá metast skal um, hvørt okkurt er nýtslulutur ella ei, kann rættarstøðan í grannalondunum takast við í metingina. Tað verður í hvørjum einstøkum føri talan um eina ítøkiliga meting.*"

**Til § 31 - Kringvarp**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 22 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Sendiloyvi verða javnsett, soleiðis at allar kringvarpsstøðir kunnu senda tilfar, sum er útgivið, tá ið avtala um viðurlag við upphavsrættarfelagsskap fyriliggur.*

*Tað er ein treyt, at avtala fyriliggur við upphavsrættarfelagsskap, sum sær til, at viðurlag verður afturborið teimum, sum eiga upphavsrættin til tilfarið ella sendingarnar, sum sendar verða í kringvarpi. Av tí, at rætturin til pall- og filmsverk verður fingin til vega við serligari avtalu, er hesin ikki fevndur av ásetingini.*

*Stk. 2. Neyðugt er við serligari áseting um egna framleiðslu hjá Kringvarpi Føroya, um verkið*

*inniheldur vart tilfar, t.d. tónleik, sum viðurlag skal gjaldast fyri.*

*Avtalur um viðurskifti sambært hesum stykki skulu virða møguligar avmarkingar í mun til rættindini hjá upphavsmonnum, sum kunnu verða fingin til vega í serstakari avtalu ella í sáttmála um starvsviðurskiftini hjá teimum, sum eru við til at gera framleiðsluna. Talan kann vera um avtalu ella sáttmála um at virka í sending, har atlit verður tikið at framtíðar endursending o.l.*

*Ásetingin er avmarkað til endursending og atgongd á t.d. alnetinum. Ásetingin fevnir um øll verk, sum Kringvarp Føroya hevur framleitt. Tað er ein treyt, at verkini hava verið send í Kringvarpinum, og tí eru ikki-almannakunngjørd verk ikki fevnd av ásetingini.*

*Sendingar, sum Kringvarp Føroya hevur framleitt, t.e. egin framleiðsla, skal skiljast breitt og fevnir eisini um framleiðslu, sum Kringvarpið hevur bílagt frá øðrum til at senda í Kringvarpinum. Í hesum viðurskiftum er avgerandi, at Kringvarpið hevur fíggjað framleiðsluna av sendingini heilt ella partvís. Filmar, sum eru gjørdir til framsýning í biohøll, koma ikki undir ásetingina.*

*Við ásetingini verður eisini givið Kringvarpi Føroya loyvi at gera eintøk av verkunum, sum eru neyðug í sambandi við, at atgongd verður givin til verkini á alnetinum ella á annan hátt, har almenningurin kann fáa atgongd til verkini á sjálvvaldum staði og til sjálvvalda tíð.*

*Orsøkin til, at ásetingin er galdandi fyri verk, sum eru framleidd, áðrenn lógin kom í gildi, er, at tað er serliga viðkomandi fyri eldri tilfar, sum er í varðveitslu í savni Kringvarpsins. Roknað verður við, at Kringvarp Føroya skipar hesi viðurskifti við avtalum, har fyrilit verður havt fyri, at ætlanin er at endursenda og gera atkomulig tey verk, sum starvsfólk og onnur gera fyri Kringvarpið. Í mun til viðurlag fyri sendingar, sum verða framleiddar í framtíðini, so verður tað latið upp til kringvørpini og starvsfólk (ella avvarðandi fakfelag) at gera avtalu um viðurlag fyri endursendingar.*

*Í ávísum føri kann upphavsmaður seta bann fyri, at verkini verða nýtt. Tað er ein treyt, at bannið verður sett persónligt og einsæris mótvegis kringvarpinum, og at heitið á verkinum verður upplýst. Hetta merkir, at eitt nú forløg, felagsskapir o.l. ikki kunnu seta bann fyri nýtsluni uttan við ítøkiligari heimild frá upphavsmanninum.*

*Reglur um goymslu av tilfari í kringvarpi kunnu verða viðkomandi, um long tíð gongur frá upptøku til sending. Reglur um hesi viðurskifti verða gjørdar samsvarandi tørvinum hjá kringvørpum, tó soleiðis at upphavsrætturin altíð verður virdur. Reglurnar hava einans tað endamál, at kringvarp ikki skal innheinta loyvi, tá ið verk verða goymd av tøkniligum ávum og er treytað av, at kringvarp hevur loyvi at senda verkini. Reglurnar fara at fevna um allar kringvarpsstøðir, ikki einans ta almennu, men eisini tær, sum kringvarpa við sendiloyvi sambært kringvarpslógini og umvegis fylgisvein.*

*Ásetingin um kunngerð um útflýggjan av tilfari skal lesast í framhaldi av ásetingunum í § 12 um eintøk til egið brúk. Endamálið við ásetingini er at fáa til vega eitt upphavsrættarligt lógargrundarlag, soleiðis at man framvegis kann útflýggja upptøkur kringvarpsins í avmarkaðari nøgd. Útflýggjast kunnu bara egnar útvarps- og sjónvarpssendingar. Bara avrit av*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*verkum, ið hava verið send á umrøddu kringvarpsstøð kunnu útflýggjast. Ein kringvarpsstøð kann ikki útflýggja upptøkur av sendingum, ið bara hava verið sendar á øðrum kringvarpsstøðum. Tað er heldur ikki sambært hesi grein loyvt at útflýggja útvarps- og sjónvarpstilfar, sum ikki hevur verið sent. Í hesum sambandi hevur tað ongan týdning, hvør hevur gjørt tilfarið – ein kringvarpsstøð kann tí eisini útflýggja upptøkur av sendingum, sum ein framleiðslufyritøka ella onnur kringvarpsstøð hevur gjørt. Upptøkan skal vera gjørd við kringvarpsins egnu tólum. Útvarps- og sjónvarpsupptøkur kunnu bara útflýggjast eftir áheitan, t.e. at talan er um bílegging av tilfarinum.*”

**Til § 32 – Miðlan av útgivnum tilfari**
Ásetingin er nýggj og gevur loyvi til, at almenni public service-stovnurin, Kringvarp Føroya, kann endurnýta sítt egna miðlasavn til eitt nú endursendingar og at leggja sendingar á netið í tann mun, at Kringvarpið hevur gjørt avtalu við avvarðandi felagsskapir, ið fyrisita øll tey rættindi, ið eru knýtt at sendingum. Loyvið fevnir ikki bert um rættindini hjá upphavsmanninum, men eisini rættindini hjá útinnandi listafólki, ljóð- og myndaframleiðarar, framleiðarar av skráum v.m. Orðingin ”…partur av framleiðsluni hjá Kringvarpi Føroya” fevnir eisini um sendingar, sum Kringvarp Føroya hevur bílagt við tí endamáli at senda í útvarpi ella sjónvarpi. Í ivamálum um ein sending sambært ásetingini er partur av framleiðsluni hjá Kringvarpi Føroya, er tað avgerandi, hvørt framleiðslan heilt ella lutvíst er fíggjað av Kringvarpi Føroya.

**Til § 32 a – Fyribils upptøkur**
Ásetingin svarar til tað, ið er galdandi í Norðurlondum og til § 31 í donsku upphavsrættarlógini. Kringvarpsstøðir kunnu upptaka verk til seinni nýtslu í sendingum. Í Danmark hevur rættarvenja víst, at hesin rætturin ikki er tíðaravmarkaður, og at viðurlag ikki skal rindast fyri hesar fyribils og tilvildarligu upptøkurnar.

**Til § 33 - Kjaksendingar**
Ásetingin viðvíkur atgeinginum at endurgeva kjaksendingar, og ásetingin er sambært rættarpraksis í Hægstarættardómi í UfR1981.24H neyvan avmarkað til einans at umfata egið ískoyti. Vísandi til omanfyri standandi Hægstarættardóm bleiv ljóðsíðan av eini sjónvarpssending mett at liggja innan fyri karmarnar av donsku § 32. Talan var um viðgerð av ymiskum spurningum viðvíkjandi skúlum, har samrøða var hildin við lærarar og næmingar á einum ávísum skúla blandað við ymiskum undirhaldi.

Umframt sendingar, har spurningar av almennum áhuga verða viðgjørdir eitt nú í kjaksendingum í sjónvarps- ella útvarpsstovuni, fevnir ásetingin um sendingar av meiri breiðum slagi. Hinvegin eru tíðinda- og aktualitetssendingar v.m. ikki fevndar av ásetingini.

**Til § 34 – Útflýggjan av upptøkum**
Umframt Kringvarp Føroya fevnir ásetingin um allar føroyskar fjølmiðlar, ið senda útvarpssendingar ella sjónvarpssendingar. Sambært ásetingini kunnu einans upptøkur av egnum útvarpssendingum ella sjónvarpssendingum útflýggjast. Tað er uttan týdning, hvør ið hevur framleitt sendingina.

Orðingin ”eftir áheitan” merkir, at talan skal vera um eina bílegging. Talan skal vera um eina frammanundan einsæris áheitan frá tí persóni, ið vil hava viðkomandi sending útflýggjaða. Talan

skal vera um privatar persónar ella persónar, sum starvast á stovnum ella virkjum treytað av, at minst ein av fylgjandi treytum er lokin:

1) viðkomandi hevur verið við í sendingini ella
2) viðkomandi kennir seg eyðmýkt(-an) av viðferð ella umrøðu í sendingini

At hava verið við í sendingini skal allarhelst skiljast sum einhvør persónur, ið sum upphavsmaður, útinnandi listafólk e.l. hevur givið sítt íkast til sendingina, ella sum á annan hátt hevur verið við í sendingini eitt nú gjøgnum samrøðu, vangamynd e.l.

Hugtakið ”eyðmýkt” verður hugsað sum tey føri, har persónur er fyri ónáðum ella kennir seg ærumeiddan, og hugsað verður um tey føri, har persónur hevur rímiliga orsøk til at halda, at hansara upphavsrættindini verða eyðmýkt í ella gjøgnum sendingina.

Hugtakið ”umrøðu” sipar ikki bert til munnliga umrøðu men harumframt til skrivliga umrøðu, myndatalu ella á annan hátt, har tað kann revsast sambært revisrættarligum reglum um eitt nú ærumeiðing.

Fjølmiðlar og krinvarpsstøðir kunnu allarhelst eisini krevja, at goldið verður fyri tær faktisku útreiðslurnar, ið standast av, at sendingar verða margfaldaðar og útflýggjaðar sambært hesi áseting.

Privatir persónar kunnu bert brúka sendingarnar til egið brúk samsvarandi § 12 í lógini, og persónar í stovnum ella virkjum kunnu einans brúka sendingarnar innanhýsis sambært § 14 í lógini.

**Til § 35 – Serlig áseting um útvarp og sjónvarp**
Tað er ánarin av kaðalkervinum, ið hevur ábyrgdina av at avgreiða viðurlagið við góðkendan felagsskap. Í hesum føri er í løtuni talan um Copydan Verdens TV og KODA. Síðani kann ánarin avgreiða gjaldið við tey húski, ið eru knýtt at kervinum. Tá ið rætturin at senda eitt verk kann gerast við kringvarp ella annan fjølmiðil, fevnir avtalan ikki neyðturviliga um at víðarisenda tilfarið.

Sum undantak til stk. 1 ásetir stk. 2 eitt mark á tvær ella færri samanbindingar uttan at gjalda viðurlag, sum er eitt slag av bagatelmarki, soleiðis at tað slepst undan óneyðugum sakarmálum millum rættindahavarar og brúkarar, har samanbinding er gjørd millum tvær íbúðir ella tvey grannahús. Sambært stk. 3 liggur ábyrgdiná ánaranum av kervinum, t.e. tann, ið veruliga og løgfrøðiliga hevur ræði á kaðalkervinum.

Ásetingarnar í stk. 4-6 hava til endamáls at víðka um ásetingina í stk. 1, tá ið talan er um samstundis og óbroytta víðarispjaðing av útvarps- og sjónvarpssendingum umvegis kaðalkerv og annað, har útvarps- og sjónvarpssendingar verða sendar eitt nú tráðleyst til eisini at fevna um ”on demand” nýtslu og aðrar hættir at endurgeva innihaldið av útvarps- og sjónvarpssendingum.

Ætlanin er ikki, at støðir kunnu velja einstakar sendingar, og sostatt kunnu tær ikki sjálvar velja innihaldið í útboðnum hjá kringvarpsstøðum. Slíkt er fevnt av teimum vanligu upphavsrættarligu reglunum gjøgnum samtykki frá rættindahavarum til verkini. Ætlanin er eiheldur, at ásetingarnar

skulu heimilað likamligari framleiðslu av eintøkum, sjálvt um framleiðslan av eintøkum verður framd í tíðarsamanhangi, soleiðis sum tað er orðað í ásetingini, eins og talgild søla av útvaldum sendingum ikki er fevnt av ásetingini.

Við tíðarsamanhang skal skiljast at gera verk tøk fyri almenninginum ”on demand” innan eitt ítøkiligt avmarkað tíðarrúm eitt nú ”catch-up”. Hetta tíðarrúm er upp til avtalupartarnar at taka nærri støðu til. Í Danmark er samsvarandi áseting í donsku § 35, stk. 4-6.

**Til § 36 – Dátugrunnar, telduforrit o.l.**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 27 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

“*Henda áseting skal lesast við ásetingini um avritan til privata nýtslu í huga. Samanber § 16 um eintøk til privata nýtslu.*

*Høvuðsreglan er, at tað einans er tann, ið er hevur rætt at nýta telduforritið, ið kann avrita og broyta tað. Nýtslan er einans loyvd, um hon er neyðug fyri at brúka telduforritið til ætlaða endamálið, t.e. í sambandi við vanliga koyring av forritinum, til gerð av trygdareintøkum og kanning av hugskotum o.l.*

*Møguleikin ella atgongdin at gera eintøk sambært hesi grein er sostatt meira avmarkaður enn tá ið talan er um eintøk til egið brúk. Hinvegin fevnir ásetingin um broytingar og er ikki einans galdandi fyri likamligar persónar, men eisini løgfrøðiligar persónar ella eindir. Hugtakið telduforrit fevnir bæði um forrit í skrivligum sniði og um forrit í talgildum sniði. Víkjast kann ikki frá rættinum við avtalu.*

*Greinin fevnir eisini um dátugrunnar, men ikki um onnur verk í talgildum sniði. Sí tó § 15 um fyribilseintøk, ið eru tilvildarlig, óvikandi og umrøðandi tøkniliðir, og sum hava sum endamál at gera eitt millumlið ført fyri at senda tilfar ella at nýta tilfar*.”

**Til § 37 – Týðing av kotum og samkoyring**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 28 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

“*Henda áseting gevur møguleika at “dekompilera” ella avrita teldutøka lutin í einum telduforriti og at umseta henda til skrivaða keldu við tí endamáli at granska telduforritið. Í vanligari talu verður hetta nevnt “reverse engineering”. Samkoyring verður nýtt, tá fleiri lutir skulu samsvara í eini telduskipan, eisini lutir frá ymiskum verksmiðjum. Teir skulu kunna samskifta við at lata hvørjum øðrum upplýsingar og saman gera brúk av upplýsingunum uttan mun til, um bundið verður saman millum tveir ritbúnaðir, ein ritbúnað og ein tólbúnað ella tveir tólbúnaðir.*

*Orsøkin til hesa áseting er, at útbúnaður frá ymiskum telduframleiðarum ofta nýtir ymiska tøknilýsing, sum ger tað trupult hjá brúkaranum at nýta telduskipanina. T.d. kunnu ein telda og eitt telduforrit frá ymiskum framleiðarum ikki altíð samskifta, og tá er útbúnaðurin ikki samkoyriligur.*

*Onnur orsøk til ásetingina er, at ein framleiðari kann hava slíka ráðandi støðu á marknaðinum, at brúkaraøki, sum hesin framleiðarin setir, verða fyrisett mál, sum aðrir framleiðarar verða noyddir at nýta fyri at kunna kappast við vøruna hjá hesum framleiðaranum. Tað merkir, at aðrir framleiðarar skulu kenna hugskot og grundreglur aftan fyri brúkaraøkið í telduni ella telduforritunum til tess at kunna framleiða sjálvstøðugan útbúnað.*

*Hugskot og grundreglur eru ikki vard upphavsrættarliga, tað er einans skapanin, sum verður vard.*

*Tað er ein treyt, um farið verður fram sambært hesi áseting, at dekompileringin er ein fortreyt fyri at fáa atgongd til upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at telduskipanir kunnu samskifta. T.d. kann ásetingin ikki nýtast, um framleiðarin hevur gjørt eitt handrit við øllum teimum neyðugu upplýsingunum, og hetta handrit er atkomuligt hjá tí, sum ynskir upplýsingarnar.*

*Stk. 2 eru avmarkingar í nýtsluni av teimum upplýsingum, sum framleiðarin hevur fingið til vega vísandi til stk. 1. Avmarkingar kunnu vera vísandi til aðra lóggávu, og til ber eisini hjá skaparanum av forritinum at seta krøv um, at nýtsla fer fram, sum ásett í lógini. Brúk, sum er í andsøgn við ásetingina, verður roknað sum ólóglig nýtsla.*

*Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 kunnu ikki verða fráskrivaðar í avtalu. T.e. at avtala, sum ikki gevur eigara av telduforriti, sum annar hevur skapað, tann rætt, sum er ásettur her, verður mett ikki at hava gildi.*"

**Til § 38 – Fylgirættarviðurlag**
Ásetingin samsvarar við art. 14 *ter* í Bern-sáttmálanum, og hon fevnir serliga um myndlist, ið verður endurseld á listamarknaðinum. Tó kann brúkslist og fotolist eisini vera fevnt av ásetingini, meðan fotomyndir vardar sambært § 48 ikki eru fevndar.

Ásetingin inniber, at upphavsmaðurin hevur ikki rætt til fylgirættarviðurlag, tá ið hann selir verkið fyrstu ferð. Bert víðarisøla av listaverkum undir teimum treytum, ið lógargreinin ásetir, er fevnd.

Tann, ið arbeiðir á listamarknaðinum, hevur skyldu at rinda fylgirættarviðurlagið. Talan er um verk, ið eru gjørd í einum ella fáum eintøkum. Rætturin kann ikki avhendast og rætturin gongur í arv sambært arvalóggávuni Ásetingin er broytt, og kunngerðin um fylgirættarviðurlag verður tikin av við hesi lóg. Í mun til kunngerðina eru ásetingarnar í stk. 3-6 og stk. 9-11 strikaðar úr, tí hesar eru tryggjaðar í rættarvenju, sum tískil ikki noyðist at standa í lóggávuni.

**Til § 39 – Felags umsiting av viðurlagi**
Ásetingin er óbroytt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Fólkini, sum arbeiða við listini, kalla vit listafólk, men í hesari lógini eru tey upphavsmenn, sum hava upphavsrættindi til tað, tey gera og skapa. Nógvastaðni taka hesi fólkini seg saman í stór og smá feløg, sum m.a. hava sum endamál at verja rættindini hjá teirra limum, hjá listafólkunum.*

*Til tess at standa enn meira saman, er tað ikki óvanligt, at smá listafeløg taka seg saman og skipa eitt felag, ið yvirskipað samskipar áhugamálini m.a. innkrevjing og afturbering av viðurlagi fyri nýtslu av vardum verkum.*

*Higartil hava bæði Mentamálaráðið og føroysku upphavsrættindarfeløgini samstarvað nógv við útlendskar, serliga danskar fyritøkur, sum hava hjálpt til við tí umsitingarliga partinum, nevnast kunnu felagsskapir sum Koda, Gramex, Copydan, Filmex o.s.fr.*

*Sambært hesi áseting er upphavsrætturin rætturin til viðurlag fyri nýtslu av verkinum hjá upphavsmanninum. Tað er ógvuliga viðkomandi, at hesin upphavsrættur verður virdur. Talan er um viðurlag, sum verður afturborið sum "løn" fyri at hava skapað verkið. Tað eru lívskorini hjá listafólkum, tað snýr seg um.*

*Hesin kapittul kemur at fevna um øll økini, har rindast skal viðurlag fyri nýtslu. Tað merkir, at allir felagsskapir koma at søkja um loyvi at umsita upphavsrættargjøldini við heimild í hesum kapitli. Øll loyvi verða givin sambært hesum treytum og krøvum. Hetta verður broyting í mun til verandi skipan, har onkur felagsskapur virkar sambært orðaljóðinum í lógini og ikki nýtist at hava loyvi ella góðkenning til virksemið.*

*Ásetingin staðfestir rættin til viðurlag, og at upphavsmaður kann lata felagsskap krevja síni gjøld inn.*"

**Til § 40 – Felagsskapur, sum umboðar upphavsmenn**
Ásetingin er í ávísan  mun óbroytt, men nú eru treytirnar fyri reglur og loyvi sett í lógina, tá ið felagsskapur skal virka við tí endamáli at gera avtalur við brúkarar um vard verk.

Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Henda greinin ásetir, at felagsskapur skal hava loyvi frá landsstýrismanninum til virksemi sambært lógini. Felagsskapurin søkir um loyvi, har skjalprógv verður lagt við, sum vísir, at felagsskapurin umboðar upphavsmenn til ávísa listagrein, og at hesir hava samtykt, at felagsskapurin skal røkja áhugamálini samsvarandi lógini.*

*Seinasta punktumið í ásetingini snýr seg um treytir fyri loyvinum. M.a. kann landsstýrismaðurin krevja, at fleiri feløg sláa seg saman. Metir Mentamálaráðið, at skilagott hevði verið, at feløg vóru saman um umsitingina, kann avgerð verða tikin um, at hesi virka saman. Støðan kann t.d. koma í, um eitt minni felag av onkrari orsøk ikki er partur av eini natúrligari størri eind. Er felagið so lítið, at einki kemur burturúr, um felagið sjálvt stendur fyri innkrevjing og afturbering, kann vera skilagott at leggja saman við størri innkrevjingareind.*

*Aðrar treytir í loyvinum kunnu t.d. vera, at afturberingin ella býtið av innkravdu upphæddunum fer fram á ein gjøgnumskygdan hátt, at kostnaðurin fyri umsiting ikki er størri enn rímiligt í mun til ta uppgávu, felagsskapurin røkir.*

*Stk. 2. Felagsskapir, ið fáa loyvi at virka í Føroyum, skulu í flestu førum gera avtalu við brúkaran um nýtsluna av verkunum. Loyvið kann verða treytað av, at hesar avtalur verða*

*gjørdar á ávísan hátt og innihalda nøkur minstukrøv. Í umsókn um loyvi eigur at verða tilskilað, um tilfarið verður nýtt í kringvarpi, sent umvegis kaðal, fylgisvein ella alnet.*

*Neyvari reglur um hesi krøv verða ásett í kunngerð.*"

**Til § 41 - Avrokningartreytir**
Ásetingin ásetir nærri reglur um avrokningargrundarlagið hjá góðkendum felagsskapum. Ætlanin er, at felagsskapirnir av sínum eintingum skulu avrokna við sínar limir, meðan onnur, ið ikki eru limir í felagsskapinum, skulu gera sítt krav galdandi mótvegis felagsskapinum. Felagsskapinum verður heimilað at draga rímiligt umsitingargjald frá. Sum rímiligt avrokningargjald kann eitt nú nevnast gjald, ið fer av til vanligan rakstur av felagsskapinum.

**Til § 42 – Avtala um viðurlag fyri brúk av vardum verki**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 41 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó er stk. 3 tikið úr, tí mett verður, at tað skal vera upp til avtalufrælsið millum partarnar at avgera krøv til avtalur teirra millum. Harumframt er orðingin í stk. 1 endurskoða sum fylgi av, at donsku reglurnar vóru í ósamsvar við ES-reglurnar, sum Føroyar í ávísan hava innlima í okkara lóggávuverk. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru annars endurgivnar niðanfyri:

"*Henda áseting tekur útgangsstøði í brúkaranum, sum, áðrenn tann byrjar at brúka vard verk, skal hava avtalu við rættindahavaran um nýtsluna. Upphavsmenn og tey, ið hava rættin til vard verk, skipa seg í felagsskapum, sí § 40, og eru tað hesir felagsskapir, ið gera avtalu um nýtsluna av vardum verkum. Ein brúkari skal sostatt einans venda sær til ein felagsskap, til tess at fáa avtalu í lag um ætlaðu nýtsluna av ávísum verkslagi.*

*Er avtala ikki gjørd við tann felagsskapin, ið varðar av rættindunum hjá upphavsmonnunum, eigur upphædd at verða sett av við tí endamáli, at goldið verður, tá avtalan er gjørd. Hetta kann vera viðkomandi í onkrum føri, har lógin ásetir, at nýtslan er loyvd, og tað skal ganga skjótt fyri seg. Tað, sum umrøður, er, at upphavsmaður fær ta upphædd, tann hevur rætt til og krav uppá sambært skipanini í lógini.*

*Stk. 2. Ein avtala skal vera ítøkilig og snúgva seg um ávísa nýtslu av verkunum. Henda áseting gevur víðar ræsur, tá avtala verður gjørd. T.d. innan kringvarping, har framkomna tøknin gevur møguleika fyri nýtslu og goymslu av verkum, soleiðis at talan ikki verður um beinleiðis sending – møguleikar, sum geva brúkaranum útbúnað at steðga sendingini, goyma hana ella at byrja umaftur. Ein ítøkilig avtala loyvir eisini at avtala framtíðar nýtslu, t.d. endursending ella endurprenting av tilfarinum. Tá avtalan er gjørd, er loyvi fingið til vega, og brúkarin skal 'einans' rinda fyri avtalaðu nýtsluna.*"

**Til § 43 – Fyrning av viðurlagi**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 43 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í Bern-sáttmálanum eru ongar reglur um fyrning av viðurlagi. Í Danmark verður munur gjørdur á reglunum í sambandi við tvingsilsloyvi og avtaluloyvi. Mett verður ikki neyðugt, at vit í*

*Føroyum gera henda munin á loyvunum, og tískil verður heldur ikki gjørdur munur á fyrning av viðurlagi, sum felagsskapur ella upphavsmaður hevur krav uppá.*

*Talan er um 3-ára fyrningarfreist, sum annaðhvørt felagsskapur ella upphavsmaður hevur mótvegis einum brúkara av vardum verkum. Felagsskapur er álagdur at krevja inn viðurlag fyri upphavsmann uttan mun til, um upphavsmaðurin er limur í felagsskapinum. Fyri fyrningarfreistina er tað sama galdandi, at ein upphavsmaður hevur rætt til at seta fram sítt krav ímóti felagsskapinum við somu fyrningarfreist, sum felagsskapurin hevur, tá tann krevur inn frá brúkarum. Hetta er uttan mun til, um upphavsmaður er limur í felagsskapinum. Orsøkin er, at tað í veruleikanum er talan um eitt og sama krav, har felagsskapurin einans er millumlið.*

*3-ára fyrningarfreistin er frávik frá vanligu rættarstøðuni. Orsøkin til styttu fyrningarfreistina er, at ein longri freist fer at gera tað trupult fyri felagsskapir at fyrisita avrokningina. M.a. verður avroknað í hvørjum einstøkum føri sær til nógvar rættindahavarar, har felagsskapurin skal hava pening tøkan til ófráboðað krøv.*

*Fyrningarfreistin byrjar við ársenda av tí ári, har brúkið av varda verkinum fór fram.*

*Tað áliggur felagsskapi, sum krevur inn gjøldini, at royna at eyðmerkja teir upphavsmenn ella rættindahavarar, sum eiga peningin til góðar.*

*Tað hevur steðgandi virknað, um skrivlig boð verða latin brúkara, sum skyldar viðurlag. Tað sama ger seg galdandi, um upphavsmaður gevur felagsskapi boð, har viðkomandi eigur pening til góðar. Tað, at fyrning verður steðgað í einum liði, t.d. felagsskapurin mótvegis brúkaranum, merkir ikki, at fyrning eisini verður steðgað í mun til viðurskiftini millum upphavsmann/rættindahavara og felagsskap. Sjálvstøðug skrivlig boð eru neyðug í hvørjum einstøkum føri. Tá fyrning er steðgað, byrjar nýtt 3-ára fyrningarskeið.*”

**Til § 44 - Seming**
Ásetingin í stk. 1 er óbroytt, meðan ásetingarnar í stk. 2 og 3, vegna løgfrøðilig ivamál um heimildir, nú eru broyttar soleðis, at lógin nú greitt heimilar landsstýrismaðurin at seta ta kunngerð í gildi, ið upprunaliga var ætlað. Av tí at partarnir sjálvir skulu bera útreiðslurnar til semingsmannin, og semingsmannin skal takast við semjur av avtalulíknandi slagi, er hansara virksemi ikki at meta sum virksemi innan almenna fyrisiting, har hann tekur fyrisitingarlgiar avgerðir í í fyrisitingarligari málsviðgerð. Partarnir hava tørv á samráðingarfriði undir seming, og sostatt hevur almenningurin ikki rætt til eitt nú alment innlit í skjøl og upplýsingar hjá semingsmanni. Partarnir skulu kenna seg tryggar við at lata semingsmanni tilfar. Harumframt kunnu onnur saklig atlit tala ímóti, at alment innlit skal latast í slíkt tilfar.

Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru annars endurgivnar niðanfyri:

“*Talan er um broyting í mun til galdandi skipan, har rættarstøðan fram til yvirtøkuna var soleiðis, at ein nevnd (Ophavsretslicensnævnet) tók sær av teimum málum, sum vóru um ósemju um viðurlag. Semingsskipanin er tó ikki fremmand, tí hon er ásett í galdandi lóg § 52, tá ið talan er um samráðing um ávísar avtalur. Skipanin verður tó við hesum víðkað til at fevna um allar ósemjur í sambandi við nýtslu av vardum verkum, uttan mun til um talan er um avtalur ella lógarásettan rætt til at nýta vard verk og um upphavsrættargjøld fyri nýtsluna.*

*Stk. 2. Ásettar verða í kunngerð tær mannagongdir, sum skulu nýtast, tá ið ósemja stingur seg upp. Talan er um viðurskiftini, tá ið partarnir heita á Mentamálaráðið um at útnevna semingsmann, um at partarnir hava ávirkan á, hvør verður útnevndur semingsmaður og um heimildirnar hjá semingsmanninum.*

*Partarnir hava áhuga í at hava ávirkan á, hvør verður tilnevndur semingsmaður og hvørjar førleikar viðkomandi hevur. Eitt semingsmál fer tí sannlíkt at byrja við einari hoyring hjá pørtunum, soleiðis at hesir kunnu bera síni sjónarmið fram og eisini koma við uppskoti um, hvør persónur er best skikkaður at loysa uppgávuna.*

*Um heimildirnar hjá semingsmanninum kann sigast, at hesin fær rættin at loysa málið við seming, harundir at krevja, at felagsskapurin, nevndin el.líkn, sum hevur heimild at taka avgerð í spurninginum, fær málið fyrilagt. Talan kann t.d. vera um stýri ella nevndina fyri eina kringvarpsstøð, eitt savn ella ein stovn. Og talan kann eisini vera um umboðsráð el.líkn. hjá felagsskapinum, sum umboðar upphavsmenninar.*

*Heimildin hjá semingsmanninum skal eisini fevna um rættin at meta um og taka støðu til treytirnar, sum verða lagdar fyri tann, t.d. um hesar eru rímiligar í mun til ætlaðu nýtsluna av verkunum. Semingsmaðurin eigur tí at hava heimild til at taka støðu til treytirnar, soleiðis at partarnir kunnu fáa eitt útgangsstøði at gera avtalu á. Eisini skulu atlit takast til, at tað eigur ikki at verða ein forðing fyri at gera eina avtalu um brúk av vardum verki, at tað ikki fæst fatur á rættindahavaranum. Umstøðurnar verða líkar teimum, sum danska nevndin hevur, tá ið hon tekur avgerð í máli, soleiðis at ein avtala um nýtslu av vardum verkum kann verða inngingin.*

*Stk. 3. Partarnir bera sjálvir útreiðslurnar av semingsskipanini og hava ábyrgd av, at semingsmaðurin fær ta samsýning, sum tann krevur fyri at átaka sær uppgávuna. Partarnir hava samábyrgd av, at útreiðslurnar verða goldnar, tvs. at semingsmaðurin kann krevja fulla upphædd av øðrum partinum, um hin ikki rindar, sum avtalað. Tí kann vera skilagott at avtala frammanundan, hvussu upphæddin skal rindast og møguliga seta peningin á konto, meðan málið verður avgreitt.*"

**Til § 45 - Útinnandi listafólk**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 33 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Henda áseting hevur til endamáls at verja framførslur hjá útinnandi listafólki. Henda áseting hevur sambært Róm-sáttmálanum serliga týdning fyri sjónleikarar, sangarar, tónleikarar, dansarar og onnur, ið á palli føra fram, syngja, lesa upp, bera fram lista- ella bókaverk listarliga. Framførsla av verki hevur ikki við sær upphavsrætt til framførda tilfarið. Heldur verður framførslan sjálv vard, um hon lýkur treytirnar fyri verju. Treytirnar eru: 1) at tað framførda skal vera eitt listaverk ella bókmentaverk, og 2) tann framførandi má vera eitt útinnandi listafólk, tvs. at framførslan skal innan sína listagrein vera listarlig.*

*Tá metast skal, um framførsla av bókaverki verður vard eftir hesi grein, kunnu millum annað hesi metingarstøði verða tikin við í metingini: Hvat slag av verki talan er um (yrkis- ella fagurbókmentir), um upplesarin livir seg inn í tilfarið ella bara endurtekur tað, ið skrivað*

*stendur. Tað merkir t.d. at turrur upplestur av einum bókmentaverki ikki í sær sjálvum hevði verið nóg mikið, til at framførslan hevði fingið verju sambært hesi grein ella kunngerð við heimild í hesi grein. Sama ger seg galdandi fyri "slaviska" endurgeving av einum tónlistaverki.*

*Statistar og teknisk hjálparfólk í t.d. sjónleiki ella filmi verða ikki fevnd av hesi áseting. Teirra íkast til framførsluna verður í lógini ikki mett sum listarligt. Hinvegin, eru allir limir í kóri ella tónleikabólki, sum framførir tónlistaverk, at meta sum útinnandi listafólk og teirra partur av framførsluni verður tí fevndur av ásetingini.*

*Verjan eftir hesi áseting verjir m.a. móti upptøkum av sjálvari framførsluni, at sjálv framførslan verður gjørd tøk fyri almenninginum, at eintøk av upptøkum av framførsluni verða framleidd, at eintøk av upptøkum av framførsluni verða gjørd tøk fyri almenninginum. Eisini framførslur av verkum, sum ikki longur eru vard av upphavsrætti, tí gildistíðin er liðin, kunnu verða vardar eftir hesi grein.*

*Ásetingin verjir eisini ímóti, at framførslur verða upptiknar uttan samtykki frá teimum framførandi. Hetta hevur ta sjálvsagdu fylgju, at tað ei heldur er loyvt at útgeva ólógligar tónleikaupptøkur (bootleg-upptøkur). Á sama hátt sum tey framførandi kunnu nokta áskoðarum at taka framførsluna upp, so kann fyriskiparin av einum tiltaki eftir vanligum rættargrundreglum eisini nokta áskoðarum at taka framførsluna upp.*

*Helst størsti munur á reglunum á hesum økinum í hinum Norðurlondunum og føroysku lógini er, at vit hava valt at fara burtur frá skilnaðinum millum tvingsilsloyvi og avtaluloyvi. Í føroysku lógini, verður eitt loyvi at meta sum eitt loyvi. Og felagsskapur, sum er góðkendur til at krevja inn upphavsrættargjøld, kann virka innan fyri tað loyvið, felagsskapurin hevur fingið. Hesi loyvi til innkrevjing verða gjørd so ítøkilig, at eingin ivi er um, hvør felagsskapur krevur inn fyri hvat.*"

**Til § 46 - Framleiðari av ljóðupptøku**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 34 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Verjan eftir § 34 minnir um verjuna sambært § 33. Eftir hesi áseting verður framleiðarin av ljóðupptøkum vardur ímóti eftirgjørdum upptøkum, og at upprunaliga upptøkan verður gjørd tøk fyri almenninginum, tvs. almenn spjaðing ella framførsla av upptøkuni. Tað, ið verður vart eftir hesi grein, er 'fonogrammið'. Eitt fonogram verður í Róm-sáttmálanum allýst sum "enhver udelukkende for hørelsen beregnet optagelse af en fremførelse eller andre lyde" ella "exclusively aural fixation". Tann, ið verður vardur, er sambært sama sáttmála tann fysiski ella løgfrøðiligi persónurin, ið fyrst tekur upp ljóð frá eini framførslu ella onnur ljóð.*

*Verjan sambært hesi grein fevnir m.a. um upptøku av tónlistaverki, ljóðvirknaði (lydeffekt), samrøðu og djóraljóð. Tað er uttan týdning, hvønn miðil upptøkan er gjørd á, so ljóðbond, grammofonplátur, fløgur, harðdiskar eru øll javnsett á hesum økinum.*

*Hvørt upptøkan er talgild ella ei, er eisini uttan týdning. Bæði sløg av upptøkum eru vard. Eisini tær sonevndu stokkutu upptøkurnar eru vardar eftir hesi áseting. Hetta eru tær upptøkur, ið*

*verða gjørdar í miðlum til at lima inn í aðrar sendingar. Til dømis upptøkur av einari framførslu, sum skal nýtast sum brot í eini tíðindasending ella frásøgn.*

*Tað er sjálvandi bara upprunaliga upptøkan, ið verður vard. Ein margfalding av eini vardari upptøku, hevur ikki verju eftir hesi grein við sær fyri tann, ið hevur margfaldað.*

*Upptøkan verður vard móti eftirgerð á tann hátt, at tað t.d. ikki er loyvt at framleiða eintøk á fløgu, við at nýta tey bond, sum upprunaliga upptøkan varð gjørd á. Upptøkan verður tó ikki vard móti, at onnur herma eftir henni á egnari upptøku. At onnur kunnu herma eftir upptøkuni, hevur tó ikki við sær, at tey samstundis frítt kunnu brúka tey verk, ið eru við á upptøkuni. Hinar ásetingirnar í lógini verja framvegis tey verk, ið eru við á upptøkunum.*

*Helst størsti munur á reglunum á hesum økinum í hinum Norðurlondum og føroysku lógini er, at vit hava valt at fara burtur frá skilnaðinum millum tvingsilsloyvi og avtaluloyvi. Í føroysku lógini verður eitt loyvi at meta sum eitt loyvi. Og felagsskapur, sum er góðkendur til at krevja inn upphavsrættargjøld, kann virka innan fyri tað loyvið, felagsskapurin hevur fingið. Hesi loyvi til innkrevjing verða gjørd so ítøkilig, at eingin ivi er um, hvør felagsskapur krevur inn fyri hvat.*"

**Til § 46 a**
Ásetingin svarar til donsku § 68 um tvangsloyvi (tvangslicens). Eftir hesari áseting kunnu útgivnar ljóðupptøkur brúkast til almenna framførslu og kringvarping uttan samtykki, tó treytað av at viðurlag verður rindað.

Uttan hesa áseting, hevði verið neyðugt hjá øllum støðum, ið framføra tónleik alment, at fingið samtykki frá viðkomandi rættindahavarum fyrst. Tað hevði als ikki verið heilt ógjørligt. Hendan ásetingin verjir eisini brúkararnar frá at rættindahavarar seta fram krav um viðurlag beinleiðis til brúkaran.

**Til § 47 - Framleiðari av myndatøkum**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 35 i løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Eftir hesi grein verða rættindi hjá framleiðarum av livandi myndum, filmum og audiovisuellum verkum vard. Vanligar myndir verða ikki vardar eftir hesi grein, men í staðin eftir § 36. Ljóðsíðan av einum filmi verður heldur ikki fevnd av hesari áseting, men verður í staðin vard sambært § 34. Telduspøl verða heldur ikki fevnd av hesi áseting.*

*Hvat innihaldið av myndatøkunum er, hevur ongan týdning fyri verjuna. Tí verða myndatøkur javnt vardar uttan mun til, um talan er um upptøkur av náttúruni, ítrótti, films- ella amatørupptøkur. Og hvør upptøkumiðilin er, er eisini uttan týdning í hesum sambandi. Allir miðlar eru javnsettir í hesi lóg.*

*Verjan sambært hesi grein er ógvuliga lík verjuni eftir undanfarnu grein. Tað er bert upprunaupptøkan, ið verður vard. Eintøk, framleidd eftir upprunaupptøkuni, fáa onga serstaka verju.*

*Í kunngerð verður ásett nærri um gildistíð, hvørjar ásetingar í lógini eru galdandi fyri spjaðing, framførslur og upptøkur, viðurlag, avhending av rættindum og revsing fyri brot á reglurnar. Í kunngerðini verður, um neyðugt, møguleiki at taka fyrilit fyri serligum føroyskum viðurskiftum.*"

**Til § 48 - Framleiðari av fotomyndum**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 36 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Eftir hesi áseting verða vanligar myndir vardar. Eisini myndi,r sum ikki verða vardar sambært § 2 (t.d. orsakað av vantandi verkhædd), verða fevndar*

*Myndir kunnu sostatt verða vardar á tveir ymiskar hættir. Myndir við verkhædd verða vardar sambært §§ 2 og 36. Myndatakarin hevur rættindi sambært § 36 og upphavsmaðurin sambært § 2. Myndir uttan verkhædd, verða bert vardar sambært § 36. Og tá er tað myndatakarin, ið hevur rættindini. Sjálvt innihaldið í verjuni er í báðum førum tað sama.*

*Í Norðurlondum er í ásetingini um verju av framleiðarum av myndum eingin tilvísing til ásetingina um felagsverk. Tað verður mett at hava við sær, at bert ein persónur kann vera myndatakari. Støða er ikki tikin til, um henda rættarstøða er ynskilig. Fylgjan er, at fleiri upphavsmenn kunnu hava rættindi til somu mynd, sum er vard sambært § 2. Samstundis kann bert ein myndatakari hava rættindi sambært § 36. Hetta tykist ikki vera ein rættarstøða, sum hevur elvt til stórvegis ósemjur ella stríð. Tó verður helst tikið stig til at koma burtur frá hesari rættarstøðuni, tá kunngerðin verður skrivað.*

*Á sama hátt, sum í undanfarnu greinum, er tað bert upprunamyndin, ið verður vard. Eintøk, framleidd eftir upprunamyndini, fáa ikki serstaka verju sambært hesi áseting. Hetta er galdandi uttan mun til, hvussu eintakið verður framleitt, t.d. ljóstøka, ljóslesing ella mikrofotografering. Orsøkin til hetta er, at framleidda eintakið ikki er ein mynd samsvarandi hesari lóg.*

*Tað er ikki ein treyt, at myndin er framleidd við myndatøku. Eisini mynd, ið er framleidd á ein hátt, sum er samjavnur við myndatøku, verður vard. Hetta er m.a. grundfest í Bern-sáttmálanum art. 2, stk. 1. Eisini røntgenmyndir, innreyðar (infrareyðar) myndir, fylgisveinamyndir og almyndir (hologram) verða fevndar av hesi áseting. Elektróniskar flísir, ið kunnu framleiðast við einum slagi av fotografii, verða ikki fevndar av verjuni sambært hesi grein. Einstakar myndir í filmi verða eisini vardar sambært hesi grein. Filmar kunnu sostatt verða vardir sambært § 1, myndaupptøkurnar sambært § 35, og tær einstøku myndirnar sambært hesi grein. Er talan um upptøkur í sjónvarpsstovu, kann leikstjórin í ávísum førum vera at meta sum myndatakari.*

*Nýtsla av eini vardari mynd krevur loyvi. Loyvi krevst uttan mun til, um myndin er vard eftir § 2 ella § 36. Hevur myndatakari/upphavsmaður avmyndað eitt annað verk, verður nýtslan av myndini eisini tengd at loyvi frá upphavsmanni til verkið, ið er avmyndað. Myndatakarin kann ikki brúka myndina uttan samtykki frá upphavsmanninum at t.d. málninginum.*

*Verjan av myndum rakar eisini eftirgerðir av myndini. Tað ger seg galdandi, bæði hvat viðvíkur eftirgerð í myndaformi, og eisini at motivið á myndini verður flutt til tekning ella málning. Tó skal nevnast, at tess minni upprunalig myndin er, jú minni er verjuøkið.*"

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Til § 49 - Framleiðari av vørulista, dátugrunni v.m.**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 37 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Kunngerð við heimild í hesi áseting fer at lýsa verjuna hjá vørulistum, dátugrunnum og líknandi nærri. Reglurnar í Norðurlondum á hesum økinum eru grundaðar á de nordiske katalogregler. Úr ES kom eisini í 1996 eitt direktiv um dátugrunnar (Databasedirektivet 96/9/EF). Her verður ein dátugrunnur allýstur soleiðis: "en samling af værker, data eller andet selvstændigt materiale, der er struktureret systematisk eller metodisk og kan konsulteres individuelt ved brug af elektronisk udstyr eller på anden måde". Hetta er eisini sett inn í donsku ásetingina um dátugrunnar.*

*Ásetingin er galdandi uttan mun til, um dátugrunnurin er talgildur ella ei. Tøkniliga støðið í dátugrunninum hevur í útgangsstøðinum ikki ávirkan á metingina av, um dátugrunnurin er vardur av upphavsrættinum ella ikki. Ein dátugrunnur við effektivari leitiskipan er tí ikki meira ella betur vardur enn ein dátugrunnur, sum hevur eina minni effektiva leitiskipan.*

*Verja eftir ymiskum reglum: Dátugrunnar kunnu verða vardir eftir bæði §§ 2, 7 og loksins eisini eftir "sui generis"-reglunum, sum vóru førdar inn í norðurlendsku upphavsrættarlógirnar eftir, at dátugrunsdirektivið kom úr ES. Fyri at ein dátugrunnur skal verða vardur sambært § 2, má kunna staðfestast at dátugrunnurin er úrslit av einum sjálvstøðugum, skapandi avriki. Hetta er galdandi á sama hátt sum fyri onnur sløg av verkum. Verjan eftir § 2 er, tá sjálv samansetingin av dátu er so upprunalig, at dátugrunnurin sjálvur verður eitt verk í lógarinnar merking. Verja eftir § 7 er, tá dátugrunnurin samansetir onnur vard verk. Í hesum sambandi hevur tað ikki týdning, hvussu tað tøkniliga í dátugrunninum er skipað. Her hevur sjálvt valið av tilfari størri týdning. Eitt fullfíggjað savn av upplýsingum innan fyri eitt ávíst øki, kann aldri vera upprunaligt, og verður tí ikki vart sum eitt felagsverk sambært § 7. "Sui generis"-verjan varð førd inn í donsku lógina eftir, at ES kom við direktivinum um dátugrunnar. Henda verjan hevur við sær, at dátugrunnar kunnu verða vardir, hóast teir ikki lúka treytirnar fyri verju sambært §§ 2 og 7. Endamálið við "sui generis"-verjuni, er at veita verju til dátugrunnar, sum ikki kunnu verjast sum verk. Hesar reglurnar hava við sær, at dátugrunnar kortini kunnu verjast í styttri tíð. Treytin fyri verju sambært "sui generis"- reglunum er, at innihaldið skal vera úrslit av en væsentlig investering antin í nøgd ella góðsku.*"

**Til § 50 - Tíðindaskriv**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 33 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Verjan eftir hesi áseting fevnir bert um tíðindaskriv, sum sambært avtalu verða veitt av tíðindastovu í útlondum ella útsendum tíðindafólkum. Ásetingin fevnir bert um tey føri, har ein miðil í Føroyum ber tíðindi víðari, sum hesin hevur fingið frá einum útsendum tíðindafólki ella frá einari tíðindastovu í útlondum, sum føroyski miðilin fær tíðindi frá sambært avtalu. Endamálið er at forða fyri, at tíðindastovur snulta á avtalur hjá øðrum tíðindastovum. Verjan er einans 12 tímar. Meðan tíðindaskrivið er vart, kunnu aðrar tíðindastovur bert bera somu tíðindi*

*fram, um tær fáa samtykki til hetta, ella um tær hava eina aðra keldu til hesi tíðindi (t.d. frá einari aðrari útlendskari tíðindastovu).*

*Í hesi áseting eru allir miðlar javnsettir. Tí fevnir hon um tíðindaskriv, sum verða borin fram í útvarpi, sjónvarpi, bløðum og á alnetinum.*

*Fyri at verja skal gerast galdandi, má tíðindastovan tilskila, at tíðindini stava frá útlendskum tíðindastovum ella útsendum tíðindafólki.*

*Tíðindi (dagsnyheder m.v.) eru staðiliga undantikin frá virkisøkinum í upphavsrættinum, sí Bernsáttmálan art. 2 (8). Hetta er orsakað av tí áhuga, samfelagið hevur í, at tíðindi verða borin fram. Tíðindini sjálvi kunnu tí frítt endurgevast av øðrum tíðindastovum. Tíðindaskrivið sjálvt kann vera vart av upphavsrættinum, um tað lýkur treytirnar fyri verju. Og tí mugu tíðindastovur, ið bera fram tíðindi frá øðrum tíðindastovum, hava í huga ikki at leggja seg ov nær orðaljóðinum í tíðindaskrivinum.*"

**Til § 51 – Tittul, dulnevni og frámerki**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 11 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Ásetingin er flutt til henda kapittul, tí mett verður, at ásetingin bygnaðarliga svarar best til at standa aftaná onnur rættindini, tí her er talan um onnur rættindi, hóast talan ikki er um onnur rættindini av tí slagnum, ið koma undir kap. 4.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Titlar og onnur frámerki á bókmenta- ella listaverkum verða við hesi áseting vard ímóti at verða nýtt til sama endamál á øðrum verkum. Verjan fevnir í útgangsstøðinum um øll verk, eisini tey, har gildistíðin fyri upphavsrættin er endað, ella verk, sum ikki koma undir upphavsrættarverju her í landinum. Hevur eitt verk ikki verkhædd, er tittulin ella frámerkið heldur ikki vart av upphavsrætti.*
*Ein tittul kann í serligum føri hava slíka verkhædd, at tann í sjálvum sær er vardur upphavsrættarliga. Hevur ein tittul sereyðkenni, kann upphavsmaður gera verjuna galdandi, um so er, at vandi er fyri, at verkið verður blandað saman við annað verk við líknandi titli. Talan skal tó vera um tittul, sum verður nýttur við sama endamáli.*
*Upphavsrættur sambært hesi grein kann ikki gerast galdandi, fyrr enn verkið er almannakunngjørt. Rætturin er galdandi fyri titlar og øll onnur frámerki, eyðkenni ella dulnevni og verður lagdur afturat verjuni sambært aðrari lóggávu, t.d. lóg um marknaðarføring.*
*Stk. 2. ásetir eitt mark fyri, nær talan kann verða um tilætlaða samanblanding av titli ella øðrum frámerki, sum nevnt í stk. 1.*"

**Til § 52 – At seta undirskrift á listaverk**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 9 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Ásetingin er flutt til henda kapittul, tí mett verður, at ásetingin bygnaðarliga svarar best til at standa aftaná onnur rættindini, tí her er talan um onnur rættindi, hóast talan ikki er um onnur rættindini av tí slagnum, ið koma undir kap. 4.

Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*”Henda greinin snýr seg um upplýsing um navnið á listafólkinum ella annað frámerki á eintøk av listaverkinum. Upphavsmaður undirskrivar sítt listaverk, og eitt dulnevni verður javnsett við navn ella frámerki hjá viðkomandi. Roknast má við, at upphavsmaðurin ikki skrivar undir, fyrr enn tann metir, at verkið er endaligt, tí kann undirskriving, sum sær út til at vera frámerki hjá listafólkinum, gera stóran skaða, bæði fíggjarliga og í mun til hansara rættindi.*
*Undirskrivingin er persónlig, og tað er bara upphavsmaðurin, sum eigur at kunna taka avgerð um at seta sína undirskrift á verkið. Upphavsmaðurin kann í einstøkum føri lata rættin at skriva undir til onnur, men rætturin kann ikki latast frammanundan at fevna um ikki eyðmerkt listaverk.*
*Stykkið verjir listafólkið soleiðis, at eingin uttan listafólkið sjálvt kann seta sítt navn á listaverkið. Hetta kann verða viðkomandi í mun til, nær upphavsmaður hevur givið loyvi til útgávu ella almannakunngering, serliga um frámerki verður sett á liðug verk, sum enn ikki eru endaliga góðkend ella farin í alment umfar.*
*Stk. 2 verjir listafólkið og almenningin ímóti, at navn ella frámerki hjá einum listafólki kann verða sett á avrit av frumverkinum, soleiðis at ein eftirgerð kann verða blandað saman við frumverkið. Hetta hevur ikki týdning í mun til gildistíðina av upphavsrættinum.*
*Verður navnið á listafólkinum ella eitt frámerki á eini eftirgerð tikið burtur, kann tað stríða ímóti § 8 um, at navnið skal verða upplýst.*
*Støður, sum kunnu íkoma av skeivum navni ella frámerki, eru ikki altíð fevndar av upphavsrættinum. Talan kann heldur verða um brot á aðra løggávu, t.d. revsilógina*.”

**Til § 53 - Amboð til uttanumvik av tøkniligum útbúnaði**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 29 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

“*Amboð til uttanumvik av tøkniligum útbúnaði Hetta er áseting, sum bannar umfari av amboðum, sum kunnu geva ólógliga atkomu til telduforrit. Brot á ásetingina er brot á upphavsrættin, sum kann verða revsað, og har talan kann verða um endurgjaldskrav.*

*Avritssperra, sum er tøkniligur útbúnaður, verður stundum løgd inn í telduforrit fyri at forða fyri avriting. Av tí at talan er um verju av telduforritinum, skal í hesum høpi verða loyvt at seta lógliga avritssperru í telduforritið. Men hetta merkir eisini, at er avritssperra sett í telduforrit, sum forðar fyri lógligari avriting, so er loyvt at fara uttan um avritssperruna. Í praksis er torført at fara uttan um sperruna, men tað er loyvt í sambandi við lógliga avriting.*

*Henda áseting snýr seg um útbúnað, sum kann taka burtur ella fara uttan um tøkniligan útbúnað, sum er ein avritssperra. Talan kann vera um telduforrit ella t.d. um skrivligt tilfar, sum gevur kunnleika um, hvussu avritssperra verður tikin burtur. Talan skal tó vera um tilfar, sum hevur til endamáls á ólógligan hátt at taka burtur avritssperru. Ein grein, sum upplýsir um, hvussu eintøk verða framleidd til lógliga nýtslu, og har farið verður uttan um avritssperru á lógligan hátt, er sjálvsagt ikki ólóglig.*”

**Til § 54 - Munadyggur tøkniligur útbúnaður**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 30 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*"Her verður ásett verja av avritssperrum og øðrum tøkniligum útbúnaði. Talan er um verju av verkum, sum eru vard sambært lógini, t.e. har upphavsmaðurin lýkur krøvini og fortreytirnar fyri upphavsrættarverju. Ásetingin fevnir ikki um avritssperru í telduforritum sum t.d. telduspølum.*

*Stk. 1. Áðrenn farið verður uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað, skal loyvi frá upphavsmanni vera tøkt. Talan kann vera um at taka burtur loyniorð ella bronglan og líknandi. Bannið er eisini galdandi, sjálvt um talan er um at gera nýtslu av lógligum brúki, sum t.d. avrit til egið brúk.*

*Stk. 2. Tað er ikki loyvt at taka stig til gerðir, sum kunnu geva íkast til, at farast kann uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað. Tær gerðir, sum verða nevndar í greinini, eru ikki loyvdar, um talan er um marknaðarføring av hjálpartólum ella útbúnaði at nýta til at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað. Heldur ikki er loyvt at marknaðarføra tólini ella útbúnaðin, um hesi í avmarkaðan mun hava annað endamál enn at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað. Og tað er avgjørt ikki loyvt, um tólini ella útbúnaðurin hava sum høvuðsendamál at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað.*

*Stk. 3. Ásetingin í stk. 2 er somuleiðis galdandi fyri tænastuveitingar. Tí er bannað at veita tænastu, sum er marknaðarførd, ella har talan er um marknaðarføring við tí endamáli at veita tænastu til at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað.*

*Stk. 4.  Allýsing av munadyggum tøkniligum útbúnaði. Tøkniligur útbúnaður verður vardur, tí høvuðsendamálið og vanliga nýtslan er at verja verk og aðra framleiðslu, sum verður vard sambært lógini. Talan er um krøv, sum ásett í infosoc-direktivinum, har endamálið er at forða fyri ella avmarka gerðir, sum upphavsmaður ella annar rættindahavari ikki hevur givið loyvi til. Tí skal tøkniligi útbúnaðurin nýtast í mun til gerðir, sum eru fevndar av einkarættinum hjá upphavsmanninum. Tað er ikki allur tøkniligur útbúnaður, sum verður vardur, tað er einans útbúnaður, sum er munadyggur. Avritssperra, sum verður sett inn í framleiðslu á talgildan hátt, skal lúka verjuendamálið. Tøkniligur útbúnaður, sum ikki er verulig forðing fyri gerðum, sum eru at fata sum einkarættur hjá upphavsmanni, lýkur ikki treytirnar fyri verju. Heldur ikki atkomutrygdarskipanir eru fevndar av ásetingini, sum einans snýr seg um skipanir, sum skulu hava tamarhald við møguleikanum at gera avrit.*

*Stk. 5. Avritssperra, sum verjir telduforrit, er ikki fevnd av ásetingini. Víst verður í staðin til frammanfyri standandi grein. Hinvegin er telduforrit, sum er hjálpartól og útbúnaður at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað, fevnt av greinini.*

*Stk. 6. Verjan av munadyggum tøkniligum útbúnaði er ikki forðing fyri, at granskað kann verða í bronglan (kryptering). Tað merkir, at tað er ikki bannað at fara uttan um tøkniligan útbúnað til tess at fáa nøktandi granskingarúrslit um bronglan. Úrslit, sum eru fingin til vega á henda hátt, kunnu  verða almannakunngjørd og givin út. Fyribrigdið bronglan skal skiljast breitt."*

**Til § 55 - Loyvt uttanumvik av munadyggum tøkniligum útbúnaði**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 31 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*"Stk. 1. Henda áseting er avleiðing av, at bann er sett at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað. Í teimum førum, har tað ikki er nóg mikið við sjálvbodnu møguleikunum at loysa ósemju um, hvørt farið kann verða uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað, kann landsstýrismaðurin eftir áheitan og við hóskandi freist áleggja einum rættindahavara at geva brúkara møguleika at fara uttan um tøkniliga útbúnaðin. Tá ein brúkari hevur fingið viðhald soleiðis at skilja, at rættindahavaranum er álagt at geva møguleika at fara uttan um munadyggan tøkniligan útbúnað, kann brúkarin lógliga sjálvur taka stig til at fara uttan um útbúnaðin, tá freistin, sum rættindahavarin hevur fingið at loysa trupulleikan, er farin.*

*Ásetingin kann hava virknað í mun til hesi viðurskifti, sum eru regulerað beinleiðis í lógini ella í kunngerð við heimild í kapitlinum um avmarkingar í upphavsrættinum. Upptøka av útvarps- og sjónvarpssendingum til nýtslu á sjúkrahúsum, ellisheimum, o.l. Framleiðsla av eintøkum v.m. í sambandi við virksemi á skjalasavni, bókasavni og øðrum søvnum. Endurgeving og spjaðing av eintøkum til fyrimuns fyri sjón- og hoyriveik. Framleiðsla av ritsøvnum í frálæruhøpi. Almenn framsýning í sambandi við frálæru. Endurgeving av listaverkum v.m. í viðgjørdum ella vísindaligum líki. Endurgeving av almennum samráðingum v.m. Innlit og atgongd til skjalasøvn. Endurgeving av verki í sambandi við rættarmál, almenna málsviðgerð v.m. Stokkutar upptøkur t.d. í sjónvarpi. Í sambandi við og í mun til gjald av viðurlagi fyri almennar framførslur av ljóðupptøkum. Ásetingin er ikki galdandi fyri avrit til privata nýtslu. Mál um spurningar av hesum slagi kunnu leggjast fyri rættin, men eitt møguligt rættarmál hevur ikki steðgandi virknað.*

*Stk. 2. Her verður ásett, at stk. 1 bert er galdandi, tá ið rættindahavarin ikki hevur tryggjað, at brúkari kann brúka sín rætt við sjálvbodnum útbúnaði. Er útbúnaðurin soleiðis innrættaður, at farið kann verða uttan um tann í sambandi við lógliga nýtslu, er talan um sjálvbodnan útbúnað.*

*Áðrenn mál verður lagt fyri landsstýrismannin ella til annan almennan myndugleika, sum hevur fingið heimild at viðgera málið, skulu rímiligar royndir verða gjørdar at finna loysn á málinum. Ein loysn kann t.d. verða funnin við avtalu, samráðing el.líkn.*

*Stk. 3. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri verk og aðra framleiðslu, sum er tøk fyri brúkara "on demand" við avtalutreytum. Orsøkin er skyldan sambært infosoc-direktivinum, sum áleggur limalondunum at skipa økið, uttan mun til um avtalur eru gjørdar. T.e. at online-tænastur, sum verða bodnar út umvegis alnetið o.l., har treytir fylgja við uttan ítøkiliga avtalu, ikki koma undir hesa ásetingina.*

*Stk. 4. Danmark hevur latið Ophavsretslicensnævnet uppgávuna at taka støðu í málum, sum verða viðgjørd sambært hesi grein. Í Føroyum hava vit ikki enn tikið støðu til, hvør myndugleikin verður, sum kann koma í staðin fyri danska Ophavsretslicensnævnet. Við hesum verður latið upp fyri, at almennur myndugleiki kann átaka sær uppgávuna, eitt nú semingsmaður."*

**Til § 56 – Elektrónisk rættindaumsiting**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt og svarar til § 32 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*"Tað hevur víst seg at vera tørvur á verju ímóti ólógligari burturtøku av upplýsingum um rættindaumsiting, sum eru settar á verkið í elektróniskum líki. Roknast má við, at rættindahavarar fara at nýta talgilda rættindaumsiting (digital rights management) í størri og størri mun í framtíðini. Hetta merkir, at t.d. upplýsing, sum er eyðmerki hjá rættindahavaranum, verður limað inn í talgilda verkið sum eitt talgilt vatnmerki. Eyðmerkið gevur rættindahavarum møguleika at hava eftirlit við nýtsluni av teirra verkum. Somuleiðis tryggjar talgilda vatnmerkið, at einans heimilaðir brúkarar hava atgongd til at gera brúk av varda verkinum. Annar háttur at tryggja eftirlit við verkinum er brúk av talgildari undirskrift, har rættindahavari bronglar innihaldið á ein slíkan hátt, at einans heimilaðir brúkarar hava loyniorð og líknandi, sum geva atgongd til innihaldið.*

*Fyrimunurin við talgildari rættindaumsiting er, at rættindahavarar kunnu tryggja síni rættindi og geva einstaklingsloyvi. Á sama hátt sum við bronglan er vandi fyri, at talgilda vatnmerkið ella upplýsingarnar verða tikin burtur ella verða broytt, og at brot á tann hátt verður framt á upphavsrættin til varda tilfarið. Endamálið við banninum í hesi áseting er at stuðla nýtsluni av talgildari verju av vardum tilfari og talgildari rættindaumsiting.*

*Ásetingin er galdandi fyri øll verksløg, íroknað telduforrit og pallframførslur o.líkn. Tað er ein treyt fyri upphavsrættarverju, at talan er um vart tilfar. Verða talgildar upplýsingar um rættindaumsiting nýttar til ikki-vart tilfar, er tilfarið ikki vart upphavsrættarliga í sambandi við broyting, burturtøku o.l. av upplýsingunum.*

*Stk. 1, 1. pkt. er bann ímóti at taka burtur ella broyta talgildar upplýsingar um rættindaumsiting. 2. pkt. ásetir bann ímóti at breiða út, innflyta við tí endamáli at breiða út, senda í útvarpi og sjónvarpi, flyta og gera alment atkomulig tey verk, sum av órøttum hava fingið broytt ella burturtikið talgildar upplýsingar um rættindaumsiting.*

*Stk. 2. ásetir, at gerðir, sum eru nevndar í stk. 1, einans eru bannaðar, um viðkomandi ikki visti ella átti at vitað, at gerðin hevur við sær brot á upphavsrættin."*

**Til § 57 - Avhending**
Ásetingin er av sera stórum týdningi í avtaluhøpi, og tískil er hon nágreinað í sínum orðaljóði, soleiðis at hon er beinleiðis í samsvar við § 53 í donsku lógini (sbr. serliga "specialitetsgrundsætningen"), tí tað verður mett at vera av týdningi at fáa nágreinað, at tað ikki einans er hátturin, men eisini miðilin, ið avtalan skal fevna um.
Annars er ásetingin innihaldsliga ikki broytt stórvegis.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*"At upphavsrættur kann avhendast framgongur av Bern- sáttmálanum art. 2, stk. 6. Henda áseting er aðalreglan um, at upphavsrættur kann avhendast. Tá ið upphavsrættur verður avhendur, eru tó nøkur rættindi, sum vera verandi hjá upphavsmanni, m.a. "droit moral", sum er skyldan hjá tí, sum nýtir eitt verk á einhvønn hátt, at upplýsa navnið á upphavsmanninum.*

*Vanligu ognarrættarligu reglurnar eru galdandi, tá ið upphavsrættur verður avhendur. Ein avhending sambært hesi lóg fevnir um øll sløg av avhending av upphavsrætti, uttan mun til hvussu nógv rættindi móttakarin fær. Upphavsrætturin verður avhendur við avtalu, og tann, sum*

*hevur vunnið rættindini, verður nevndur rættindahavari. Vunnin rættindi verða eisini nevnd avleidd rættindi.*

*Upphavsrættur byrjar altíð hjá einum likamligum persóni. T.e. at upphavsrætturin byrjar ikki hjá løgfrøðiligum persóni, sáttmálaparti, arbeiðsgevara ella einum, sum hevur bílagt eitt verk. Hinvegin er tað í sambandi við, at upphavsrætturin verður avhendir, at upphavsmaður sum oftast fær fíggjarligan vinning.*

*Møguleikin at avhenda fevnir ikki einans um einkarættin sambært § 2, men eisini um rættindini til viðurlag, sum verður kravt inn sambært gjaldsreglunum í lógini. Upphavsmaður kann harumframt avhenda viðurlagskrøv til onnur og siga frá sær viðurlag. Upphavsmaður kann lata felagsskap umsita síni rættindi ella part av rættindunum og harvið avmarka sín egna rætt at avhenda upphavsrættin.*

*Navnið á upphavsmanni skal verða upplýst, har tað hóskar, bæði á eintøkum og tá ið verkið verður almannakunngjørt, sambært § 8. Sambært stk. 3 í somu grein er ikki loyvt at siga upphavsrættin frá sær, uttan tá ið talan er um serlig viðurskifti, og tá skal bæði slag og tilfar vera  klárt og týðiliga fráboðað. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi fylgirættargjøldum, tvs. teimum gjøldum, sum upphavsmaður hevur rætt til, tá ið myndlist verður endurseld í eitt nú vinnurekandi framsýningarhølum. Hesi rættindi kunnu ikki verða avhend, og allar avtalur um hesi viðurskifti eru ógildugar.*

*Verður upphavsrættur avhendur lutvíst, verða ávís rættindi latin øðrum, meðan upphavsmaðurin varðveitir restina av rættindunum ella velur at lata tey til onnur. Sum dømi kann nevnast, at avtala við bókaforlag vanliga fevnir um útgávu av bókini, meðan upphavsmaðurin varðveitir rættin at kunna avhenda filmsrættindi til onnur.*

*Eisini framtíðar rættindi kunnu avhendast. Spurningurin um hesi rættindi kunnu stinga seg upp, hóast hesi ikki eru kend, tá ið avtalan um avhendingina var gjørd. T.d. kann upphavsrættarverjan verða víðkað, ella nýggj lond kunnu hava tikið undir við Bern-sáttmálanum. Tað verður tó altíð ein ítøkilig tulking av avtaluni, sum staðfestir, um framtíðar rættindi eru avhend. Eitt eldri dømi er um ein rithøvund, sum váttar at hava latið víðari rættin at gera film, sum síðani varð vístur í sjónvarpi. Í dóminum varð dentur lagdur á, at sjónvarpið var byrjað at senda um hetta mundi, tá ið rithøvundurin váttaði, at rætturin var latin víðari. Tí var mett, at tann, sum rættindini vóru latin til, hevði neyðuga grundarlagið at gera brúk av filminum við at vísa tann í sjónvarpi. Í øðrum føri er staðfest, at avtalan var ítøkilig og fevndi um upptøku á LP, kassettuband og diskil, og at rætturin til útbreiðslu á alnetinum ikki var fevndur av avtaluni.*

*Tað er eisini loyvt upphavsmanni at lata upphavsrættin heilt ella lutvíst frá sær. Hetta verður gjørt innan telduídnaðin og ofta í sambandi við marknaðarføring av eini vøru. Creative Commons er eisini dømi um loyvi, har rættindahavarin fráskrivar sær upphavsrættin. Spurningurin, nær rættindi bindandi eru fráskrivað, verður viðgjørdur samsvarandi teimum vanligu avtalurættarligu reglunum.*

*Upphavsrættur kann verða veðsettur sambært teimum vanligu reglunum um undirveð í leysafæi. Ein, sum hevur fingið rættindi sambært reglunum um avhending av upphavsrætti, kann neyvan*

*seta upphavsrættin í veð, uttan so at tann hevur fingið rættin at avhenda upphavsrættin víðari. Tað er eisini loyvt at avhenda rættin til upphavsrættargjøld við 'transport'.*

*Tá ið upphavsrættur verður avhendur lutvíst, verður rætturin hjá tí, ið fær rættin, avmarkaður í mun til góðsku, nøgd, í tíð og/ella landfrøðiliga. Hvør nýtsluháttur kann verða avhendur fyri seg. Innihaldið í avtaluni um avhendingina avger, um einstakur nýtsluháttur er avhendur.*

*Stk. 2. Tá ið verk verður latið øðrum til ognar, merkir tað ikki, at upphavsrætturin fylgir við. Tað er sjálvsagt, tá ið t.d. fløgur ella bøkur verða seldar og keyptar, men hetta er eisini galdandi, tá ið tað einans er eitt eintak av verkinum, t.d. ein málningur ella eitt handrit. Upphavsmaðurin varðveitir sín upphavsrætt uttan so, at tann hevur avtalað annað, ella tað kann leggjast til grundar sum ein natúrlig fortreyt í avtaluni um avhendingina.*

*Tann, sum hevur ognarrættin til eitt verk, hevur ikki neyðturviliga upphavsrættin til verkið. Hetta merkir hinvegin eisini, at avhending av upphavsrætti ikki er avgerandi fyri, um tað er upphavsmaður ella sáttmálapartur, sum hevur ognarrættin til verkið.*

*Stk. 3. Henda áseting hevur samband við møguleikan at býta avhending av upphavsrætti sundur og fevnir einans um ítøkiligar avtalur. Tað merkir, at undirskilt ella óklár avtala um avhending av rættindum verður at tulka avmarkandi. Her er sostatt munur á tulking av avtalu um upphavsrætt og teimum vanligu tulkingarreglunum í avtalurættinum.*

*Útgangsstøðið er, at upphavsrættur byrjar hjá einum likamligum persóni og kunnu hesi viðurskifti tí hava ávirkan á t.d. starvssetanarviðurskifti. Aðalreglan um, at tann, sum skapar verkið, eigur verkið, hevur við sær, at starvsfólk, sum skapa verk í sínum dagliga starvi fyri ein arbeiðsgevara, í útgangsstøðinum eiga upphavsrættin til verkið. Tað verður tí setanarsáttmálin, ið kemur at avgera, um arbeiðsgevarin eigur rættindini til skapaða verkið. Innan fleiri starvsøki fer skapaða verkið ofta at vera partur av fastari setan, har verk leypandi verða skapað sum liður í virkseminum, ella har viðkomandi hevur sum arbeiðsuppgávu at skapa verk fyri arbeiðsgevaran.*

*Er eingin avtala millum partarnar, er rættarstøðan tann, at arbeiðsgevarin fær rættin at nýta verk í ávísan mun sum liður í vanliga virkseminum hjá arbeiðsgevaranum. Spurningurin her er tí ikki einans, um upphavsrættur kann verða avhendur, men eisini um vavið av avhendingini. Ein setan kann hava sum fortreyt, at upphavsrætturin er avhendur arbeiðsgevaranum. Avhending kann eisini vera undirskilt ella ítøkiliga avtalað, ella hon kann vera ásett í yvirskipaða sáttmálanum á starvsøkinum. Tað eru sum oftast ávísar vinnugreinir, sum áseta avtalur ella sáttmálar, t.d. kringvarp og dagbløð. Verður uppgáva bíløgd, er sum oftast avtalað, at tann, ið bíleggur, vinnur rættin at nýta verkið á ávísan hátt.*

*Próvbyrðan fyri, at upphavsrættur er avhendur og vavið av avhendaða upphavsrættinum, er hjá tí, sum hevur fingið upphavsrættin, og sum sostatt er rættindahavari.*

*Stk. 4. Greinin snýr seg í høvuðsheitum um viðurskifti, sum partarnir kunnu avtala, tí kann verða vikið frá ásetingunum."*

**Til § 58 – Nýtsluskylda hjá tí, ið hevur ognað sær rættindi**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 46 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Tann, sum hevur vunnið rættindi og sostatt er rættindahavarin, hevur skyldu til at brúka vunnað rættin. Ásetingin skal síggja til, at viðkomandi, sum upphavsrættindi eru latin til, ikki skal kunna forða nýtslu av einum verki í teimum førum, har viðkomandi ikki sjálvur byrjar nýtsluna.*

*Nýtsluskyldan verður tí vanliga grundgivin við, at rættindahavarin ikki eigur at kunna skaða ætlanina hjá upphavsmanninum ella áhugamálini í samfelagnum við at ogna sær rættindi, sum ætlanin ikki er at brúka. Ásetingin er ikki viðkomandi í mun til setanarviðurskifti.*

*Fyrsta punktum er skyldan, sum áliggur tí, sum upphavsrættur verður avhendur til. Annað punktum hevur við sær, at vunnin rættindi fella aftur til upphavsmannin, verður avtalaða brúkið ikki sett í verk innan ásett tíðarskeið eftir, at upphavsmaðurin hevur gjøgnumført sín part av avtaluni. Vantandi íverkseting er, bæði tá ið nýtslan ikki er byrjað, og tá ið hon er byrjað, men ikki framd sum avtalað. Hevur upphavsmaður t.d. avhendað rættindini til eitt handrit, lutvíst til bókaútgávu og lutvíst til filmsgerð, vil upphavsmaður kunna steðga avtaluni í mun til rættindini at gera filmin.*

*Ein avtala, sum verður uppsøgd sambært hesi gein, skal sigast upp, tá ið 3-ára freistin er farin. Tann, sum upphavsrættindi eru avhend til, fær 6 mánaðir at seta í verk avtalaðu nýtsluna. T.e. at byrjar nýtslan ella íverksetingin í uppsagnartíðarskeiðnum, hevur avtaluparturin gjørt sín part av avtaluni til fulnar. Verkið skal ikki neyðturviliga verða útgivið í hesum tíðarskeiði, tað er nóg mikið, at fyrireikingar eru gjørdar, og at gongd er í málinum.*

*Tá ið verk fellur aftur til upphavsmannin, kunnu verða avmarkingar, sum hesin skal hava fyrilit fyri. Tað kann áliggja ávís loyalitetsskylda í mun til tann, sum hevði rættindini og sum møguliga hevur gjørt brúk av pørtum av rættindunum. Eisini kunnu avmarkingar verða, um fleiri upphavsmenn eru til eitt verk.*

*Henda áseting útilokar ikki, at sakarmál um avtalubrot og í tí høpi endurgjaldskrav kann verða sett fram.*

*Stk. 2. Víkjast kann einans frá tíðarfreistini á 3 ár, ella freistini at siga avtaluna upp.*"

**Til § 59 – Avmarking í nýtslurætti í sambandi við avhending**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 47 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Her verður staðfest, at ein avtala um avhending av upphavsrætti ikki hevur við sær loyvi til at broyta í verkinum ella at víðari avhenda rættin til onnur. Ásetingin er í samsvari við § 38, stk. 3. Tað er loyvt við ítøkiligari avtalu at víkja frá hesi áseting. Broyting í einum verki kann tó vera*

*roknað sum fortreyt fyri avtaluni og harvið vera loyvd. Atlit skal tó takast til "droit moral", tvs. skylduna at upplýsa navnið á upphavsmanninum.*

*Talan er her um serreglur, sum hava framíhjárætt í mun til vanligu avtalurættarligu reglurnar og rættarvenjuna annars, tá tað snýr seg um tulking av avtalum.*

*Útgangsstøðið er, at broyting ikki má verða gjørd í einum verki, sum viðkomandi hevur vunnin rættindi til. Tann, sum verk er avhent til, hevur skyldu at nýta verkið í uppruna líki, tvs. í tí skapi, sum upphavsmaðurin hevur avhent tað. Hevur vanliga nýtslan við sær, at broyting verður gjørd, kann tað verða loyvt. Tá ið mett verður um, hvørt brot er framt á hesa áseting, verður atlit tikið at verkslagi og tøkniligum viðurskiftum í sambandi við nýtsluna av verkinum.*

*Stk. 2. Útgangsstøðið er, at vunnin rættindi ikki kunnu verða avhend øðrum. Avhending krevur loyvi, sum merkir, at avhending av vunnum rættindum einans kann fara fram, um tað er vanligt at gera tað, ella um hetta er ein fortreyt í avtaluni við upphavsmannin um avhendingina.*"

**Til § 60 - Kunngerðaheimild**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 48 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Heimilað verður landsstýrismanninum at áseta reglur um viðurskifti, sum eru avleiðing ella framhald av tí, sum er ásett í omanfyri nevndu greinum. Orsøkin til, at hesi viðurskifti verða ásett í kunngerð, er, at rættarstøðan javnan verður broytt, og at tað kann verða ein skjótur háttur at dagføra reglurnar um avhending, um tað annars ikki kemur í andsøgn við innihaldið í lógini. At landsstýrismaðurin kann áseta reglur, merkir ikki, at reglur skulu verða ásettar, so at frammanfyri standandi greinir virka til fulnar.*

*Rættindini hjá tí, sum avhendir, kunnu t.d. vera rættindini hjá upphavsmanninum í sambandi við viðurlag ella gjald fyri avhent verk. Eisini kunnu hugsast reglur um viðurskifti hjá persóni, sum hevur átikið sær uppgávu, t.d. at leika í filmi ella at luttaka í tiltaki. Verður mett neyðugt, kunnu reglur verða ásettar um avleidd rættindi hjá tí, sum framleiðir ella stendur fyri tiltakinum.*

*Rættindi kunnu eisini vera krav um viðurlag fyri ávísa nýtslu av einum verki. T.d. um upphavsmaður avhendir sín rætt til eitt verk til annan at leiga út.*

*Rættindi og skyldur innan ávíst starvsøki kunnu eisini verða ásettar beinleiðis í kunngerð. Verður ynski t.d. sett fram um eina grein, har tað innan ávíst øki er tørvur á reglum um arbeiðsgevara rættindini, kunnu reglur verða ásettar um, at verk, sum verða skapað í arbeiðstíðini fyri ein arbeiðsgevara, gerast ogn hjá arbeiðsgevaranum. Í galdandi donsku lógini er áseting um telduforrit, sum verða skapað sum liður í arbeiðinum.*

*Avmarkingar, sum kunnu verða ásettar, eru t.d., at upphavsmaður ikki hevur fult ræði á verki, sum annar hevur bílagt frá tí.*"

**Til § 61 - Serlig áseting um telduforrit**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 49 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Henda áseting er eitt av undantøkunum til vanligu skipanina av upphavsrættinum. Her verður ásett, at upphavsrætturin til telduforrit, sum er framleitt sum liður í føstum starvi, verður arbeiðsgevarans. Orsøkin til hetta undantakið er, at forrit ofta verða framleidd av fleiri starvsfólkum í felag, og at starvsfólk, sum luttaka í framleiðsluni, kunnu skifta arbeiðspláss uttan at nýtslurætturin til forritið verður ávirkaður.*

*Tað er uttan týdning, um forritið verður framleitt í vanligari arbeiðstíð ella ikki. Tað, sum hevur týdning, er, at starvssetanin fevnir um framleiðslu av telduforriti, umframt at framleiðslan fer fram eftir arbeiðsgevarans fyriskipan og leiðbeining. Hetta hevur eisini við sær, at um starvssetanin ikki fevnir um framleiðslu av telduforriti, so verður upphavsrætturin til forrit, framleitt av arbeiðstakaranum, ikki fevnt av ásetingini. Hetta er galdandi uttan mun til, um arbeiðstakarin hevur nýtt teldu ella annan útbúnað, sum arbeiðsplássið eigur. Her kann metingin eisini verða ávirkað av, at arbeiðstakarin hevur framleitt forritið í frítíðini.*

*Arbeiðsgevarin ger tí av, um hesin vil nevna starvsfólkini við navni í forritinum ella ikki. Víkjast kann frá hesari ásetingini í avtalu. Hetta er í útgangsstøðinum treytað av, at frávikið er staðiliga nevnt í t.d. starvssetanarsáttmálanum.*"

**Til § 62 - Andlitsmynd**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 50 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Tvær treytir skulu vera loknar, fyri at ein andlitsmynd verður fevnd av hesari áseting. Í fyrstu syftu skal talan vera um eina andlitsmynd. Ásetingin fevnir um fotomyndir, málningar, tekningar o.l., men ikki um bringumyndir. Er verjutíðin sambært § 53 farin, verður verkið heldur ikki fevnt av ásetingini.*

*Í aðru syftu skal verkið vera bílagt. Tað merkir, at myndin skal vera bíløgd, áðrenn hon verður skapað. Tað er uttan týdning, um bíleggjarin er partur av myndevninum. Tá bíleggjarin ikki er partur av myndevninum, er tað bíleggjarin, ið skal geva samtykki til, at myndin verður framsýnd, og ikki tann, ið er á andlitsmyndini.*

*Í útgangsstøðinum skal upphavsmaðurin hava samtykki frá bíleggjaranum hvørja ferð, tann vil hava myndina á framsýning. Bíleggjarin kann tó eisini geva upphavsmanninum eitt meira generelt loyvi, til at sýna verkið fram. Rætturin at samtykkja fer ikki víðari við arvi og fellur tí burtur, tá ið bíleggjarin doyr.*

*Hetta skal ikki skiljast sum, at bíleggjarin hevur upphavsrætt. Tað hevur tann ikki. Tann hevur bert ein ræðisrætt yvir verkinum. Bíleggjarin og upphavsmaðurin kunnu avtala, at upphavsrætturin verður avhendur til bíleggjaran sambært § 45. Til hetta krevst tó ein staðilig og greið avtala millum partarnar.*

*Tað er upphavsmaðurin, ið hevur átalurætt mótvegis broti á upphavsrættin. Bíleggjarin kann tó átala brot á hansara rættindi, tvs. um upphavsmaður ella annar sýnir myndina fram uttan samtykki frá bíleggjara.*"

**Til § 63 - Arvur**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 51 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Tá ið upphavsmaður doyr, ganga arvingarnir í hansara stað í viðurskiftum um upphavsrætt. Hetta merkir m.a., at hjúnafelagi, ið situr eftir, kann sita í óskiftum búgvi við upphavsrættindunum, at upphavsrættur verður tikin við, tá ið búgv verður gjørt upp, og at upphavsrættur í útgangsstøðinum er felagsogn hjá teimum, sum sita eftir. Tá ið biðið verður um loyvi samsvarandi reglunum í lógini, skulu øll, sum eru arvingar eftir upphavsmannin, geva samtykki. Somuleiðis merkir tað, at arvingar taka við teimum skyldum og avtalum um avhending, sum upphavsmaðurin hevur fingið í lag.*

*Stk. 2. Upphavsmaður kann ráða yvir sínum upphavsrætti við testamenti í tann mun, tvangsarvur ikki forðar hesum. Hevur upphavsmaður ongar arvingar, fellur upphavsrætturin til landið sambært arvalógini.*"

**Til § 64 – Innheinting frá kravánara**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 52 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Tað er ikki loyvt kravánara at gera úttøku ella aðra innheinting í upphavsrættinum. Kravánari kann ikki noyða upphavsmannin at almannakunngera ella geva út sítt verk við tí endamáli at dekka síni krøv við inntøkuni frá útgávuni. Roknast má við, at ásetingin fevnir um einhvønn hátt at ráða yvir verkinum, har upphavsmaðurin hevur einkarætt samsvarandi lógini.*

*Framtíðar gjaldskrøv kunnu heldur ikki verða innheintað í rættinum. Hetta er galdandi bæði fyri almannakunngjørd verk og tey, sum ikki eru almannakunngjørd. Reglan er galdandi fyri upphavsmannin, hjúnafelagan og arvingarnar. Hinvegin kann verða innheintað í útgoldnum upphavsrættargjøldum og í gjøldum, sum eru vunnin, men ikki útgoldin enn.*

*Orsøkin til, at tað ikki er loyvt at gera krav í framtíðar upphavsrættargjøldum, er, at man vil sleppa undan, at upphavsmaður letur vera við at geva loyvi til nýtsluna av verkinum, um tann ikki fær fíggjarligan vinning burturúr orsakað av kravinum.*

*Upphavsmaður kann neyvan geva frá sær verjuna sambært hesi grein, men tann vil sannlíkt kunna vísa á upphavsrættargjøld í eini støðu, har kravánari ger sítt krav galdandi. Upphavsrættur kann eisini verða veðsettur, men tá verður talan um avhending av upphavsrætti. Henda grein fevnir tó ikki um rættindahavarar. Tann, sum hevur fingið upphavsrættin við avtalu, er sostatt ikki vardur ímóti innheintingarkravi.*

*Stk. 2. Tað ber til at gera krav í eintaki av einum verki, sum er almannakunngjørt. Við hesi áseting verða trý frávik ásett, sum ikki ber til at gera krav í. Talan er um handrit, bæði bókmentahandrit og tónleikahandrit, uttan mun til um goymslan er talgild. Tað ber heldur ikki til at gera krav í formum og líknandi, sum listafólki nýtir at skapa síni verk. Orsøkin er, at hesir formar hava fíggjarligan týdning fyri listafólkið, upphavsmannin, men at teir sannlíkt hava lítið ella einki virði fyri kravánaran. Í triðja lagi kann kravánari ikki fara eftir eintøkum av verkum, sum ikki eru góðkend at verða almannakunngjørd.*"

**Til § 65 – Gildistíð fyri upphavsrætt**

Ásetingin er næstan innihaldsliga óbroytt í mun til § 53 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó er nýggj áseting sett inn í lógina í mun til gildistíð viðvíkjandi tónlist. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Gildistíðin fyri upphavsrætt varar vanliga í 70 ár eftir, at upphavsmaðurin doyði. Tá tað snýr seg um felagsverk, er avgerandi árið tað árið, tá ið tann, ið livdi longst, doyði. Fyri filmar eru tað tó ávísir bólkar av upphavsmonnum, sum avgera, hvussu leingi upphavsrætturin varar.*

*Gildistíðin er eisini galdandi fyri verk, sum sambært eldri lóggávu høvdu styttri verjutíð, enn henda lógin ásetir. Tað kann tí koma fyri, at upphavsrættur vaknar aftur, um gildistíðin fyri upphavsrættin nú verður longd.*

*Er talan um ónavngivið verk, og upphavsmaðurin ikki er kendur, kann gildistíðin í serligum føri verða roknað frá tíðspunktinum, tá ið verkið var almannakunngjørt ella skapað. Rætturin sambært § 8, droit moral, røkkur longri enn 70 ár.*

*Tá ið gildistíðin er runnin, kann eitt verk frítt verða brúkt, uttan at upphavsmaður skal geva loyvi til nýtsluna. Tað skal heldur ikki rindast fyri nýtsluna av verkinum, tá ið gildistíðin er endað. Tó skal fyrilit havast fyri, at avtalur kunnu vera, sum geva rættindahavara rætt til gjøld, hóast gildistíðin er farin.*

*Hóast gildistíðin fyri eitt verk kann vera farin, kann verkið innihalda onnur verk, sum enn eru vard. T.d kann ein filmur innihalda fleiri sjálvstøðug verk, t.d. bókmentir, tónleik ella myndlist. Tá er neyðugt við samtykki frá upphavsmonnunum til hesi verk, áðrenn tey verða nýtt.*

*Stk. 2. Tá ið upphavsmaðurin ikki er kendur, kann gildistíðin ikki verða roknað sum 70 ár eftir, at upphavsmaðurin doyði, tí verður henda ásetingin viðkomandi. Her er ásett, at útgávudagurin ella almannakunngeringin av verkinum er avgerandi í metingini. Gildistíðin er 70 ár eftir, at verkið er almannakunngjørt.*

*Stk. 3. Her verður vikið frá stk. 2 omanfyri. Verður upplýst, hvør upphavsmaðurin er, áðrenn 70 ár eru farin eftir almannakunngeringina, er stk. 1 galdandi í mun til metingina av gildistíðini av upphavsrættinum.*

*Fyri at forða fyri spekulatión í møguleikanum at leingja gildistíðina, er ásett, at stk. 2 heldur ikki er galdandi, um til ber at staðfesta, at upphavsmaðurin er deyður, áðrenn verkið var almannakunngjørt. Tá so er, er stk. 1 galdandi.*

*Stk. 4. Her verður lagt upp fyri, at upphavsmaðurin er ókendur ella dulnevndur, og at verkið ikki er almannakunngjørt. Tá er stk. 2 nevniliga ikki galdandi, og tí hevði gildistíðin í útgangsstøðinum verið óavmarkað. Fyri at umganga óavmarkaða gildistíð verður ásett, at upphavsrætturin varar í 70 ár eftir, at verkið var tilevnað.*

*Verður navn ella dulnevni almannakunngjørt, áðrenn 70 ár eru liðin eftir, at verkið var tilevnað, eru stk. 2 og 3 galdandi í metingini av gildistíðini.*"

**Til § 66 – Framførsla**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 54 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin hjá teimum útinnandi listafólkunum til egna framførslu ásett. Í ESlondum er lógaruppskot í umbúna um at leingja verjutíðina sambært hesi grein. Við hesari grein er verjutíðin longd, so hon fer at samsvara við tað, ið væntandi verður galdandi í øllum ESlondum, tá tey hava dagført lóggávuna. Verjutíðin er í útgangsstøðinum 50 ár.*"

**Til § 67 – Ljóðupptøka**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 55 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin fyri rættindini hjá framleiðarum av ljóðupptøkum ásett. Í ESlondum er lógaruppskot í umbúna um at leingja verjutíðina sambært hesi grein. Við hesari grein er verjutíðin longd, so hon fer at samsvara við tað, ið væntandi verður galdandi í øllum ESlondum, tá tey hava dagført lóggávuna. Verjan er í útgangsstøðinum 70 ár.*"

**Til § 68 – Myndatøka**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 56 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin hjá framleiðara av myndatøku ásett. Verjutíðin er 50 ár.*"

**Til § 69 – Kringvarpssendingar**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 57 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin fyri kringvarpssendingar ásett. Verjutíðin er 50 ár.*"

**Til § 70 – Fotomyndir**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 58 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin fyri fotomyndir ásett. Verjutíðin er 50 ár.*"

**Til § 71 – Vørulisti, dátugrunnur v.m.**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 59 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Í hesi grein verður verjutíðin fyri vørulistar, dátugrunnar vm. ásett. Verjutíðin er 15 ár.*"

**Til § 72 - Rættindi tá gildistíðin er liðin**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 60 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Uttan mun til gildistíðina eigur tann, ið ger brúk av einum verki, at hava virðing fyri rættindunum, sum upphavsmaðurin hevði. Tað er serliga reglan um, at navnið á upphavsmanninum verður upplýst, og at verkið framhaldandi er í tí skapi, sum upphavsmaðurin gjørdi tað.*"

**Til § 73**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 61 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um uphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Her verður ásett, at verður eitt verk ikki almannakunngjørt í tíðarskeiði, har upphavsrætturin verður vardur, fær tann, ið verður fyrstur at almannakunngera tað, sama rætt til vinning av verkinum, sum upphavsmaðurin annars hevði havt sambært hesi lóg. Hesin rættur verður vardur í 25 ár frá fyrsta árskiftið eftir, at verkið var almannakunngjørt.*"

**Til § 74 - Revsiásetingar**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 62 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Revsitiltøk í upphavsrættarligum høpi fevna um revsing, sum er bót og fongsul í upp til 1½ ár, endurgjald og samsýning, burturbeining og almannakunngering av dómi í upphavsrættarmáli. Átalureglurnar eru ikki revsing, men tær eru partur av rættarverjuni. Einans brot ella gerðir, sum fara fram í Føroyum, eru fevndar av hesi lóg.*

*Revsiverdar gerðir verða lýstar í greinini, og eisini er ásett, hvørjar greinir talan er um. Verður brot t.d. framt á § 2, sum snýr seg um, at tann, sum skapar eitt verk, hevur upphavsrættin til verkið, verður revsing ásett sambært hesi grein.*

*Próvbyrðan fyri brot á upphavsrættin er í útgangsstøðinum hjá tí, sum setir fram pástand um brotið, tvs. tann, sum hevur upphavsrættindini. Hesin má prógva, at brot er framt á upphavsrættin, og síðan verður tað uppgávan hjá brúkaranum at prógva, at tann hevur hildið seg innan fyri ásettar karmar.*

*Tá tað snýr seg um brot á aðrar ásetingar í lógini ella um brot á ásetingar í kunngerð við heimild í lógini, verður talan um brot á § 2 um einkarættin til skapaða verkið. Tí verða øll brot ikki sjálvstøðugt revsað, men skulu síggjast í mun til einkarættin. Tað, sum krevur at verða nevnt sjálvstøðugt í mun til revsing, eru §§ 8, 9 og 11 um upplýsing um upphavsmannin.*

*Sum revsitiltak í upphavsrættar høpi er krav um endurgjald tann mest nýtta. Talan er um rímiligt gjald fyri ólógliga nýtslu, endurgjald fyri skaða, sum lógarbrotið hevur elvt til, og endurgjald fyri ikki-fíggjarligt tap.*

*Endurgjaldskrav verður ofta sett saman við kravi um fyribeining el.líkn. av ólógligum eintøkum av verkum. Harumframt kann hald leggjast á ágóðan, sum spyrst burtur úr einum revsiverdum broti.*

*Fútabann er ikki ein sjálvstøðug revsing, men eitt fyribils revsitiltak. Lógin um upphavsrætt ásetir ikki reglur um fútabann. Fútabann merkir ítøkiliga, at rætturin setir bann fyri ávísari gerð, og at fútabannið er stílað til viðkomandi, sum fremur gerðina. Reglurnar um fútabann eru ásettar í rættargangslógini.*

*Í stykki 3 er heimild at áseta revsing í kunngerðum, sum verða gjørdar við heimild í lógini. Talan er um viðurskifti, sum hava við fyrisitingina av upphavsrættargjøldum at gera, og um viðurskifti, sum snúgva seg um avleidd rættindi, sum eitt nú útinnandi listafólk hava rætt til.”*

**Til § 75**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 63 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

“*Revsing kann verða ásett, um brúkari av vardum verkum ikki virðir skylduna at upplýsa felagsskapum, sum virka við loyvi frá landsstýrismannin, um nýtsluna av vardum verkum. Talan er um framsýningargjøld, fylgirættargjøld ella yvirlit yvir spældan tónleik, sum rindast skal fyri. Eisini skulu t.d. kringvarpsstøðir lata seg skráseta hjá nevndu felagsskapum, soleiðis at felagsskapurin fær eitt skilagott samstarv við kringvarpsstøðirnar. Hetta er neyðugt til tess at tryggja, at rættindahavarar fáa tey upphavsrættargjøld, teir hava krav uppá.*

*Ásetingarnar um viðurlag til upphavsmenn koma ikki undir revsiásetingarnar í hesi lóg, og skal tað síggjast í sambandi við, at manglandi inngjald til felagsskap, sum umboðar upphavsmenn, kann verða innheintað sambært vanligu rættarreglunum um innheinting.”*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Til § 76**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 64 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Talan er um áseting um sjálvstøðuga revsing fyri brot í sambandi við sonevnda innflutningsrættin. Tað merkir, at ávís eintøk av vardum verkum ikki kunnu verða innflutt til landið á lógligan hátt. Hetta skal síggjast í sambandi við rættin at geva út eintøk og at spjaða tey alment.*

*Verður eintak givið út ella almannakunngjørt móti viljanum hjá upphavsmanninum, er talan um brot á upphavsrættin. Verður eitt verk framleitt, sum upphavsmaðurin ikki hevur givið samtykki til, kann tað ikki verða spjatt. Spjaðing av eintøkum, sum eru framleidd á lógligan hátt, men seld ella avhend uttan samtykki frá upphavsmanninum, verða ikki fevnd av rættinum til spjaðing.*

*Henda áseting fevnir um alla framleiðslu av verkum, uttan mun til um verkið er lógliga ella ólógliga framleitt í viðkomandi landi. Hevði framleiðslan av verkinum verið ólóglig, um hon fór fram í Føroyum, so er talan um brot á upphavsrættin.*

*Ásetingin verður nýtt, um viðkomandi land ikki hevur upphavsrættarverju av verki, sum verður vart í Føroyum, t.d. tí at gildistíðin er farin í viðkomandi landi, men ikki í Føroyum. Eisini kann talan vera um, at verkið er framleitt í ósamsvari við lóggávuna í viðkomandi landi, og ein samsvarandi framleiðsla í Føroyum eisini hevði verið í stríð við hesa lóg.*

*Greinin fevnir einans um framleiðslu og spjaðing av eintøkum, men ikki um verk verða kringvarpað umvegis talgildu miðlarnar frá útlandi til Føroya.*

*Brot er framt longu, tá ið eintøk verða innflutt. Tað er tó ein treyt, at talan er um innflyting til tess at gera eintøkini tøk fyri almenninginum við at spjaða tey ella vísa tey alment. Innflutningur til privata nýtslu er loyvdur.*

*Greinin kann ikki nýtast sum verja fyri innflutningi av eintøkum av verkum, sum ikki eru vard av upphavsrætti í Føroyum. Reglan er sostatt ikki galdandi fyri verk, sum eru heimahoyrandi í landi, sum ikki hevur tikið undir við Bern-sáttmálanum ella WCT-sáttmálanum (World Copyright Treaty).*

*Ásetingin fevnir ikki einans um eintøk av verkum, men eisini um eintøk av upptøkum o.a., sum eru vard sambært reglunum um avleidd rættindi hjá t.d. útinnandi listafólkum.*"

**Til § 77**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 65 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*“Revsing sambært hesi grein er fyri brot á § 29, sum snýr seg um bann fyri at hava um hendur amboð, sum hevur sum endamál at lætta um burturtøku ella uttanumvik av tøkniligum útbúnaði, sum skal verja telduforrit.*

*§ 30 snýr seg um munadyggan tøkniligan útbúnað, har tað krevur samtykki ella loyvi frá upphavsmanninum, áðrenn farast kann uttan um slíkan útbúnað.*

*§ 32 setir bann fyri at taka burtur elektróniskar upplýsingar um rættindaumsiting ella at útbreiða, innflyta o.l. verk, har elektrónisku upplýsingarnar eru tiknar burtur ella broyttar uttan játtan frá tí, sum hevur rættindini.”*

**Til 78**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 66 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*“Vanlig áseting um, at revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum.”*

**Til 79 - Átala**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 67 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

*“Talan er um privata átalu, uttan í teimum førum, har tað staðiliga er ásett, at brot kann átalast av tí almenna.*

*Tann, sum hevur verið fyri órætti, er viðkomandi, sum hevur rættindini til verkið, sum brotið snýr seg um. Útgangsstøði er, at tað er upphavsmaðurin, sum hevur átalurættin, men tá ið talan er um felagsverk, hava allir upphavsmenninir átalurætt. Er upphavsmaðurin ikki longur á lívi, eru tað arvingarnir, sum hava verið fyri órætti og tí hava átalurætt.*

*Tá ið talan er um átalurætt fyri brot á ásetingarnar um upplýsingarskyldu mótvegis felagsskapum, eru tað nevndu felagsskapir, ið hava átalurættin. Tvs. teir felagsskapir, sum umboða upphavsmenn innan ávísar listagreinir í Føroyum, og sum útinna sítt virksemi í Føroyum við loyvi frá landsstýrismanninum.*

*Stk. 2 snýr seg um viðurskifti, tá ið upphavsmaður ikki longur er á lívi. Tvs. at talan er um “droit-moral” sbr. § 8 og um ávísing, sum upphavsmaðurin hevur givið í testamenti, sbr. § 51, stk. 2.*

*Stk. 3 gevur hinum almenna rætt til at átala brot á “droit-moral” ásetingina í § 8 og eisini á §§ 9 og 11, sum eru um upplýsing um upphavsmannin, sett sum frámerki á varda verkinum, ella tá ið upphavsmaðurin hevur nýtt serligan tittul, dulnevni ella frámerki.*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*Stk. 4 vísir til § 60, sum snýr seg um viðurskifti eftir, at gildistíðin fyri upphavsrætt er farin, tá ið serliga "droit-moral" er viðkomandi. Er talan um brot, sum hevur við sær brot á mentanarlig áhugamál, so kann tað almenna átala brotið.*

*Stk. 5 er kunngerðarheimild. Nøkur viðurskifti fara at verða ásett í kunngerð, t.d. um rættindini hjá útinnandi listafólkunum. Brot á hesi viðurskifti kunnu eisini verða átalað, og tí verður á sama hátt, sum tá ið revsing verður ásett í kunngerð, ásettar reglur um átlurætt fyri brot á reglurnar í hesum kunngerðum."*

**Til § 80**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 68 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Stk. 2 í §§ 62 og 64 snýr seg um brot á tær greinir, sum nevndar eru í stk. 1 í nevndu greinum, sum er gjørt við vilja, og tá ið tað fyriliggja herðandi umstøður orsakað av, at verk ella eintøk av verkum hava verið endurgivin ella spjadd alment, og revsingin tí kann verða hækkað til fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, uttan so at talan er um brot á áseting í revsilógini, sum gevur hægri revsing.*

*Herðandi umstøður eru, um brotið verður framt í vinnuligum høpi, um týðandi nøgd av eintøkum verður framleidd ella spjadd alment, ella um verk verða endurgivin á slíkan hátt, at almenningurin fær atgongd til tey á einum sjálvvaldum staði og til ásetta tíð, sbr. § 3, stk. 3. At revsingin fyri hesi brot kann vera fongsul, eru umstøður, sum hava við sær, at tað almenna, tvs. ákæruvaldið, kann átala eftir áheitan frá tí, sum hevur verið fyri órætti, ella gera av at átala av sínum eintingum, tí almenn áhugamál krevja átalu.*

*Tað merkir tó ikki, at tað almenna hevur skyldu til at átala eftir áheitan. Gjørd verður sjálvstøðug meting av málinum, og verður málið ikki átalað av ákæruvaldinum, hevur tann, sum hevur verið fyri órætti, rætt til at átala privat.*"

**Til § 81 – Endurgjald og samsýning**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 69 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar. Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Viðurlag og endurgjald er treytað av, at brot er framt á áseting, sum er nevnd í §§ 62-64. Er talan um brot á áseting, sum ikki er nevnd í greinunum um revsiáseting, er henda grein ikki galdandi, men tá kunnu umstøðurnar vera soleiðis háttaðar, at talan kann vera um viðurskifti, sum geva endurgjald eftir vanligu endurgjaldsreglunum.*

*Brotið skal vera framt við vilja ella av ósketni, t.v.s. culpøst. Tann, sum hevur krav um endurgjald, er tann, sum hevur upphavsrættin um hendi og sum tí hevur verið fyri órætti.*

*Stk. 2 er ikki úttømandi, men vísir á, hvørji atlit skulu takast, tá ið endurgjald verður ásett.*

*Stk. 3 er ikki áseting, sum er kravd, tá ið endurgjald verður ásett. Talan er um áseting, har tann, sum hevur verið fyri órætti, kann fáa endurgjald fyri ikki-fíggjarligan skaða. Talan skal vera um brot, sum er gjørt við vilja ella av ósketni.*

*Eisini brot á rættindi, sum útinnandi listafólk hava sambært lógini, kunnu fáa endurgjald sambært hesi grein.*"

**Til § 82 – Fyribeining o.a.**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 70 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Ásetingin gevur møguleika at fyribeina og afturkalla eintøk av verkum, sum eru framleidd á ólógligan hátt. Fyribeining kann einans verða gjørd við dómi. Ásetingin gevur sostatt ikki rætt til fyribeining í sambandi við fútamál. Tað er rætturin, sum ger av, um eintøk skulu fyribeinast, og kann rætturin í tí sambandi gera av, at t.d. eintøk, sum eru í varðveitslu á bókasavni, ikki skulu fyribeinast.*

*Ásetingin kann verða nýtt í sambandi við fleiri mál. T.d. um tann, sum hevur verið fyri órætti, er partur í øðrum máli, og brotið longu er staðfest, men at tørvur er á at nýta ásetingina í mun til triðja-mann, sum hevur ólóglig eintøk um hendi, sum rættindahavarin ynskir fyribeind. Ásetingin kann tískil verða nýtt, hóast subjektivu treytirnar fyri revsing og endurgjaldi ikki eru loknar.*

*Í mun til nr. 1) merkir: "tikin aftur frá sølustøðum", at eintøk, sum eru gjørd við náptøku, kunnu verða tikin aftur úr smásølu við møguleika fyri, at vørurnar seinni kunnu verða settar til sølu á sølustøðunum.*

*Nr. 2) um at framleiðsla verður "endaliga beind burtur frá sølustøðum" merkir, at møguleikin at taka vøruna burtur fyribils frá smásølustøðum ikki er til staðar. Burturtøkan ella fyribeiningin er endalig.*

*Nr. 3) orðið "fyribeind" merkir, at vøran verður gjørd til einkis. T.d. at eintøk av bókum verða gørd til einkis. Er talan til dømis um eina síðu í einari bók, sum er ólóglig, skal so vítt gjørligt, verða møguligt at prenta bókina av nýggjum, har ólógliga síðan verður svertað.*

*Í nr. 4) er møguleiki at lata tí, sum hevur verið fyri órætti, eintøkini av ólógligu eintøkunum.*

*Stk. 2 ásetir, at møguleikin at fyribeina eisini er galdandi fyri tilfar, amboð ella líknandi, sum hevur verið nýtt til at framleiða ólóglig eintøk, umframt tey ólógligt framleiddu eintøkini. Talan kann vera um prentmyndir, formar og annað, sum kann virka við til ólógliga framleiðslu av eintøkum. Rætturin kann avgera, at hesir formar v.m. verða fyribeindir, ella at misnýtsla av teimum ikki longur kann fara fram.*

*Stk. 3 ásetir, at tiltak sambært stk. 1 verður gjørt fyri rokning hjá tí, sum hevur framt brotið, uttan so, at serligar orsøkir fyriliggja. Harumframt verður ásett, at tiltøk sambært stk. 1 ikki*

*geva tí, sum hevur framt brotið, rætt til serligt viðurlag ella samsýning, umframt at hesi viðurskifti ikki verða tikin við, tá ið eitt møguligt endurgjald verður ásett.*

*Stk. 4 ásetir, at rætturin skal nýta proportionalitets sjónarmið, tá ið avgerð um fyribeining verður tikin. Tað skal vera lutfall millum brotið og tiltakið, sum verður sett í verk. Er t.d. talan um bygning, sum ger seg inn á rættindini hjá upphavsmanni, tí brot er framt á tekningarnar til bygningin, sum arkitekturin hevur rættin til, so ber ikki til at seta tiltak um fyribeining av bygninginum í verk.*

*Áhugamálini hjá triðjamanni kunnu t.d. vera brúkari og privatpersónur, sum hevur verið í góðari trúgv viðvíkjandi brúkinum. Sí tó omanfyri um at tiltak kann verða gjørt um fyribeining, tá ið ólógligt framleidd eintøk eru komin í hendurnar á einum, sum er í góðari trúgv. Rætturin fer tó at vera varin við at seta tiltak í verk um fyribeining í slíkum førum.*"

**Til § 83**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 71 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt. Tó eru tilvísingarnar tillagaðar eftir, at lógin nú hevur fleiri lógargreinar.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Rætturin hevur møguleika til at gera av, at dómur um brot á upphavsrættin, skal almannakunngerast heilt ella partvís. Endamálið er at fáa tann, sum ætlar at fremja brot á upphavsrættin í framtíðini, at aftra seg, og at økja vitanina alment um upphavsrætt og brot á upphavsrættin.*

*Talan er um sivil rættarmál og einans um dómar. Tað er tí ikki loyvt at almannakunngera úrskurð t.d. í máli um fútabann ella handtøku.*

*Sambært stk. 2 er tað tann, sum hevur framt brotið, sum fær álagt at almannakunngera dómin og sum skal rinda fyri almannakunngerðingina.*

*Dómurin skal verða almannakunngjørdur á eyðsýnligan hátt og eftir ávísing frá rættinum.*"

**Til § 84**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt í mun til § 72 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt.
Viðmerkingarnar til lógina frá 2013 eru endurgivnar niðanfyri:

"*Føroyska lógin um upphavsrætt verður galdandi fyri gerðir, framdar í Føroyum, tvs. á føroyskum landøki og sjóøki, harundir umborð á føroyskt skrásettum skipum.*

*Av tí at danska lógin um upphavsrætt er galdandi fyri danskar ríkisborgarar og annars er avmarkað til danska ríkið, verður ásett, at lógin tekur útgangsstøði í ríkisborgaraskapinum, tvs. donskum ríkisborgarum í Føroyum.*

*Altjóða bindingar, fyrst og fremst Bern-sáttmálin, áleggja Føroyum at áseta upphavsrættarverju fyri verk, sum upphavsmenn í limalondunum í Bern-samveldinum, hava skapað. Tí verður, tá ið*

*samanum kemur, lítil ella eingin munur gjørdur á føroyingum ella verkum, sum føroyingar hava skapað, og útlendingum ella teirra verkum.*

*Orsøkin til, at hesi viðurskifti verða ásett í kunngerð er, at tað verður gjørt í donsku lógini, og at altjóða sáttmálar eru, sum Føroyar enn ikki hava tikið undir við, men sum verða ásettir í kunngerðini, tá ið teir eru settir í gildi fyri Føroyar. Talan er í fyrsta lagi um WIPO-sáttmálarnar WCT og WPPT, sum Mentamálaráðið fer at taka stig til at seta í gildi. Hesir snúgva seg um rættindini hjá útinnandi listafólkum.*

*Í bókini "International Ophavsret" skriva Peter Schønning og Jørgen Blomquist soleiðis um føroysku viðurskiftini: "På Færøerne gælder anordning nr. 1003 af 11.12.2001. Det færøske landsstyre er i gang med at udarbejde en lov om ophavsret for Færøerne, som efter planen skal vedtages i forbindelse med, at Færøerne overtager sagsområdet ophavsret som et hjemmestyreanliggende. Færinger og grønlændere har dansk statsborgerskab. De kan derfor gøre ophavsretbeskyttelse gældende i Danmark og i andre lande i lighed med andre danske statsborgere. Bopæl på Færøerne eller i Grønland sidestilles også med bopæl i resten af kongeriget. Hvis der i et fremmed land gælder en regel om materiel gensidighed, som gør det nødvendigt at sammenligne med beskyttelsen i værkets hjemland, må det antages, at det også for færøske og grønlandske værker er bestemmelserne i den danske ophavsretslov, der skal sammenlignes med. Det skyldes, at Færøerne og Grønland ikke selvstændigt kan tiltræde de internationale konventioner. Når der i §§ 85 og 86 (í donsku lógini) tales om statsborgerskab, udgivelse, optagelse m.v. i EØS, inkluderer dette Færøerne og Grønland, selv om Færøerne og Grønland ikke er inkluderet i EØS-aftalen (og heller ikke er medlemmer af EU) – det afgørende i denne henseende er, at Kongeriget Danmark er med i EU og EØS. Et værk, som fx er udgivet første gang på Færøerne, beskyttes således umiddelbart i Danmark efter ophavsretslovens regler. Færøerne og Grønland er bundet af de samme ophavsretlige konventioner som resten af Kongeriget, også TRIPs-aftalen. Dog omfatter Danmarks ratifikation af WCT og WPPT ikke Færøerne."*

**Til § 85 – Skiftisreglur**

Loyvini, sum felagsskapirnir Koda, Gramex og Copydan hava fingið síðan málsøkið var yvirtikið, hava verið tíðaravmarkað í 1 ár í senn. Tey loyvi, sum Mentamálaráðið hevur givið nevndu felagsskapum at virka fram til 2015, eru eisini tíðaravmarkað, og tí verður ásett, at loyvini ikki missa gildi við gildiskomuni av hesi lóg. Grundarlagið at krevja inn eftir verður tað sama, har dentur verður lagdur á fría samráðingarrættin millum felagsskapin, sum umboðar upphavsmenninar, og brúkararnar av vardu verkunum.

Í stk. 2 er ásett, at avtala millum felagsskap, sum umboðar upphavsmenn, og brúkara ikki missir gildi við gildiskomuni av hesi lóg. Her eru somu atlit galdandi, sum nevnd í stk. 1. Eisini verður við hesum skiftisreglum ásett, at rættindi, ið eru íkomin, áðrenn henda lóg kemur í gildi, framvegis eru galdandi og vera at døma eftir teimum reglum, ið vóru galdandi, tá ið rættindini íkomu.

**Til § 86 - Gildiskoma**

Áseting um gildiskomu, har løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 og reglur gjørdar við heimild í hesi, fara úr gildi. Einasta regla gjørd við heimild í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 er kunngerð um fylgirættargjald, sum nú óbroytt er innlimað í § 38 í lógina.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Til § 87**
Broyting verður gjørd í revsilógini soleiðis, at tilvísingin samsvarar við ásetingarnar í hesi lóg.

Mentamálaráðið, 5. mars 2015

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Fylgiskjøl:**

1. Hoyringarsvar frá Fjølrit
2. Hoyringarsvar frá Copy-Dan Verdens TV
3. Hoyringarsvar frá LISA
4. Hoyringarsvar frá KODA/Gramex
5. Hoyringarsvar frá MBF
6. Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
7. Hoyringarsvar frá FMR

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo